| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 227<br>Forkvinnunnar merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 19. mars 2026 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr:**

**FUNDARLEIÐARI:**
Elsa Berg

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Gunnar Djurhuus
Annita á Fríðriksmørk
Anja Weyhe
Bergur Robert Dam Jensen
Guttormur í Skála
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Høgni Vilhelmsen
Birgir Nielsen
Elin Heðinsdóttir Joensen

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðfríð Jacobsen
Fríður P. Dalsgarð
David Andresen
Jeanette Ellefsen Blaasvær
Øssur Patursson
Mortan Simonsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Olga Knudsen/Anna Brekku Havmand

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 228 |
| | Forkvinnunnar merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 71/26 | 26/02782-1 | Kristianna Winther Poulsen berst frá at møta á býaráðfundi 19. mars 2026 | 230 |
| 72/26 | 26/02785-1 | Heidi Lava Elgeirsdóttir berst frá at møta á býaráðfundi 19. mars 2026 | 231 |
| 73/26 | 26/00448-1 | Mál beind í nevndir 2026 | 232 |
| 74/26 | 25/10172-2 | Gøtunavnanevndin: Brýr um Sandá – Brúgv 2 | 234 |
| 75/26 | 25/10174-2 | Gøtunavnanevndin: Brýr um Sandá – Brúgv 4 | 236 |
| 76/26 | 25/05986-1 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum - 21/02924 | 238 |
| 77/26 | 25/03407-1 | Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini - bráðfeingis tørvur á hølum næstu tvey skúlaárin | 248 |
| 78/26 | 25/03549-3 | Bústaðarbygging í Norðreki í Kollafirði, matr. nr. 313a - 23/02421 | 256 |
| 79/26 | 25/09430-1 | Íverksetan av rakstrarstovninum Lendis- og kirkjugarðstænastan | 259 |
| 80/26 | 25/08370-1 | Frítíðarhús í Hesti – matr. nr. 101 og 10a - 22/00328 | 264 |
| 81/26 | 25/01096-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak | 268 |
| 82/26 | 25/01104-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað | 277 |
| 83/26 | 25/05861-4 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri kampusøkið, matr. nr. 1017d | 285 |
| 84/26 | 25/10305-5 | Nýggj serstøk byggisamtykt undir Gráasteini, matr. nr. 1094c og 1094d, Tórshavn | 290 |
| 85/26 | 25/00581-2 | Útstykking til sethús við Stórutjørn - 22/02943 | 293 |
| 86/26 | 25/09598-16 | Uppfylging av arbeiði á ógreiðu matrikulviðurskifti á matr. nr. 658, Tórshavn - matr. nr. 658d - 14/03110 | 299 |
| 87/26 | 26/00599-1 | Fjarhiti til útstykkingina Stórutjørn | 302 |
| 88/26 | 25/05927-1 | Skráseting av náttúrusløgum í TK | 305 |
| 89/26 | 25/03368-1 | Dagføring av burturkastgjøldum 2025 | 309 |
| 90/26 | 26/01955-3 | Tórshavnar havn - broyting í reglugerð fyri bátapláss á landi | 313 |
| 91/26 | 25/03083-1 | Koblingstøð til Eysturbýin og havnaøkið - 21/04720 | 315 |
| 92/26 | 25/10660-2 | Umsókn um leigu av øki til eina goymsluhøll á matr. nr. 230a hjá Tórshavnar havn | 321 |
| 93/26 | 26/00420-6 | Makaskifti av lendi millum matr.nr. 1354a og 1354b, | 323 |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 229<br>Forkvinnunnar merki: |


| | | | |
|---|---|---|---|
| 94/26 | 26/01686-3 | Matr.nr. 676g, Tórshavn. Umsókn um loyvi til víðarisølu. | 326 |
| 95/26 | 26/02479-1 | Framflytingar fyri roknskaparárið 2025 | 328 |
| 96/26 | 26/00100-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2026 | 330 |
| 97/26 | 25/08236-1 | Innskriving í forskúla og 1. flokk og grunduppttøkuøkir / skúlaumdømir | 332 |
| 98/26 | 26/01565-2 | Áheitan um at broyta hámarksferðina á havnarvegnum | 353 |
| 99/26 | 25/01670-1 | Staðseting til lestrarheim í Havn | 355 |

**Til viðgerðar**

## 71/26 Kristianna Winther Poulsen berst frá at møta á býaráðfundi 19. mars 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 71/26 | 26/02782-1 |

**Málslýsing:**
Kristianna Winther Poulsen hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Elin Heðinsdóttir Joensen, eru loknar.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Tikið til eftirtektar.

# 72/26 Heidi Lava Elgeirsdóttir berst frá at møta á býaráðfundi 19. mars 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 72/26 | 26/02785-1 |

**Málslýsing:**
Heidi Lava Elgeirsdóttir hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Gunnar Djurhuus, eru loknar.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Tikið til eftirtektar.

# 73/26 Mál beind í nevndir 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 3/26 | 26/00448-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 26/26 | 26/00448-1 |
| 3 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 73/26 | 26/00448-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**:

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Framlagt.

| | Býráðsfundur<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 234 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

# 74/26 Gøtunavnanevndin: Brýr um Sandá – Brúgv 2

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 26.11.2025 | 143/25 | 25/10172-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 09.03.2026 | 39/26 | 25/10172-2 |
| 3 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 74/26 | 25/10172-2 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Vísandi til mál 21/03817 (Brýr um Sandá – nøvn), so mælir Gøtunavnanevndin til at brúgvin eitur "Velbastaðarbrúgv"

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd    Ja ☐    Nei ☐**

**Skjøl**
Víst verður til myndina í skjal 25/10172

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Vísandi til mál 21/03817 (Brýr um Sandá – nøvn), so mælir Gøtunavnanevndin til at brúgvin eitur "Velbastaðarbrúgv"

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 235 |
| | | Forkvinnunnar merki: |

**Mentamálanevndin 26. november 2025:** Útsett.

**Mentamálanevndin 09. mars 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 236<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 75/26 Gøtunavnanevndin: Brýr um Sandá – Brúgv 4

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 26.11.2025 | 145/25 | 25/10174-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 09.03.2026 | 38/26 | 25/10174-2 |
| 3 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 75/26 | 25/10174-2 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Vísandi til mál 21/03817 (Brýr um Sandá – nøvn), so mælir Gøtunavnanevndin til at brúgvin eitur "Kirkjubøarbrúgv".

Brúgvin er á gøtuni til Kirkjubøar. Tað hevði verið gott, um navnið bendið á, at hetta var gøta til Kirkjubøar, so fólk, ið ikki eru kend her, fara rætta leið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**
Víst verður til myndina í skjal 25/10174-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Vísandi til mál 21/03817 (Brýr um Sandá – nøvn), so mælir Gøtunavnanevndin til at brúgvin eitur "Kirkjubøarbrúgv".

**Mentamálanevndin 26. november 2025:** Útsett.

**Mentamálanevndin 09. mars 2026:** Nevndin mælir til, at brúgvin fær navnið "Müllers brúgv" og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Einmælt samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

| **Býráðsfundur**<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 238 |
|---|---|
| | Forkvinnunnar merki: |

# 76/26 Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum - 21/02924

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.06.2025 | 77/25 | 25/05986-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 03.09.2025 | 90/25 | 25/05986-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 135/25 | 25/05986-1 |
| 4 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 184/25 | 25/05986-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 220/25 | 25/05986-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 23.02.2026 | 36/26 | 25/05986-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 25.02.2026 | 53/26 | 25/05986-1 |
| 8 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 68/26 | 25/05986-1 |
| 9 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 76/26 | 25/05986-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.04.2026 | 99/26 | 25/05986-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 13.04.2026 | 52/26 | 25/05986-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekstur og tilfar kemur áðrenn fundin.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 239<br><br>Forkvinnunnar merki: |

**Mentamálanevndin 04. juni 2025:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | 3175 | L31011 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | | 2.251.000 |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Umbiðið hesa ferð | Upphædd: | 2.251.000 |
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 71.185.391,65 |
| Áður játtað | Upphædd: | 68.935.343,38 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Mál til viðgerðar: 25/05986 Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum**
Fleiri avleiddar verkætlanir eru íkomnar rundanum økið við Dagstovnin á Hamrinum, sum verða lýst niðanfyri. Talan er í høvuðsheitum um hesi arbeiði:

**Uttandura arbeiði**
*Stuðlaveggur,* sí skjal 1 & sí skjal A-C, j.nr. 25/05986-3, 25/05986-4, 25/05986-5 og 25/05986-6
*Skifta brotnar pelar og lække hegn til 4 m. við FIFA vøll,* sí skjal 2, j.nr. 25/05986-7
*Gøta, trappa í lendi og tvey portur til FIFA vøll,* sí skjal 2 j.nr. 25/05986-7 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-8
*Klæðing av rimaverki, sí skjal 2B, j.nr. 25/05986-9*
*Tilboð Graslíki á Dagstovnuninum á Hamrinum á Argjum, veiting og álegging av graslíki/undirlendi íroknað, sí skjal 2C, j.nr. 25/05986-10*
*Avskerming av vøggustovuøki og barnagarðsøki, garður,* sí skjal 3, j.nr. 25/05986-11

**Innandura arbeiði í verandi stovni**
*Køkur*
*Umbygging í verandi stovni*
*Skilaveggir, ovnar, køliskáp o.a.*
*Hæve/sænkeborð – broyting av skiftirúmum*
*Annað*
*Stuðlaveggur*
Avbjóðingar hava verið við lendisviðurskiftum og uttanumøkinum á eystanfyri Dagstovnin á Hamrinum. Stórur hæddarmunur hevur verið við ovara benið og vegin. Fyri at økið kann vera trygt og at arbeiðið ikki verður steðgað upp hjá báðum arbeiðstakarum á staðnum, Búsetur og RTS, hevur verið neyðugt gera eykaarbeiðið á stuðlavegg framvið vegnum mótvegis økinum við Dagstovnin á Hamrinum. Umsitingin hevur verið í samráðingum við arbeiðstakaran, RTS, um at gera stuðlaveggin við uttanumøkið hjá Dagstovninum á Hamrinum, tí stuðlaveggurin liggur á arbeiðsøkinum hjá RTS. RTS hevur veitt tilboð á hetta arbeiðið at gera stuðlavegg á 50 m, sum 2m høgur og 20cm tjúkkur, íroknað fundament til stuðlavegg 50 m x 0,4 m x 0,4 m. Verkætlanin L31011 hevur fyribils fíggjað hetta arbeiðið, sí skjal 1, skjal 1A, skjal 1B, skjal 1C, j.nr. 25/05986-3, 25/05986-4, 25/05986-5 og 25/05986-6.

Samlaður prísur fyri at hava gjørt hesi arbeiðið er áljóðandi tls.

| | |
|---|---|
| Tilboð á stuðlavegg (RTS) | 349.260,00 u/mvg |
| Prosjektering (LBF) | 20.366,75 u/mvg |
| Kvalitetsikring/eftirlit (LBF) | 5.205,00 u/mvg |
| Til samans uttan mvg. | **374.831,75 u/mvg** |

*Umbygging og nýtsla av FIFA vølli við Dagstovnin á Hamrinum.*
Dagstovnurin á Hamrinum hevur tørv á at fáa eina loysn viðvíkjandi málinum um FIFA vøllin.
Manglandi atgongd til sparkivøllin skapar eina ótrygga støðu, tá skúlabørn skulu á vøllin í fríkorterum og tá  børn í frítíðini spretta net meskarnar í málinum upp fyri at fáa atgongd. Tí er bráðfeingistørvur at fáa loysn á málinum.

Skúlin á Argjahamri hevur havt tørv á eini høgligari leið inn á sparkivøllin, sum er trygg í mun til virksemi hjá dagstovninum.

Børnini í grannalagnum hava eisini tørv á eini høgligari leið inn á sparkivøllin, sum er trygg í mun til virksemi hjá dagstovninum. Byggiprosjekt er sum nú er á staðnum, har byggihegn er sett rundanum vøllin og spæliplássið hjá dagstovninum er flutt, soleiðis at eingin atgongd er til vøllin, uttan gjøgnum høvuðsportrið til dagstovnin.

Umsitingin hevur verið í samskifti við Eigarafelagið á Hamrinum, sum FIFA vøllurin av fyrstani tíð hevur verið bygdur/ætlaður til. Loysnin á málið verður, at tá ið byggiprosjektið er liðugt verður rás, trappa í lendi og tvey portur eystanfyri FIFA vøllin gjørt til børnini á dagstovninum og hjá børnum í grannalagnum annars at nýta um kvøldarnar og í frítíðini sum heild, tá ið stovnurin er stongdur, sí skjal 2 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-7 og 25/05986-8

Eigarafelagið uppi á Hamrinum hevur viðmerkingar at bøta skaðan á verandi hegn rundanum og gera tvey portur, rás, trappu í lendi, sum framvíst, er ein nøktandi loysn.
Eigarafelagið viðmerkir kortini, at vøllurin ikki er í góðum standi, og at vøllurin tíðum er dekkaður við sandi í pørtum av vøllinum, soleiðis at mann ikki kann brúka vøllin. Ynskið er at fáa nýtt graslíki á vøllin og at ein betri loysn verður funnin við at eingin sandur kemur á vøllin, ella í munandi minni mát. Umsitingin hevur kannað málið saman við arbeiðstakaranum og er komin til ta loysn at skerma vøllin betri av frá plássinum við at klæða rimaverkið, soleiðis at børnini ikki sleppa at koyra sand inná vøllin, sí skjal 2B_Klæðing av rimaverki, j.nr.  25/05986-9.

Umsitingin somuleiðis biðið um tilboð á veiting og álegging av graslíki/undirlendi íroknað, sí skjal 2C, j.nr. 25/05986-10.

*Afturbøting av verandi hegni við FIFA vøll*
Verandi hegn rundanum FIFA vøllin varð skatt í vetur. Umsitingin hevur biðið Búsetur kannað málið, hvat ið skilabest er at gera. Búsetur boða frá, at hegnið rundanum er sera høgt og viðbrekið og tað ber illani til at dimensionera og uppbyggja eitt fundament, sum tolir føroyska veðurlagi, tá ið hegni er somikið høgt. Fyri stoyping stórum fundamentum mugu gerast størri inntriv á vøllin og økið annars. Búsetur leggur upp til at seta skrástívarar í, afturbøta verandi pelar og at lækka hegni í til 4 metrar, sí skjal 2 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-7 og 25/05986-8.

*Avskerming av vøggustovuøki og barnagarðsøki við garði/stakitti*

Ynski er frá stovninum at fáa avskerma vøggustovuøkið og barnagarðsøkið við garði. Hetta hevur ikki verið við í prosjektinum. Búsetur hevur veitt tilboð á hetta arbeiðið, áljóðandi 76.053,00 u/mvg, sí skjal 3, j.nr. 25/05986-11

Umsitingin hevur verið í samráð við Búsetur at veita eitt samlað tilboð á ymisk arbeiðið við FIFA vøllin, sí sí skjal 2 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-7 og 25/05986-8.

| | |
|---|---|
| Gera gøtu, trappu í lendi og tvey portur til FIFA vøll: | 106.024,00 u/mvg |
| Skifta brotnar pelar og lækka hegn til 4 m. við FIFA vøll: | 108.000,00 u/mvg |
| Til samans uttan mvg. | **261.614,24 u/mvg** |

**Innandura arbeiði**
Umsitingin hevur verið í samráð við Búsetur um at gera eina samlað loysn og heildartilboð á tilbygging av køki og goymslu í verandi stovni, veiting og montering av nýggjum av køki, ymiskum eykaarbeiði í verandi stovni. Hetta arbeiðið umfatar:

- Verandi veggur við køk verður niðurtikin og berandi límdrakari verður bygdur ístaðin
- Nýggjur køkur sum víst í prinsippi í hjáløgdu skitsu. Ovnar (1 industri + 1 vanligur), 2 kóki plátur á 80 cm uml, og avtrekk verður á somu síðu uttan til høgru, sum verandi.
- Eymhetta/ur skulu monterast í loft.
- Industri vaskimaskina - flutt út mótvegis útiveggi. Vask verður eftir flutt út mótvegis útveggi.
- Rustfrí borðpláta.
- Niðurtøku av verandi foldiveggi og umgerð av goymslurúmi.
- Nýggj høg skáp úr góðari góðsku v/foldivegg.
- Avmontering og eftirmontering av radiatori v/rørføringum.
- Í køkstilboðnum skal prosjektering av køkim´samskifti skal gerast av professionellum køksveitara - alt neyðugt samskifti til brúkarans krøv og ynski (eftirjusteringar) av hyllum skáp við øllum, sum hartil hoyrir - skal verða íroknað
- Yvirskáp ynskjast ikki men heldur góðar hyllar og høgskáp(serliga í trýkantinum, har sum ovnar eru)
- Eitt køliskáp skal vera undir borðinum nær við oynna
- 4 nýggj frystiskáp
- Køliskáp og ovnar í stovunum í verandi stovni
- Fleiri gardropur í verandi stovni í sambandi við, at stovnurin verður broyttur frá vøggustovu til barnagarðsstovu
- Broytingar av borðum og vøskum o.a.
- Veiting og montering av skilaveggjum millum w.c. kummur. BH ynskir tilboð á avmontering/flyting av vaski(flutt-stillað hægri), veiting og montering av nýggjum kranum í vøskum, burturtakan av einum skiftiborð við vaski og veiting og montering av nýggjari borðplátu.
- Broytingar í skiftirúmum. 2 hæve/sænkeborð til 4 vøggustovur, somuleiðis ynskir mann eyka funktiónir inn í skiftirúmini fyri 4 vøggustovur.
- Skilaveggir / spanskveggir
- Nýggj køliskáp og ovn í tveimum stovum í verandi stovni
- Starvsfólkarúm
- Tilhoyrandi timburarbeiði, el arbeiði, hvs arbeiði, málaraarbeiði.

Búsetur hevur veitt samlað tilboð á hesi arbeiði, sum er áljóðandi: 975.776,00, sí skjal 4, j.nr. 25/05986-12

**Samlað fígging**
Samlað fígging til avleiddar verkætlanir, ið eru íkomnar rundanum økið við Dagstovnin á Hamrinum, sí skjal 5, j.nr. 25/05986-13.

**Uttandura arbeiði**

| | |
|---|---|
| Stuðlaveggur | 374.831,75 u/mvg |
| Ymiskt við FIFA vøll | 261.614,24 u/mvg |
| Avskerming av vøggustovuøki og barnagarðsøki, garður | 86.153,00 u/mvg |
| Skjal 2B_Klæðing av rimaverki | 30.000,00 u/mvg |
| Skjal 2C_Tilboð Graslíki á Dagstovninum á Hamrinum | 196.800,00 u/mvg |
| Til samans uttan mvg. | 949.398,99 u/mvg |

**Innandura arbeiði**
*Skiftirúm – puslirúm*
*Starvsfólkarúm*
*Klárgera rúm til nýggjan køk*
*Nýggjur køkur*
*Hvítvørur til nýggjan køk*
*Barnagarður í verandi stovni*
*Flyta gardropuskáp*
*Nýggj gardropuskáp*
*Flyta vaskirennur*
*Nýggj w.c. kumma*
*Spanskveggir*
Tilhoyrandi timburarbeiði, el arbeiði, hvs arbeiði, málaraarbeiði.

| | | |
|---|---|---|
| Til samans uttan mvg. | 975.776,00 | u/mvg |

| | | |
|---|---|---|
| Samlað fyri innandura og uttandura arbeiði u/mvg | 1.925.174,99 | u/mvg |
| Ókendar útreiðslur | 192.517,50 | u/mvg |
| Til samans uttan mvg | 2.117.692,49 | u/mvg |
| | | |
| **Til samans við mvg (6,25%)** | **2.250.048,27** | **v/mvg** |

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á bygningsdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at tikið verður undir við fyriliggjandi tilboðum, og at byggiarbeiðið verður sett í gongd eftir leisti, sum lýst omanfyri
- At játtaðar verða 2.251.000 kr. á Løgukonto L31011, Útbygging – Dagstovnurin á Hamrinum. Fíggjað av tøkum peningi frá 2024.
- at tikið verður undir við fyriliggjandi samlaðu fíggingini.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir.

**Mentamálanevndin 03. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum við tí nágreining, at fíggingin verður játtað av meirinntøkum fyri 2024.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Kári Johansen skjýtur upp at bjóða arbeiðið út.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Kára Johansen.

Fyri atkvøddu: Sunnuva Dahl Høgfeldt, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen, Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Í móti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Annita á Fríðriksmørk og Guttormur í Skála.

5 atkvøddu fyri og 8 atkvøddu ímóti málinum, sum sostatt fall.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Annita á Fríðriksmørk, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen  og Sunnuvá Dahl Høgfeldt.

Í móti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Málið varð sostatt samtykt við 11 atkvøðum fyri, 2 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

**Ískoyti :**
**Parkeringsøki**

Upprunaliga var ætlað, at parkeringsøkið sunnanfyri Dagstovnin á Hamrinum skuldi verða boðið við verkætlanini Bónus og íbúðir á Hamrinum. Tilboðsveitarin á hesari verkætlan hevur boðað frá, at tey standa ikki við tilboð sítt. Hendan verkætlanin skal bjóðast út av nýggjum seinni. Parkeringsøkið er planerað og hevur verið nýtt sum skúrpláss og atkomu hjá Búsetur í byggitíðini í verkætlanini Dagstovnurin á Hamrinum. Nú sum Dagstovnurin á Hamrinum er um at vera liðugur, er neyðugt er at taka støðu til leist at gera eina fyribils loysn til parkeringsøkið sunnanfyri Dagstovnin á Hamrinum. Verkætlanin Dagstovnurin á Hamrinum má hava í minsta lagi 26 parkeringsbásar afturat, til tess at hava nøktandi parkerings- og somuleiðis atkomuviðurskifti.

Umsitingin hevur verið í samráðingum við verandi arbeiðstakara, P/F Búsetur, at standa fyri arbeiðnum at gera eitt fyribils parkeringspláss. Talan er um eitt tilboð á fínplanering, asfaltering av berilagi á økið og fyrireika avvatning og uppstriking av parkeringsbásum. Av tí at tung ferðsla kemur at virka til eina komandi verkætlan á Bónus og íbúðir á Hamrinum - og harvið slíta hetta økið verður bíðað við at asfaltera ovara slitlagið til seinni.

Búsetur hevur veitt tilboð at gera hetta arbeiðið áljóðandi:

**1.042.348,50** u/mvg

Ì hesum kostnaði eru soljóðandi postar:

Klárgering av p-øki við 0-32 skervur t=50mm:
Asfaltering av p-øki við Ab16, t=50 mm:
Avvatning
Garður 40 m
Kantsteinar uml. 80 m

**Fjarhiti**
Í verkætlanini er ikki settur kostnaður av til fjarhita. Umsitingin hevur funnið ein leist at knýta fjarhitan í glyvursvegin. Umsitingin hevur fingið tilboð á fjarhita fingið tilboð á Grevstur og tyrving av fjarhita innføring frá glyvursvegnum til Dagstovnin á Hamrinum áljóðandi 149.480 u/mvg. Afturat hesum varð grivið frá fýrrúminum á nýggja Dagstovninum á Hamrinum og lagt fjarhitarør út í uttanumøki, soleiðis at kundi fáa ræsarúm at arbeiða. Avtalað er at Búsetur og TK deila kostnað 50/50 tí at byggskrá ikki fevndi um fjarhita, áljóðandi 29.328,00. Samlaður kostnaður á Fjarhita er áljóðandi:

149.480 u/mvg,
29.328 u/mvg
178.808 u/mvg

**Innbúgv**
Umsitingin hevur boðið út innbúgv til verkætlanina Dagstovnurin á Hamrinum.
3 tilboð komu inn:

| | |
|---|---|
| ELDING ELRISIN | 2.333.468,17 u/mvg. |
| INNVENTARTÆNASTAN | 1.760.014,40 u/mvg. |
| STOKHOLM | 1.617.197,12 u/mvg. |

Eftir sáttmálasamráðingar við vinnandi arbeiðstakara Stokholm vóru nakrar tillagingar gjørdar á verkætlanina. Endaliga tilboðið var áljóðandi: 1.695.815,92 u/mvg.

Ì útboðnum er somuleiðis øll leys útgerð, smá køksútgerð og allar smáar leikur íroknaðar. Hetta seinasta varð ikki við í upprunaligu kostnaðarmetingini. Settar vóru av 1.282.195,00. Munurin er sostatt 413.620,92 kr u/mvg, sum resta í.

**Ymiskt**
Ynski frá stovninum at fáa gjørt ymiskar tillagingar í verkætlanini Dagstovnurin á Hamrinum:

| | |
|---|---|
| KT Ùtgerð | 69.669,83 |
| Eyka leikur uttanumøki | 271.586,77 |
| Kurvar til garderobur | 11.340,00 |
| 6 Stk Quooker | 64.084,50 |
| Ymisk El eykaarbeiði | 87.985,52 |
| Samlað | 504.666,62 |

**Prís og lønarvøkstur**
Umsitingin hevur í sáttmálasamráðingum við Búsetur gjørt avtalu um, at Búsetur og Tórshavnar kommuna deila prís og lønarvøksturin í verkætlanini.

| Býráðsfundur<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 245 |
|---|---|
| | Forkvinnunnar merki: |

Ì heildararbeiðstakarasáttmála millum Tórshavnar kommuna og Búsetur stendur:
*Samlaða prísjavnanin frá 3. ársfjórðingi 2022 og frameftir, verður býtt við eini helvt til byggiharran, og eini helvt til arbeiðstakaran, bæði um javningin hevur við sær, at prísurin hækkar ella lækkar.*

Samlaða talið á prís og lønarvøkstur í verkætlanini er mett til áljóðandi 4.800.000 u/mvg. Hetta svarar til eina upphædd áljóðandi 2.400.000 u/mvg., sum Tòrshavnar kommuna skal gjalda í prís og lønarvøkstri í verkætlanini.

**Fígging**
Samlaði kostnaður á parkeringsøkið og prís og lønarvøkstur:

| | |
|---|---|
| Parkeringsøkið | 1.042.348,5 u/mvg |
| Fjarhiti | 178.808 u/mvg |
| Innbúgv – munur | 413.620,92 u/mvg. |
| Ymiskt | 504.666,62 u/mvg. |
| Prís og lønarvøkstur | 2.400.000 u/mvg |
| Samlað | 4.797.096 u/mvg |

Við 6,25% mvg er samlaði kostnaðurin at gera hetta arbeiðið:

4.823.159,29 v/mvg.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | LK57047 | FC Hoyvík Felagshús og skýli | 3175 | L31011 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | | 3.000.000 |
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 3175 | L31011 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | | 1.050.000 |
| 2775 | L31020 | Tillagingar á dagstovnaøkinum | 3175 | L31011 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | | 800.000 |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Umbiðið hesa ferð | Upphædd: | 4.850.000 mió |
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 76.008.550,94 |

| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-2026 |
|---|---|---|
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

Ì mun til verkætlanina Dagstovninum á Hamrinum mælir umsitingin til, at uttanhýsis frágreiðing verður gjørd av byggi prosessini og galdandi reglugerðum og mannagongdum í samband við bygging.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á bygningsdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At tikið verður undir við fyriliggjandi kostnaðum og tilboðum, og at byggiarbeiðið verður sett í gongd eftir leisti, sum lýst omanfyri.
- At játtaðar verða 4.850.000 kr. til verkætlan L31011 á henda hátt:
  a. 3 mió. kr. verða játtaðar av Løgukarmi LK57047 FC Hoyvík Felagshús og skýli, undir konto 5775
  b. 1,05 mió. kr. verða játtaðar av Løgukarmi LK68999 Kloakkir, undir konto 6875
  c. 0,8 mió. kr. verða játtaðar av verkætlan L31020, Tillagingar á dagstovnaøkinum, undir konto 3175

- At umsitingin fær heimild at gera arbeiðssetning við uttanhýsis ráðgeva í samband við at gera eina frágreiðing í hesum málinum.

- At tikið verður undir við fyriliggjandi samlaðu fíggingini.

- At beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 23. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, við tí broyting at fíggja verður við 1 mió. kr. av 3175 Dagstovna, frítíðarskúla og ungdómstilboð og 2 mió. kr. av 3175 Tillagingar á dagstovnaøkinum og 1 mió. kr. av Løgukarmi LK 57047 FC Hoyvík Felagshús og skýli, undir kontu 5775 og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen, samtykti at taka undir við mentamálanevndini, við tí broyting at

a. verður fíggjað við 1 mió. kr. av 2775 Eldradepilin í Kollafirði, 1 mió. kr. av kontu 3175 Tillagingar á dagstovnaøkinum, 1 mió kr. av kontu 6109 røkt av bygningum

b. 1,05 mió. kr. verða fíggjað av Løgukarmi LK68999 Kloakkir, undir konto 6875, men arbeiðið verður boðið út.

c. og 0,8 mió kr. av kontu 6275, LK62999 Fríðkan í býnum.

Útreiðslurnar nevndar a, b og c verða játtaðar aftur á kontu í sambandi við fíggjarætlan 2027.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, 2 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Atkvøtt varð við aðru viðgerð, ið varð samtykti við 11 atkvøðum fyri, 2 atkvøðum í móti og ongar blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Elin Heðinsdóttir Joensen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen.

# 77/26 Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini - bráðfeingis tørvur á hølum næstu tvey skúlaárin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.03.2025 | 36/25 | 25/03407-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 07.05.2025 | 66/25 | 25/03407-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.05.2025 | 80/25 | 25/03407-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 14.05.2025 | 89/25 | 25/03407-1 |
| 5 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 124/25 | 25/03407-1 |
| 6 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 148/25 | 25/03407-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 05.11.2025 | 129/25 | 25/03407-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 16.03.2026 | 48/26 | 25/03407-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 17.03.2026 | 59/26 | 25/03407-1 |
| 10 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 77/26 | 25/03407-1 |

**Upprunin til málið**
Avgerð um at loyva trimum 1. flokkum í Sankta Frans fyri skúlaárið 2025/2026

**Lýsing av málinum**
Næmingar í 1. og 2. flokki í Sankta Frans skúla eru knýttir til frítíðarskúlan í Badmintonhøllini.

Talið av innskrivaðum børnum er umleið 100. Sum er tveir 1. flokkar og tveir 2. flokkar.

Mest loyvda barnatal í frítíðarskúlanum er ásett til umleið 60 børn.

Starvsfólk og leiðsla hava gjørt sera nógvar tillagingar og funnið loysnir, sum tó ikki eru optimalar við atlit til námsfrøði, starvsfólkaskipan ella fíggjarligt skynsemi, fyri at rúma øllum næmingunum úr Sankta Frans skúla.

Í 2020 setti kommunan tvær fyribils lonir á fríøkið útsynningsmegin frá Badmintonhøllini. Ein samanseting av staðseting og stødd av hølum gera, at lonirnar vera ikki brúkar av frítíðarskúlanum longur.
Ein lítil barnagarðsbólkur fyri børn, sum hava tørv á einum øðrvísi stovnstilboði, brúkar lonirnar.

Tá tríggir 1 flokkar byrja í august 2025 verður barnatalið umleið 114 børn. Tað er upp ímóti tvífalt so nógv børn, sum bygningurin er mettur til at rúma.
At tað verður ein eyka flokkur afturat ger, at er átrokandi neyðugt at byggja frítíðarskúlan út, og hølini skulu standa klár í august 2025.

Mælt verður til at byggja fyribils lonir til 44 børn.

<u>Tørvslýsing</u>
Lonirnar skulu hava:

- Klædnaklivar til børn og starvsfólk
- Ves til børn og starvsfólk
- Køkur
- Eitt stórt alrúm/felagsrúm, og
- Eitt hóskandi tal av smærri rúmum t.d. samrøðurúm, goymslurúm, starvsfólkarúm, spælirúm til villari spæl, spælirúm til stilt spæl, verkstaðsrúm.

Staðseting
Við atlit til byggingin skal ganga skjótt og so fíggjarliga skynsamt sum til ber, verður mælt til, at lonirnar vera staðsettar á parkeringsbásunum, sum liggja upp til spæliplássið framman fyri frítíðarskúlan.

Uppskot til staðsetingin skal takast við tí fyrivarni, at umsitingin hevur ikki kanna um byggiloyvi og fyribils nýtsluloyvi verður latið. Umsitingin hevur somuleiðis ikki spurt seg fyri, um vit fáa loyvi til at inndraga neyðugu parkeringsbásarnar.

Kostnaðarmeting
Ein varisliga kostnaðarmeting er viðfest í málinum. Metingin er gjørd við støði í tørvslýsingingini í málinum. Metingin skal takast við fyrivarni, tí umsitingin hevur ikki kannað faktisku viðurskiftini á staðnum.
Eindarprísurin tekur útgangsstøði í kostnaðinum fyri líknandi (nýggj) modul, sum vóru keypt og sett upp í Havnadali til Spíran.
Ein annar møguleiki er at bjóða uppgávuna út, har tilboðsveitarar sjálvir koma við uppskotið til slag og góðsku av modulum. Møguliga kunnu brúkt modul skaffast í Føroyum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Um fyribils lonirnar í ein útnyrðing úr Badmintonhøllini
Í 2020 vóru fyribils lonir settar upp á fríøkinum í ein útnyrðing úr Badmintonhøllini. Sambært byggiloyvinum, er talan um eitt fyribils loyvi sum er galdandi í 5 ár. Eftir 5 ár skal alt tað sum verður bygt takast burtur aftur, herundir eisini fundamentir, leiðingar o.a. og økið skal gerast sum tað var áðrenn. (sí mál nr. 20/03276-7)

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Bls. 19 í mannagongd um ásetan av barnatali í frítíðarskúlum í Tórshavnar kommunu (20/010095-2)
Byggiloyvi B2 (20/03276-7)

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 250 |
| | | Forkvinnunnar merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina mæla til, at mentamálanevndin samtykkir:

- at fáa til vega útbjóðingartilfar
- at bjóða arbeiðið út í avmarkað útboð sum heildararbeiðstøka, og
- at úrslitið verður lagt aftur fyri nevndina.

**Mentamálanevndin 12. mars 2025:** Samtykt at seta nýggjar lonir upp og koma aftur í nevnd viðvíkjandi fígging.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur fingið til uppgávu at finna eina staðseting til fyribilsskúrarnar, sum eftir ætlan skulu byggjast áðrenn skúlabyrjan august 2025.

Bygningsdeildin hevur havt fund við Byggimálsdeildina um byggiloyvi og staðseting av lonunum. Byggimálsdeildin hevur framleitt viðheftu myndir, sí j. nr. 25/03407-8, Fyribilshølir til frítíðarskúlan við Badmintonhøllina – Flatmynd og j.nr. 25/03407-8, fyribilshølir til frítíðarskúlan við Badmintonhøllina – Støðumynd.

Í hesum uppskotinum verður víst á eina staðseting á parkeringsplássinum vestan fyri skýlið við Ovara vøll. Byggimálsdeildin vísir á, at tey vilja mæla frá, at staðseta lonirnar á hesum stað og harvið taka 14 parkeringspláss, sum annars eru við til at nøkta tørvin til virksemið í Gundadali. Byggimálsdeildin vísir á, at tað í dag mangla uml. 100 parkeringspláss í mun til, hvat kravið ásetur, og mæla tey til, at onnur staðseting verður funnin.

Býarskipanardeildin hevur síðani hugt upp á økið í síni heild, og vísandi til at tað ikki er nógv pláss eftir at byggja á í Gundadali, so er tað ikki heilt líkatil at finna eina góða staðseting í mun til verandi virksemi hjá frítíðarskúlanum.
Staðsetingarnar, sum kundu verið møguligar eru:

- Økið norðan fyri Gundadalshøllina, millum Dansifrøði og Gundadalshøllina. Hetta økið er møguligt at byggja á, men krevst nakað av jørðarbeiði, fyri at byggingin kann lata seg gera. Staðsetingin er tó nakað langt burtur frá verandi virksemi og spælimøguleikum við Batmintonhøllina. Tað kann eisini hugsast, at virksemið ikki sær hesa staðsetingina, sum ein møguleika í mun til at reka virksemið á frítíðarskúlanum.
- Økið millum HB-húsið og B36-húsið. Hetta økið er óbygt, og verður ikki brúkt til tað stóra virksemið í dag, og tískil er møguligt at seta nakrar lonir á økið. Mett verður, at frástøðan til verandi frítíðarskúla ei heldur eigur at vera ein trupulleiki, tá frástøðan ikki er meir enn tað sama. Hugsast kann eisini, at henda staðsetingin upp á sigt kundi rúma einum framtíðar frítíðarskúla og klubbvirksemi fyri ung.

Serliga grundað á, at fyrra staðsetingin við Gundadalshøllina er so langt burtur frá verandi virksemi, so verður mælt til, at staðseta lonirnar við Ovara vøll, millum HB- og B36-húsið.

Tað er við sera stuttum skotbrái, at henda staðsetingin skuldi finnast, so møguleikarnir at hoyra B&U, sum varðar av frítíðarskúlanum, og grannarnar báðar, fótbóltsfeløgini HB og B36, hava ikki verið til staðar.

Tað er sera týdningarmikið, tá talan er um fyribils lonir/skúrar, at tað tá verður "fyribils", og ikki nakrar lonir, sum enda við at gerast varandi loysn fyri virksemið. Kommunan eigur alt fyri eitt at arbeiða fram ímóti eini endaligari varandi loysn fyri frítíðarskúlan, soleiðis at virksemið fær nøktandi karmar at virka undir, og soleiðis at økið ikki kemur at framstanda við fyribils loysnum og bygningsformum, sum ikki taka hædd fyri verandi bygging í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at staðseta fyribils lonirnar/skúrarnar við Ovara vøll, í óbygda økið millum HB-húsið og B36-húsið, og at málið verður beint í mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. mai 2025:** Samtykt, at staðsetingin verður sambært tekning *jnr. 25/03407-10 Støðumynd – Staðseting á økinum hjá frítíðarskúlanum*, og at beina málið í Mentamálanevndina.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtykt nr. 80/25 frá 5. mai 2025 í Byggi- og býarskipanarnevndini um staðseting til fyribils lonir.

Hetta mál snýr seg um at seta fyribils lonir upp við Badmintonhøllina, tí talan er um bráðfeingis tørv á hølum í samband við at ein eyka 1. flokkur verður tikin upp í Sankta Frans skúla eftir summarferiuna. Forskúlin í Sankta Frans heldur til í einari lon sum er staðsett í skúlagarðinum. Frítíðarskúlin deilir lonina við forskúlan. Hølisumstøðurnar í Sankta Frans eru ikki nøktandi, tí verður ikki mett, at tað ber til at staðseta ein frítíðarskúlaskúla í skúlanum. Tí verður mælt til at gera eina fyribils loysn við lonum við Badmintonhøllina, so børnini í 1. og 2. flokkum eru á sama matrikli.

Mentanmánanevndin hevur á fundi 12/3 samtykt at heita á Byggi- og býarskipanarnevndina í mál nr. 25/03406 um at finna eina varandi staðseting til ein nýggjar frítíðarskúla til næmingar í 0.-2. flokk í Sankta Frans skúla.

**Fígging**:
Kostnaðarmetingin fyri verkætlanina er 5,5 mió. kr.

Øll játtanin á fíggjarætlanini 2025 til at dagføra Hoyvíkar skúla verður ikki brúkt í ár. Umsiting mælir til at 5,5 mió. kr. verða fluttar av løgukonto 4175 LK41013 “Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring” og til eina nýggja løgukonto sum er til verkætlanina at seta fyribils lonir við Frítíðarskúlan í Badmintonhøllini.

Í komandi fíggjarætlan verður tí neyðugt at játta hesa upphædd til løgukonto 4175 fyri at verkætlanin at dagføra Hoyvíkar skúla kann halda fram ótarnað.

**Tíðarætlan**:
Umsitingin kunnar nevndina við eini tíðarætlan á næst komandi fundi.

Neyðugt verður leingja leigumálið við B36 til 1. og 2. flokk inntil fyribils lonirnar eru klárar at taka í nýtslu. Á §3 er játtað fígging til leigu av B36 húsinum fyri alt 2025, so neyðugt verður ikki við hægri játtan fyri restina av 2025, um partarnir leingja verandi leigusáttmála

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

| | Býráðsfundur<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 252<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 4175 | LK41013 | Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring | 3175 | | | Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini -bráðfeingis hølir | 5.5 mió |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina mæla til:

- At 5,5 mió. kr. verða fluttar av løgukonto 4175 LK41013 "Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring" til eina nýggja løgukonto "Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini - bráðfeingis hølir"
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir.
- At nevndin gevur umsitingin heimild til at samráðast við B36 um at leingja leigusáttmálan inntil fyribils lonirnar eru klárar at taka í nýtslu.

**Mentamálanevndin 07. mai 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 14. mai 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Høgni Vilhelmsen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum frá mentamálanevndini og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður ímóti, vísandi til at peningurin verður tikin av játtanini til Hoyvíkar skúla.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein og Kári Johansen, atkvøddu fyri at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøddi ímóti, og ongin atkvøddi blankt.

Málið var samtykt við 12 atvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og ongari blankari.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir, Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann, atkvøddu fyri at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøddi ímóti, og ongin atkvøddi blankt.

Málið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og ongari blankari.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt við málinum, og millum annað kannað prísir á modulum frá donskum og norskum veitarum við flutningi. Harafturat er mett um kostnaðin av jørð- betong og kloakkarbeiði, umframt kostnaðin av nýggjum innbúgvi.

Í løtuni verður mett at verkætlanin tørvar játtan á í minsta lagið 6,0 mió. Hetta er 0,5 mió. meira enn áður samtykt.

Á fundinum verður kunnað um samlaðu kostnaðarmetingina, íroknað tilboð og tekningar frá norska veitaranum Moelven

Mælt verður til at geva umsitingini heimild at gera sáttmála við Moelven og at arbeiða víðari við at fáa bindandi tilboð uppá jørð- kloakk- betong- og uppsetan av modulum.

Komið verður aftur í nevndina við umbøn um meirjáttan, tá tilboðini eru komin inn.

**Mentamálanevndin 05. november 2025:** Samtykt at geva umsitingini heimild at gera sáttmála við Moelven og at arbeiða víðari við at fáa bindandi tilboð uppá jørð- kloakk- betong- og uppsetan av modulum og at koma aftur í nevnd, tá endaligu tilboðini eru komin inn.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt víðari við málinum og vísir tað seg at at tørvur er á eini meirjáttan áljóðandi 1.448.561,00 v/6,25% mvg, orsøkin er :

Mynduleikakrav til orkurammuna.
Í samband við byggiloyvi, varð søkt um frávik til orkurammuna, tí talan er um fyribils loyvi í 5 ár. Byggi- og býarskipanarnevndin gekk ikki umsóknini á møti um frávik til orkurammuna.
At skifta hitaskipanina til eina luft til vatn skipan sum heldur orkurammuna hevur ein meirkostna við sær á kr. 269.875,00 v/6,25%mvg

Projektbroytingar:
Projektbroytingar eru gjørdar í mun til BK 17 so sum brunakrøv, vindlast. Eisini er eru tilfarsbroytingar gjørdar sum eru meira hóskandi til føroyska veðurlagi.
Biðið hevur verið um eftirlit og byggiharragóðkenning á freimleiðslustaðnum áðrenn avhending av modulunum.
Umsitingin hevur verið á fundi við Moelven og vitja framleiðslustaði.
Tilsamans hava projektbroytingar, eftirlit og fundur á freimleiðslustaðnum ein meirkostna við sær á kr. 423.018,00 v/6,25% mvg

Jørðarbeiðið við uppsetan av modulum:
Jørðarbeiði við uppsetan av modulum varð mett at kosta kr. 1.332.375,00 v/6,25%mvg. Jørðarbeiði er síðan boðið út til 3 fyritøkur.

| | Býráðsfundur<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 254<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

Innkomin tilboð eru:
- Sp/f Valaverk, kr. 2.326.431
- Sp/f ÁTS, kr. 1.965.217
- Sp/f HVT ynskti ikki at bjóða

Munur á meting og lægsta tilboð er kr. 755.668,00 v/6,25%mvg.

Mælt verður til at taka av tilboðnum frá Sp/f ÁTS

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 3175 | LK31021 | Dagstovna, frítíðarskúla og ungdómstilboð | 3175 | L31021 | Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini -bráðfeingis hølir | | 1.000.000 |
| 3175 | LK31020 | Tillagingar á dagstovnaøkinum | 3175 | L31021 | Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini -bráðfeingis hølir | | 450.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin mælir til:
- At 1 mio verða fluttar av løgukarmi 3175 LK31021 “Dagstovna, frítíðarskúla og ungdómstilboð“ til løgukonto 3175 L31021 “Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini-bráfeingishølir“
- At 450.000 verða fluttar av løgukarmi 3175 LK31020 “Tillagingar á dagstovnaøkinum“ til løgukonto 3175 L31021 “Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini-bráfeingishølir“.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
- At taka av tilboðnum frá Sp/f ÁTS áljóðandi 1.965.217,00 og geva umsitingini heimild at gera sáttmála við Sp/f ÁTS

**Mentamálanevndin 16. mars 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2026:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við elluvu atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Elin Heðinsdóttir Joensen, Guttormur í Skála, Birgir Nielsen Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen.

# 78/26 Bústaðarbygging í Norðreki í Kollafirði, matr. nr. 313a - 23/02421

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.11.2025 | 157/25 | 25/03549-3 |
| 2 Tekniska nevnd | 03.11.2025 | 67/25 | 25/03549-3 |
| 3 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 261/25 | 25/03549-3 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 21.11.2025 | 188/25 | 25/03549-3 |
| 5 Tekniska nevnd | 24.11.2025 | 90/25 | 25/03549-3 |
| 6 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 273/25 | 25/03549-3 |
| 7 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 78/26 | 25/03549-3 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til upprunaligu málslýsingina fyri mál nr. 23/02421, Framtíðar byggilendi í Kollafirði, sí j. nr. *25/03549-2, Upprunalig málslýsing_mál nr. 23/02421_Framtíðar byggilendi í Kollafirði*.

Málið byrjaði upprunaliga við, at borgarar vístu sína ónøgd við, at bygdin manglaði bústaðir, og at ung fólk ikki høvdu møguleika fyri at seta búgv í bygdini.

**Lýsing av málinum**
Í tilgongdini hevur verið arbeitt við at samráðast við Búnaðarstovuna og festara um lendi í Norðreki, matr. nr. 313a.

Avtalað varð í desember 2023 gjørd við festaran Gunvør Dam Jensen um lendi, og er eitt krav í avtaluni, at kommunan endurrindaði fyri seyðahúsið á matrikklinum. Fleiri mátar eru at náa hesum kravinum, men av tí at tað ikki hevur verið púra greitt, hvar atkoman til økið skal verða, so er eingin endaliga avgerð tikin um júst hetta kravið. Tað verður ikki mett ráðiligt at endurrinda seyðahúsið, fyrr enn tað er heilt vist, hvussu atkoman til lendið verður og farið verður undir at planleggja ítøkiligu byggingina.

So statt hevur tað verið týdningarmikið fyri umsitingina at fáa neyðugu atkomuna til lendið. Samráðingar hava verið við eigararnar av matr. nr. 159, 80a um møguliga atkomu til økið. Sí skjal nr. *25/03549-4, Uppskot til atkomuveg*, har tvær vegaloysnir verða vístar. Umsitingin mælti til vegaloysn A umvegis bæði matr. nr. 159 og 80a. Eigararnir av matr. nr. 159 og 80a vóru hvørki glaðir fyri loysn A ella B, men vístu á møguleikan, at vegurin varð fluttur út til ánna á matr. nr. 107a.
Víst verður til mál nr. *25/05672 Keyp av lendi til veg til ætlaða útstykking við Sjógv í Kollafirði - matr. nr. 158, 80b, 159, 80a og 80c, Kollafirði*, har fundir hava verið við eigararnar um atkomuviðurskiftini.

Síðani fundir við eigararnar áðrenn summarferiuna, hevur málið ligið stilt, og fyri at koma víðari við eini loysn, varð málið um vegaloysn lagt fyri ferðslunevndina, sí mál nr. *25/06681 Atkomuvegur til útstykkingina við Sjógv á matr. nr. 313a, Kollafjørður.*
Ferðslunevndin er samd um, at allir tríggir møguleikar kunnu nýtast, men at loysn A gjøgnum matr.nr. 80c, Kollafirði, er ferðsluliga best hóskandi.
So statt verður málið lagt fyri Byggi- og býarskipanarnevndina og Teknisku nevnd til endaliga støðutakan um atkomuvegin til matr. nr. 313a, Kollafirði.

Tá endalig avgerð fyriliggur viðv. atkomuvegnum, verður neyðugt at fáa viðurskiftini formliga upp á pláss, og helst skal vegurin somuleiðis gerast. Tá hetta er avklárað er klárt at fara undir útbjóðing av lendinum til bústaðarbygging.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*25/05672 Keyp av lendi til veg til ætlaða útstykkking við Sjógv í Kollafirði - matr. nr. 158, 80b, 159, 80a og 80c, Kollafirði*
*25/06681 Atkomuvegur til útstykkingina við Sjógv á matr. nr. 313a, Kollafjørður*

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**
*25/03549-2, Upprunalig málslýsing_mál nr. 23/02421_Framtíðar byggilendi í Kollafirði*
*25/03549-4, Uppskot til atkomuveg*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Enn eru fíggjarligu avleiðingarnar av hesum málinum ikki kendar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at staðfesta vegaloysn A sum atkomuveg til matr. nr. 313a, og at heimila umsitingini at fara undir formligu viðurskiftini fyri at fáa vegaloysnina avgreidda við avvarðandi partar,
Og tá atkomuviðurskiftini eru avgreidd:
- at skipanin av økinum verður boðin út til ráðgeva at koma við boð upp á eina alternativa bústaðarbygging í økinum, og at skipanin hereftir verður boðin út til arbeiðstakara at gjøgnumføra.
- at endalig avtala við festaran um seyðahúsið verður avgreidd.
- at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. november 2025:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Birgir Nielsen, treytað av at hetta verður boðið út alment.

Kári Johansen, tekur undir við tilmælinum, treytað av at hetta verður boðið út í kommununi.

Bergur Robert Dam Jensen tekur undir við tilmælinum, treytað av at viðurskifti í avtaluni við festaran fáa fyrstu raðfesting.

**Tekniska nevnd 03. november 2025:** Anja Weyhe tekur undir við tilmælinum.

Bergur Robert Dam Jensen tekur undir við tilmælinum, treytað av at viðurskifti í avtaluni við festaran fáa fyrstu raðfesting.

Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, tekur undir við tilmælinum, treytað av at hetta verður boðið út til arbeiðstakarar í Tórshavnar kommunu.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. november 2025:**
Annfinn Brekkstein skjeyt upp at beina málið aftur í nevnd. Tað varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, ongum atkvøðum ímóti og ongum blonkum atkvøðum.

**Atkvøddu fyri:** Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Guttorm í Skála, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen, Annfinn Brekkstein og Kári Johansen.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í allari viðgerðini av málinum.

Bergur Robert Dam Jensen luttók ikki í viðgerðini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Kári Johansen tekur ikki undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 24. november 2025:** Ein meiriluti, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Heðin Mortensen, tekur undir við tilmælinum.

Birgir Nielsen tekur undir við tilmælinum, men hevði ynskt, at endalig avtala fekst við festaran áðrenn.

Bergur Robert Dam Jensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Málið beint aftur í nevnd.

# 79/26 Íverksetan av rakstrarstovninum Lendis- og kirkjugarðstænastan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.11.2025 | 156/25 | 25/09430-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 03.11.2025 | 69/25 | 25/09430-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.02.2026 | 36/26 | 25/09430-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.02.2026 | 18/26 | 25/09430-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 27/26 | 25/09430-1 |
| 6 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 39/26 | 25/09430-1 |
| 7 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 79/26 | 25/09430-1 |

**Upprunin til málið**
Hetta er eitt kunningarmál í sambandi við íverksetan av rakstrarstovninum Lendis- og kirkjugarðstænastan.

Fleiri bygnaðarbroytingar eru seinastu árini gjørdar á Teknisku fyrisiting, ið hava havt til endamáls at fáa eitt greiðari og logiskari uppgávubýti millum ráðlegging og rakstur. Í hesum sambandi eru m.a. rakstrarstovnar settir á stovn undir Teknisku deild og Bygningsdeildini.

Eftir er at samla tær smáu eindirnar, ið hava við grøn økir/lendi at gera – og sum í dag liggja hvør sær undir Býarskipanardeildini – í ein "grønan rakstrarstovn", sum eftir ætlan kemur at eita, Lendis- og Kirkjugarðstænastan.

Talan er um *Kirkjugarðar* og *Lendisdeildina*, sum í løtuni vísa til Býarskipanardeildina, og *moldgoymsluna* í Húsahaga, sum í dag liggur undir Brennistøðini.
Mælt verður til, at  savna eindirnar undir einum nýggjum stovni, sum skal vísa til Býarskipanardeildina.

**Lýsing av málinum**
Eindirnar, sum takast við grøn økir/lendi í kommununi eru lítlar og spjaddar. Fyri at styrkja virksemið bæði á lendisliðnum og í kirkjugørðunum, verður mælt til at savna eindirnar í ein grønan rakstrarstovn við einum stovnsleiðara undir Býarskipanardeildini. Mælt verður til, at verandi leiðari fyri Kirkjugarðar verður stovnsleiðari vísandi til býararkitektin.

Í kommununi eru 13 kirkjugarðar, og har starvast 5 arbeiðsmenn umframt leiðaran. Ávísar uppgávur hjá kirkjugørðunum eru í dag útveittar, og samstarv er við lokal verkafólk í bygdunum. Umframt gravaravirksemi eru uppgávurnar hjá Kirkjugørðum eisini at føra m.a. kirkjugarðsprotokoll, samskifti við avvarandi í.s.v. jarðarferðir, líkbilstænasta, umframt urtagarðsvirksemi í sambandi við røkt av kirkjugørðunum.

Lendisliðið er í løtuni undir Býarskipanardeildini, og hevur ein arbeiðsforkvinna, býargartnarin, ábyrgdina av 2 starvsfólkum. Lendisliðið stendur fyri fríðkan av kommununi, men grundað á sera avmarkað starvsfólkatilfeingi, so verður størsti parturin av grønu røktini útveittur. Virksemið var fyri kortum undir Rakstrarstovninum á Oyggjarvegnum, men mett varð ikki, at henda uppgávan hóskar væl saman við kjarnuuppgávuni hjá Rakstrarstovninum, men heldur liggur meiri náttúrliga í nýggja rakstrarstovninum "Lendis- og kirkjugarðstænastan".

Síðani kommunan er farin í samstarv við IRF um nýtt tyrvingarpláss í Kvívíkshaganum, er bara moldgoymslan eftir í Húsahaga. Tað er ikki longur náttúrligt, at hetta virksemið liggur undir Brennistøðini, og mælt verður tí til, at tey 3 starvsfólkini, ið eru knýtt at avgrevstrarplássinum í Húsahaga, verða flutt undir grøna rakstrarstovnin, og at verandi virksemið verður skipað av nýggjum.

Íverksetanin av Lendis- og kirkjugarðstænastuni er enn í byrjanarfasuni, har býararkitekturin, leiðarin á kirkjugarðinum og umboð frá Starvsfólkadeildini hava havt fundir við ymisku eindirnar. Í november verður farið undir at skipa og fáa neyðug formlig viðurskiftir upp á pláss, soleiðis at ítøkiliga íverksetanin saman við starvsfólkunum verður sett á breddan fyrst í komandi ár.

Starvsfólkini tóku sera positivt ímóti ætlanunum, og eru spent upp á at fáa skipað rakstrarstovnin, soleiðis at tey í størri mun kunnu samstarva tvørtur um eindirnar, umframt at tey sóu fyrimunir fyri starvsfólkatrivnaðin.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Enn er eingin støða tikin til, hvussu stovnurin skal samstarva ella hvar stovnurin fer at halda til. Men hugsast kann, at virksemið verður savnað í Kirkjugarðinum við Velbastaðvegin, har bygningur við møguligum umbyggingum kann fevna um skrivstovuhentleikar, matarhøli/fundarhøli, har pláss er fyri øllum starvsfólkunum, og garasju/verkstaði.

Øll hesi viðurskiftini verða at greina í komandi tilgongdini.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☒**
-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei
Fíggjarligu avleiðingarnar av at seta Lendis- og kirkjugarðstænastuna á stovn eru avmarkaðar, tí at verandi flokking av leiðaranum eisini rúmar tað víðkaða arbeiðsøkið, ið hann framyvir hevur ábyrgdina av.

Fyri hini fær bygnaðarbroytingin einans ta ávirkan, at tey framyvir hoyra til nýggja rakstrarstovnin – setanartreytir og arbeiðsuppgávur annars verða ikki ávirkaðar.

Um neyðugt verður at gera ávísar broytingar í hølisviðurskiftunum, verður mælt til, at játtan tá verður funnin til hetta.

**Tilmæli:**

Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. november 2025:** Kunnað varð um málið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 03. november 2025:** Kunnað varð um málið.

Annfinn Brekkstein tekur ikki undir málinum.

**Ískoyti**
Arbeiði við at leggja Kirkjugarðarnar, Lendisliðið og Moldgoymsluna saman í nýggja rakstrarstovnin Lendis- og kirkjugarðatænastan er komið væl áleiðis. Starvsfólkini í hesum trimum eindum eru nú partur av nýggja rakstrarstovninum, sum vísir til Býarskipanardeildina. Fyrrverandi leiðari á Kirkjugørðunum er nú dagligur leiðari á nýggja rakstrarstovninum. Nú restar bert í, at fíggjarligu viðurskiftini í sambandi við hesa umskipan verða endaliga avgreidd.

Tá tað kemur til fíggjarliga partin, so er lætt at leggja Kirkjugarðarnar og Lendisliðið undir felags fíggjarliga leiðslu, tá hesir stovnar báðir liggja undir grein 6 í fíggjarætlanini. Skotið verður upp, at leiðarin fyri nýggja stovnin fær neyðugu fíggjarligu heimildirnar til konto 6112, Fríðkan og viðlíkahald – Lendisliðið.

Eitt sindur meira krevst í sambandi við at Moldplássið skal flytast frá Kommunalu brennistøðini til nýggja stovnin. Av tí at Brennistøðin liggur á grein 7 í fíggjarætlanini, meðan nýggi stovnurin liggur á grein 6, er sambært játtanarreglunum neyðugt, at fíggjarliga millumrokningin millum stovnarnar verður viðgjørd sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir í býráðnum.

Niðanfyri sæst ein talva ið lýsir raksturin av Moldplássinum. Tølini fyri 2026 eru metingar (m) har bæði inntøkur og útreiðslur vaksa við 3 prosentum.

**Fíggjarlig greining av Moldplássinum**

| **Útreiðslur** | **2025** | **2026(m)** | **2-3-4. ársf. 2026(m)** |
|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur | 1.299.706 | 1.338.697 | 1.004.023 |
| Maskinur | 1.029.488 | 1.060.373 | 795.279 |
| Brennievni | 193.000 | 198.790 | 149.093 |
| Internet, telefon, kamera o.a. | 100.000 | 103.000 | 77.250 |
| El | 50.000 | 51.500 | 38.625 |
| **Tilsamans** | **2.672.194** | **2.752.360** | **2.064.270** |

| **Inntøkur** | **2025** | **2026(m)** | **2-3-4. ársf. 2026(m)** |
|---|---|---|---|
| Móttóka av tilfari (tyrving) | 1.559.546 | 1.606.332 | 1.204.749 |
| Søla av mold | 36.000 | 37.080 | 27.810 |
| **Tilsamans** | **1.595.546** | **1.643.412** | **1.232.559** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Munur** | **1.076.648** | **1.108.947** | **831.711** |

Ætlanin er, at fíggjarligu viðurskiftini verða endaliga avgreidd í 1. ársfjórðingi 2026, soleiðis at Brennistøðin er endaliga leys av Moldplássinum í seinasta lagi 31. mars 2026.

Sambært talvuni omanfyri er neyðugt at flyta 831.711 kr. frá Brennistøðini til nýggja stovnin. Játtanin hjá Brennistøðini verður sum úrslit minkað við hesi upphædd í 2026 og við umleið. 1,1 mió. kr í 2027.

Tað verður sostatt konto 6212 Fríðkan og viðlíkahald, Lendisliðið sum kemur at yvirtaka allar útreiðslur og inntøkur sum í dag hoyra Moldplássinum til.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 7110 | | Renovatión | 6212 | | Fríðkan og viðlíkahald, Lendisliðið | | 831.711 |

**Tilmæli**
Tekniski stjóri, leiðarin á býarskipanardeildini og leiðarin á náttúru- og umhvørvisdeildini mæla til, at:
- Kr. 831.711 verða fluttar av rakstrarkonto 7110 Renovatión, á rakstrarkonto 6212, Fríðkan og viðlíkahald, Lendisliðið.
- At málið verður beint í býráðið til tvær viðgerðir umvegis byggi- og býarskipanarnevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. februar 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Heidi á Lava Elgeirsdóttir, Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Kári Johansen atkvøður blankt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. februar 2026:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Annita á Fríðriksmørk, tekur undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein og Kári Johansen taka ikki undir við málinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við uppskotinum við tí broyting, at tann milliónin sum varð játtað brennistøðini í 2025 til ger av nýggjum skúri á moldplássinum, eisini verður flutt á rakstrarkonto 6212, Fríðkan og viðlíkahald, Lendisliðið. Sostatt skulu kr. 1.831.711 flytast av rakstrarkonto 7110 Renovatión á rakstrarkonto 6212 Fríðkan og viðlíkahald, Lendisliðið. Málið verður beint í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot um at fáa óhefta kanning av fíggjarstøðuni síðstu árini í kirkjugarðinum.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við seks atkvøðum fyri, sjey atkvøðum ímóti og ongari

blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen, Annfinn Brekkstein og Bergur Robert Dam Jensen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Blankt atkvøddi: Eingin.

Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, og Annfinn Brekkstein.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Atkvøtt varð við aðru viðgerð, og varð málið samtykt við tíggju atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Eingin.

| | **Býráðsfundur**<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 264 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

## 80/26 Frítíðarhús í Hesti – matr. nr. 101 og 10a - 22/00328

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Hest/Koltursnevndin | 24.09.2025 | 2/25 | 25/08370-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.11.2025 | 161/25 | 25/08370-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 245/25 | 25/08370-1 |
| 4 Hest/Koltursnevndin | 20.05.2026 | 3/26 | 25/08370-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.03.2026 | 65/26 | 25/08370-1 |
| 6 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 80/26 | 25/08370-1 |

**Upprunin til málið**
Sí uppruna málslýsing fyri mál nr. 22/00328, j.nr. 25/08370-2, *Uppruna málslýsing_Frítíðarhús í Hesti - matr. nr. 101 og 10a_22_00328*.

**Lýsing av málinum**
Økini matr. nr. 101 og 10a, Hestur vórðu bæði boðin út til bygging av frítíðarhúsum. Tá freistin var farin 16. januar 2023, vóru eingi tilboð innkomin.

Málið varð lagt fyri avvarðandi nevndir aftur á heysti 2023, tá varð samtykt:
- At bjóða norðara økið út í smærri grundstykkjum
- At bjóða økið á havnaøkinum út eina ferð afturat eftir sama leisti sum áður
- At økini verða bjóðað út sum vetrarhús (og ikki einans sum summarhús)

Býarskipanardeildin metti nakað eftir samtyktina á heysti 2023 saman við avvarðandi stjóra, at bíða við at bjóða økið út, grundað á aðrar útbjóðingar um sama tíðarskeið. Tað vísti seg vera nakað trupult at fáa íleggjarar at bjóða, og tí varð hendan samtyktin ongantíð framd.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn galdandi.
Almenna byggisamtyktin fyri Hest

**Upplýsingar frá umsitingini**
Grundað á manglandi tilfeingi á deildini, so verður mett, at ein útbjóðing av økjunum kann fremjast seinni í vetur ella fyrst í komandi ár.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
22/00328, Fríðtíðarhús í Hesti – matr. nr. 101 og 10a

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
- Málið hevur í núverandi støðu ikki verið til viðmerkingar hjá øðrum deildum.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd   Ja ☒   Nei ☐**

**Skjøl**
j.nr. 25/08370-2, *Uppruna málslýsing_Frítíðarhús í Hesti - matr. nr. 101 og 10a_22_00328*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at staðbundna nevndin umrøður málið við tí endamálið at meta um hvørt tað er ráðiligt at bjóða økini út til frítíðarhús av nýggjum.

**Hest/Koltursnevndin 24. september 2025:** Staðbundna nevndin metir at tað er ráðiligt at tað verður bjóðað út av nýggjum. Ráðiligt er eisini at gjørt ein bíðilista, kanna um tað kann verða heilárshús, og tillaga útbjóðingarháttin.

**Ískoyti:**
Víst verður til ískoytið omanfyri og samtyktina í staðbundnu nevndini, sum metir, at tað er ráðiligt, at tað verður bjóðað út av nýggjum. Somuleiðis sigur samtyktin, at tað er ráðiligt at gjørt ein bíðilista, kanna um tað kann verða heilárshús, og tillaga útbjóðingarháttin.

Umsitingin kann fara undir at bjóða økini út av nýggjum, men mælir til at Byggi- og býarskipanarnevndin umrøður málið við atliti at samtyktini í staðbundnu nevndini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til:
- At bjóða økið við Kvíggjarveg *matr. nr. 101* út í smærri grundstykkjum
- At bjóða økið á havnarøkinum *matr. nr. 10a* út eina ferð afturat eftir sama leisti sum áður
- At økini verða bjóðað út sum vetrarhús (og ikki einans sum summarhús)
  At málið verður beint í býráðið

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Býráðið samtykti 20. november 2025:
- At bjóða økið við Kvíggjarveg *matr. nr. 101* út í smærri grundstykkjum.
- At bjóða økið á havnarøkinum *matr. nr. 10a* út eina ferð afturat eftir sama leisti sum áður.
- At økini verða bjóðað út sum vetrarhús (og ikki einans sum summarhús).
- At málið verður beint í býráðið.

**Viðv. at bjóða matr. nr. 10a, út av nýggjum:**
Nýtt útbjóðingartilfar er gjørt, sí viðhefta skjal 25/08370-6 Útbjóðingartilfar Havnarlagið 2026, Útbjóðingarskriv. Ætlanin er at bjóða økið út skjótast gjørligt.
Tá tilboðini eru innkomin og mett, verður málið lagt aftur til endaliga politiska støðutakan umframt hjá avvarandi myndugleika til viðgerð.

Tilboð verða mett út frá einari samlaðari heildarmeting, har dentur verður lagdur á dygd, byggilist og samsvar við staðbundin viðurskifti.

Prísur fyri grundstykkið (samlaður keypsprísur uttan MVG) vektar 20 %
Heildarmeting av verkætlan vektar 80 %

Heildarmetingin (80 %) fevnir um arkitektoniska dygd, samsvar við visjón og staðbundin viðurskifti, skipan av fríøkjum og samlaða útinnan av verkætlanini.

Prísurin verður mettur út frá samlaða keypsprísinum fyri grundstykkið (uttan MVG). Hægsti bjóðaði prísur fær hægsta stigatal, og onnur tilboð verða stigsett lutfalsliga í mun til hægsta prís.

**Viðv. at bjóða matr. nr. 101 út í smærri grundstykkir:**
Áðrenn nýtt útbjóðingartilfar verður gjørt, er neyðugt at nágreina ávís viðurskiftir.

<u>Broyting av byggisamtykt</u>
Økið er í dag sambært galdandi byggisamtykt ætlað til frítíðarhús. Fyri at bygging av vetrarhúsum (heilársbústøðum) kann fremjast, skal byggisamtyktin broytast, so økið verður heimilað til heilársbúseting.

<u>Útstykkingarætlan</u>
Somuleiðis skal ein útstykkingarætlan fyri økið gerast, sum grundarlag fyri sundurbýti av matriklinum í smærri grundstykkir. Útstykkingarætlanin er eitt tekniskt prosjekt, sum skal tryggja, at økið kann nýtast til bústaðarnýtslu á ein skipaðan og haldføran hátt.
Málið má viðgerast saman við Teknisku deild.

Ein útstykkingarætlan / eitt tekniskt prosjekt fevnir vanliga um m.a.:

- <u>Kloakkplan</u> – Lýsing av kloakkering, spillivatni og yvirflatuvatni, herundir binding í verandi kloakknet ella onnur loysn, um viðkomandi.
- <u>Vatnveiting –</u> Atkoma til drekkivatn og binding í vatnveiting.
- <u>Vegir og atkoma</u> – Lýsing av atkomuvegum til økið, innanhýsis vegum, vendiplássum, gongubreytum og ferðslutrygd.
- <u>Parkering</u> – Skipan av parkeringsmøguleikum sambært galdandi krøvum.
- <u>Streymur og ljós</u> – Elveiting til grundstykkini, herundir staðseting av elskápum og almennari ljósseting.
- <u>Tele og tøkni</u> – Møguleikar fyri tele-, internet- og tøkniíbinding.
- <u>Fríøki og grønar loysnir</u> – Skipan av fríøkjum, felagsøkjum og grønum økjum, um viðkomandi.
- <u>Trygd og atlit til lendið</u> – Atlit til lendisviðurskifti, avvatning, sjónlig atlit og umhvørvi.

Útstykkingarætlanin skal góðkennast av viðkomandi myndugleikum og er ein fortreyt fyri, at grundstykkini kunnu gerast og seljast.

Ráðgeving í sambandi við at skipa økið og gera eina útstykkingarætlan eigur at taka støði í 25/08370-7 Uppskot til útstykking_090821.pdf. Umsitingin mælir til, at uttanhýsis ráðgevi kemur at standa fyri gerð av útstykkingarætlanini í samstarvi við umsitingina (Býarskipanardeildina og Teknisku deild). Til hetta arbeiðið verður mett tørvur á kr. 200.000.

**Skjøl:**
25/08370-6 Útbjóðingartilfar Havnarlagið 2026
25/08370-7 Uppskot til útstykking_090821.pdf.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at heimila umsitingini:

- At bjóða matr. nr. 10a út av nýggjum, sambært útbjóðingartilfarinum, skjal nr. 25/08370-6 Útbjóðingartilfar Havnarlagið 2026.
- At kanna hvørt eftirspurningur er á smáum grundstykkjum til heilárshús í Hesti, áðrenn farið verður undir at skipa og gera útstykkingarætlan fyri matr. 101.
  At beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mars 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Einmælt samtykt.

# 81/26 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Kaldbaksnevndin | 17.03.2025 | 4/25 | 25/01096-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 21.11.2025 | 186/25 | 25/01096-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 286/25 | 25/01096-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.03.2026 | 64/26 | 25/01096-1 |
| 5 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 81/26 | 25/01096-1 |

**Upprunin til málið**
Í málinum Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar er samtykt at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi.

Fyri fleiri av bygdunum eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar, síðani tær eru blivnar partur av Tórshavnar kommunu, og tí er í nógvum førum ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Harumframt er munur á hvat loyvt verður í teimum ymisku bygdunum, og hetta ger byggisamtyktirnar fyri bygdirnar torskildar, truplar at umsita og viðførir ójavnvág í kommununi.

Í málinum Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar eru yvirskipaði viðurskifti viðgjørd við tí endamáli at fáa eins ásetingar í byggisamtyktunum fyri bygdirnar, tó við nøkrum frávikum, tá talan er um staðbundin viðurskifti, serstakan bygdadám og tílíkt.

Í hesum málinum verður byggisamtyktin fyri Kaldbak viðgjørd nærri, við støði í yvirskipaðu viðurskiftunum, sum eru viðgjørd í málinum Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar.

**Lýsing av málinum**
Í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar verður mælt til, at bygdirnar Kirkjubøur, Velbastaður, Nólsoy, Hvítanes, Kaldbak og Hestur fáa hvør sína almenna byggisamtykt.

Mett verður ikki, at byggisamtyktirnar fyri bygdirnar skulu hava líka nógv ymisk øki, sum almenna byggisamtyktin hevur, av tí at talan er um minni bygdir, har ikki ber til at regulera virksemið eins neyvt og í høvuðsstaðnum. Tí eru tær ymisku ásetingarnar fyri allar bygdirnar samanbornar, og funnið er fram til nakrar felags ásetingar, ið hóska til allar bygdirnar.

Áðrenn endurskoðanina av byggisamtyktini fyri Kaldbak, eru hesi ymisku økini í bygdini:

- A: Sethúsabygging
- B: Almenn endamál
- C: Havnar – og vinnuendamál
- D: Miðstaðarøki

Niðanfyri eru ásetingarnar í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak, sum sambært uppskotinum eru tær somu fyri allar bygdirnar:

- A: Bústaðarøki
- B1: Havnarøki
- B2: Vinnuøki
- C: Miðstaðabygging
- D1: Frílendi
- D2: Almennir stovnar og mentan
- E: Neyst
- F: Frítíðarhús

G: Bóndahús
4. gr.: Landbúnaður

Sum sæst, so eru tað fleiri øki í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak, enn tað eru áðrenn endurskoðanina.

Umframt tey økini, sum vóru áðrenn endurskoðanina, so eru D1: Frlendi, E: Neyst, F: Frítíðarhús, G: Bóndahús og 4. grundumráði komin afturat. Økið til Havnar- og vinnuendamál er koyrt í hvør sítt øki.

Tær ávísu broytingarnar í økjum og ásetingum eru nærri lýstar í skjalinum Kaldbak ásetingar – áðrenn og eftir broyting, og ein meira yvirskipað lýsing er niðanfyri. Broytingar í kortunum eru at síggja í skjølunum Kort - áðrenn broyting og Kort - eftir broyting.

**Bústaðarøki**
Bústaðarøkini í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu loyva typologiunum stakhús, tvíhús, raðhús og íbúðir. Í bygdunum er ein meting gjørd av, hvør typologi skal loyvast í hvørjari bygd, gjørd út frá m.a. verandi bygging/ásetingum og bygdadámi.

Í Kaldbak verður mett ráðiligt at loyva stakhúsum og tvíhúsum. Kaldbak er ein minni bygd, og mett verður ikki, at íbúðarbygging og raðhúsabygging hóskar seg til dámin í bygdini.

Í sethúsaøkjum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er minsta grundstykkjavídd 500 m2. Í bygdunum verður yvirskipað mett, at grundstykkini kunnu vera minni, og í Kaldbak verður mett, at ein hóskandi minsta grundstykkjavídd er 400 $m^2$. Hetta m.a. grundað á verandi ásetingar fyri grundstykkjavídd í Kaldbak og verandi víddir á grundstykkjum í Kaldbak.

Ásetingar viðv. hædd, byggi- og nýtslustig vera tær somu sum fyri sethúsaøki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Miðstaðarøki**
Økið skal rúma virksemi sum t.d. stórir ella miðal stórir mentanarstovnar, samkomuhús og bygging til ferðavinnu. Tað er ikki vist, at øllum bygdum tørvar tílíkt øki, og í summum førum kann serloyvi gevast til smærri handlar, vinnuvirkir og stovnar í bústaðarøkjum, um hetta natúrliga hoyrir býlinginum til.

**Almenn øki**
Umframt øki til almennar stovnar og mentan, verður tað í bygdunum mett at vera skilagott við einum øki til frílendi, har ikki ber til at byggja.

**Neystaøki og øki til frítíðarhús**
Ynski hevur leingi verið um at loyva frítíðarbústøðum í neystum, og mett verður, at ásetingarnar fyri neystaøkini í bygdunum skulu vera soleiðis, at til ber at hava frítíðarbústað á loftinum. Tó skulu nakrar treytir vera, t.d. skulu kloakkir og aðrar leiðingar gjaldast av neystaeigarunum, og á niðastu hædd skal vera møguligt at hava bát.

Í bygdunum eiga somuleiðis at vera løgd av øki til frítíðarhús. Hesi eiga at liggja í útjaðaranum av bygdini, soleiðis at nærleiki er til almennar hentleikar, uttan at tey gera seg ov nógv inn á bygdalagið – í hesum sambandi eiga atlit, so sum støðd á øki, bygging, snið og tílíkt, at verða tikin. Á økjunum til frítíðarhús eigur ikki at vera møguligt at búgva alt árið, grundstykkini kunnu vera minni, og til ber at skipa tey annarleiðis enn vanlig bústaðarøki, við t.d. felags parkeringsplássum.

**Landbúnaðarøki**
Ásetingarnar fyri landbúnaðarøki verða tær somu sum fyri 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Í nøkrum av bygdunum var áðrenn endurskoðanina ein serskild áseting fyri øki til bóndahús. Hendan gav festarunum størri frælsi til at umvæla sethús síni, enn ásetingarnar fyri 4. grundumráði geva. Tí verður ynskt, at eitt øki, G: Bóndahús, verður í byggisamtyktunum fyri bygdirnar.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar,* journal nr. 20/04243.
- *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak,* journal nr. 22/04935

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak sambært skjølunum Kaldbak – endurskoðað 11.01.24 og Kort – eftir broyting og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kaldbaksnevndin 02. apríl 2024:** Kunnað var um málið.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:** Kunnað verður um, at byggisamtyktin er løgd til hoyringar.

**Kaldbaksnevndin 23. oktober 2024:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Kaldbaksnevndin hevur biðið um at fáa málið á skrá. Uppskot um nýggja almenna byggisamtykt fyri Kaldbak hevur ligið til almenna hoyring í tíðarskeiðnum 18. september til 30. oktober 2024. Kommunan hevur móttikið fleiri viðmerkingar. Hesar viðmerkingar verða viðgjørdar, og eitt tillagað uppskot verður síðani lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina, tá ið uppskotið er klárt.

**Kaldbaksnevndin 17. mars 2025:** Býararkitekturin greiddi frá, at málið hevur verið til hoyringar og nógvar viðmerkingar eru komnar. Málið verður lagt fyri í byggi- og býarskipanarnevndina til viðgerðar og viðgjørt eftir vanligu mannagongdini.

**Ískoyti:**
Í hoyringstíðarskeiðnum millum 18. september og 30. oktober 2024 móttók kommunan 9 viðmerkingar, sum vísa á ymsar vansar við uppskotinum og broytingaruppskot (sí skjal *25/01096-8 Viðmerkingar og brytingaruppskot*).

Grundleggjandi ósemja er, um økir í bygdini skulu leggjast afturat sum byggilendi ella varðveitast sum landbúnaðarjørð.

Búnaðarstovan mælir ítøkiliga til, at partar av matr. nr. 11a, 22a og 36a verður varðveitt sum landbúnaðarjørð ella verður broytt frá byggilendi til landbúnaðarjørð, eitt øki svarandi til omanfyri 12.500 $m^2$.

Ein borgari leggur somuleiðis dent á, at innleiðandi orðing frá galdandi byggisamtykt, skal varðveitast, har tað m.a. stendur *«Kaldbak er ein bóndabygd, og bøurin eigur í størst møguligan mun at varðveitast sum hann er. Tó hava bygdafólkini loyvi at byggja í sjálvari bygdini, men skal tá ansast eftir, at sum minst verður tikið av bønum, og at býlingsdámurin verður varðveittur.»*

Umboð frá kaldbaksnenvdini vísir hinvegin á fleiri økir, sum sambært broytingaruppskoti ikki eru væl egnað til landbúnaðarendamál, og tískil eiga at vera løgd afturat sum møguligt sethúsaøki. Á henda hátt kann bygdin mennast sambært siðbundnum byggimynstri. Bøur kann annaðhvørt varðveitast til landbúnað ella brúkast sum byggilendi, og er talan um ósambærilig endamál.

Umsitingin mælir til at gera eitt nýtt uppskot, sum í størri mun er varðveitandi, og er orsøkin til tilmæli, at bygdin á henda hátt varðveitir verandi dám í samsvari við søguligu menningina. Støða kann takast til at víðka byggilendið, eftir at ein bygdaætlan er gjørd fyri bygdina í samráð við staðbundnu nevndina og borgarar í bygdini.

Niðanfyri er ein samanumtøka og viðgerð av viðmerkingunum:

- ***Spískisteinur eigur at friðast***

Í tveimum mótmælum verður heitt á kommununa, at friða Spískastein, sum sambært uppskotinum verður innan fyri nýtt A øki (sethús).

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Umsitingin metir, at serlig eyðkennir í lendinum eiga at verða vird og varðveitt, har tað er møguligt, og fer at mæla til nýtt uppskot, har økið kring Spískastein framyvir ikki verður byggilendi.*

- ***Dvørgasteinur skal friðast***

Dvørgasteinur er í útnyrðingshorninum av D økinum (D2 økinum, sambært uppskotinum), sum er vestan fyri høllina og oman fyri kirkjuna.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Vísandi til viðmerking um Spískastein, verður uppskotið somuleiðis tillagað, soleiðis at Dvørgasteinur kemur at standa uttan fyri byggiøki.*

- ***Stykkið vestan fyri høllina og omanfyri Kirkjuna (partur av matr. 22a) skal friðast***

Í tveimum mótmælum verður víst á týdningin, at kirkjan frá 1834 sleppur at standa frítt. Sipað verður til løgtingslóg nr 19 frá 1948 um friðan av fornminnum, sum ásetur, at umliggjandi øki innan fyri 100 m frá friðaðum bygningum (kirkjuni) kann verða lagt undir friðing.

Búnaðarstovan mælir somuleiðis frá at byggja í hesum økinum, av tí at økið verður dyrkað og hevur landbúnaðarligan týdning.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Kirkjan stendur lutfalsliga frítt og er omanfyri 50 m frá nærmasta sethúsi. Verandi D byggiøki (sambært uppskotinum D2, ætlað almennum stovnum og mentan) er omanfyri Korssgøtu, beint yvir 20 m norðanfyri kirkjuna. Ongar ítøkiligar byggiætlanir fyrileggja, men hevur ætlanin verið at byggja frítíðarskúla í økinum omanfyri høllina.*

*Í viðmerking mælir umboð frá umsitingini vegna Børn og Ung til, at nýggjur stovnur verður bygdur til námsfrøðiliga virksemið, og at námsfrøðiliga er skilabest, um hølisviðurskiftini fyri barnagarð og frítíðarskúla vera atskilt.*

*Mælt verður til at broyta verandi D øki til miðstaðarbygging fyri part av matr. nr 22a til 4. grundumráði, í samsvari við varðveitandi grundhugsanina, og soleiðis at lendið kring kirkjuna verður verandi óbygt. Og mælt verður til at partur av matr.nr. 11a (við svingið niðan móti á Soylugørðum) verður varðveitt sum byggilendi til framtíðar stovn (D2), sum í upprunaliga uppskotinum.*

- **Matr nr. 34, á Soylugøðum 50, skal vera bústaðarøki (tvey mótmælir)**

Ætlanin er at høvuðsumvæla húsini, ið eru millum elstu sethús í Kaldbak, í uppruna stand. Eigarar vísa á, at tað er sera umráðandi, at húsini framvegis eru staðsett í sethúsaøki. Matrikkulin er omanfyri 26.000 m$^2$, og skotið er upp at gera eitt 500m$^2$ stórt bústaðarøki kring húsini.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar***
*Mælt verður til at ganga viðmerkingni á møti, og at tillaga uppskotið, tó soleiðis at 400m$^2$ bústaðarøki (A1) verður galdandi kring húsini. Hetta er minst loyvda grundstykkjavídd, sambært uppskotinum, og verður hetta mett ráðiligt, tá talan er um smá og eldri hús. Broytingin verður gjørd, til tess at lógliggera verandi bygging, men áleggur broytingin ikki kommununi at dagføra veg og annað infrakervi til ognina á Soylugørðum 50.*

- **Partur av matr. nr 36a skal ikki vera sethúsaøki**

Festari mótmælir, at byggilendi er ásett fyri part av matr. nr 36a. Grundgevingin er, at stykkið er gamalt og væl veltur slátturbøur, ið ber nógv gras og er grundarlag undir fóðrinum til mjólkarframleiðslu. Økið verður eisini nýtt sum atkomuvegur til restina av bønum tilhoyrandi garðin, og lagt verður afturat, at ábendingar eru um fornar toftir í bønum.

Búnaðarstovan frámælir somuleiðis, at bygt verður á hesum økinum.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar***
*Talan er um eitt galdandi bústaðarøki, sum í uppskotinum verður varðveitt sum sethúsaøki. Umsitingin er sinnað út frá nevndu grundgevingum at rætta uppskotið, soleiðis, at A økið verður broytt til 4. grundumráði.*

- **Mælt verður til at varðveita og virða orðing í innleiðandi tekstinum, um at Kaldbak er bóndabygd**

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar***
*Umsitingin mælir til, at orðingin, sum er frá upprunaligu byggisamtyktini, verður varðveitt í uppskotinum um endurskoðaða byggisamtykt fyri Kaldbak, undir innleiðandi brotinum «Endamál», tó við broyting, soleiðis at tað ikki verður skilt millum bygdafólk og aðrar borgarar í kommununi*

- **Mótmælt, at øki sett av til búnaðarbrúk, verður broytt til bústaðarøki.**

Mótmælið snýr seg sum heild um, at óbygd økir gerast til bústaðarøkir sambært uppskotinum, og at hetta er ódámligt at fremja, meðan bóndur bíða eftir, at landið fær lendið skrásett. Serliga verður víst á broytingina av parti av matr.nr. 10 og 8, har fjós, hoyggjhús og úthús eru broytt til bústaðir í uppskotinum, tí hetta forðar bóndaskapinum.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar***
*Umsitingin ger nýtt uppskot, har størri partur av lendinum á Kaldbak verður lagt av til landbúnaðarjørð, og er tað best, um lendið verður skrásett, so avgerðir um nýtslu av lendinum kunnu takast á hollum vitanargrundarlagi. Í mun til matr. nr 8 og 10 (býlingurin Við Á) er talan um býling við bústøðum og landbúnaði. Umsitingin metir, at tað hóskar seg at gera ein nýggjan umráðispart (A2), sum verður lagdur til stakhús og bygging í sambandi við djórahald og jarðarbrúk. Endamálið er at staðfesta, at í hesum býlinginum er hóskandi framhaldandi at fremja virksemið, sum hevur við landbúnað at gera. Ásetingar fyri nýggja A2 økispartin, sum einans verður galdandi í býlinginum Við Á, er soleiðis:*

§. Ásetingar fyri umráðispart A2
*1 Umráðisparturin verður lagdur til stakhús og bygging í sambandi við djórahald og jarðarbrúk*
*2 Sethúsini skulu lúka somu treytir, sum eru galdandi fyri umráðispart A1.*
*3 Bygging í samband við djórahald og jarðarbrúk skal lúka somu treytir, sum eru galdandi fyri*
*4. grundumráði.*

- **Broyta matr. nr 68 til neystaøki**

Mjólkargøta 14 (matr.nr. 68) er ein neystagrund, og hava eigarar fingið loyvi at byggja neyst, tá ið byggisamtyktin er endurskoðað. Sambært broytingaruppskotinum er økið tó lagt út sum økið í C, miðstaðarbygging v.m., og er ynskið tískil at broyta ásetingarnar fyri matr. nr 68 til øki E neystaøki.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Nýtt uppskot verður gjørt, har matr. nr. 68 er neystaøki, og metir umsitingin, at hesar ásetingarnar hóska seg til økið.*

- **Ivamál um matr. nr 86**

Bygningurin á matr. nr. 86 er ikki eitt neyst, og hevur ongantíð verið eitt neyst. Tó er bygningurin sambært uppskotinum endaður í øki E, neystaøki. Víst verður á, at henda nýtslan kann gerast ein avmarking.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Í løtuni er bygningurin í sama grundumráði sum neystini eystanfyri (C-Havna- og vinnuøki), og staðsetingin við fjøruna talar fyri eini áseting, ið loyvir virksemi, sum hevur við sjógv at gera. Mælt verður til at halda fast í byggisamtyktarbroytingini, og víst verður á, at byggisamtyktarbroytingin ikki er til hindurs fyri, at núverandi lóglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við lógligari nýtslu av eini ogn.*

- **Víðka neystaøkið vestanfyri Býggjarstøð**

Vestanfyri neystini á Barkhellu er eitt óbygt neystastykkið, sum ikki er tikið við í neystaøkið, sambært uppskotinum. Økið verður sambært eigara leigað frá Búnaðarstovuni, men er ikki frámatrikulerað, og hoyrir tí til matr.nr. 49a. Mælt verður til, at hetta økið verður tikið við í økispart E, neystaøki.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Neystaøkið fevnir um øki vestanfyri neystini á Barkhellu og part av matr.nr.49a. Tískil er ikki neyðugt at broyta uppskotið til tess at ganga ynskinum omanfyri á møti.*

- **Uppskot um staðseting av møguligari bygdalund**

Á tekning verður eitt økið leysliga markerað millum nýggju høllina og nýggju útstykkingina við vegnum á Kongsjørð. Sambært broytingaruppskotinum verður lendið sjáldan sligið, og er tað tí møguleiki at planta hetta økið við t.d. lægri trøum og runnum.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Í mun til byggisamtyktarbroytingar, er mest hóskandi ásetingin fyri eina møguliga bygdalund D1. Tað er torført at staðseta nágreiniligt mark millum bø og lund, áðrenn ein ítøkilig plantingarætlan og skipan av gøtum fyriliggur. Mælt verður til at varðveita økið í 4. grundumráði, men at staðfesta eina møguliga bygdalund í Kaldbak í byggisamtyktini og býarskipanini, tá ið ein ítøkilig verkætlan er komin longur ávegis.*

- **Tá bygt verður fram við vegnum niðan á Garðar, skal vera ávís frástøða frá húsum, garasjum o.ø.**

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Umsitingin mælir til, at viðkomandi økið, niðanfyri vegin Niðan á Garðar, í nýggjum uppskoti verður broytt frá sethúsaøki til 4. grundumráði. Tískil er fyribils ikki neyðugt at víðka veg ella áseta byggilinju.*

- **Fleiri økir eiga at leggjast afturat sum sethúsaøkir**

Víst verður á økir, sum sambært viðmerkingini ikki vera brúkt av bóndrum, og sum eru væl egnað til bústaðarendamál. Økini sum víst verður á, eru í leingjan av verandi býlingum í gomlu bygdini, og tískil verður hildið uppá tað gamla siðbundna byggimynstrið.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
Vísandi til varðveitandi útgangstøðið í nýggjum uppskoti mælir umsitingin frá, at staðseta nýggj sethúsaøkir á bøi, áðrenn nýggj bygdaætlan staðfestir, hvussu ynskiligt er, at bygdin skal mennast. Harafturat er sambært nýggja uppskotinum pláss fyri omanfyri 10 bústøðum innanfyri A økini, harímillum nýggj útstykking á vegnum, Á Kongsjørð, og verður hetta mett at nøkta bústaðartørvin í nærmastu framtíð. Mælt verður til at taka støðu til eina møguliga víðkan av sethúsaøkjunum, eftir at nýggj bygdaætlan er dagførd fyri Kaldbak.

- **Matrikkul 19c (Við Á 25A) er ikki í bústaðarøki, hóast talan er um bústað**

Ynskið er, at matr. 19c verður broyttur til bústaðarøki.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Støddin á húsinum, grundøkinum og frástøðan frá bygdini er lík áðurnevnda Á Soylugðrum 50. Umsitingin mælir tí somuleiðis til at broyta grundøkið (matr. nr 19c) til bústaðarøki A1, og áleggur broytingin ikki kommununi at dagføra veg og annað infrakervi til ognina á Soylugørðum 50.*

- **Øki við Byggjarstøð (støðna) kann takast við sum neystaøki**

Í broytingaruppskoti verður skotið upp at víðka neystaøki niðan í bøin við matr. nr. 49a, soleiðis at neystaøkið kann byggjast, partvíst undir bøi, í samráð við avvarðandi eigara.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Í uppskotinum fylgir neystaøkið neyvt matrikkulmarkinum, og mælir umsitingin frá at víðka neystaøkið norður og tvørturum matrikkulmarkið millum matr. nr 49c og 49a.*

- **Búnaðarstovan ynskir at taka av byggilendinum**

Við grundgeving um týdningin at varðveita gott landbúnaðar- og matvøruframleiðslulendi í Føroyum, og at tryggja okkara eftirkomarum atgongd til hetta tilfeingið, verður víst á, at partar av matr. nr. 11a, 22a og 36a skulu varðveitast sum landbúnaðarjørð ella broytast frá byggilendi til landbúnaðarjørð, svarandi til eitt øki omanfyri 12.500 $m^2$.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Í nýggja uppskotinum gongur umsitingin viðmerkingini partvíst á møti, men letur framvegis part av matr nr 11a vera byggilendi, í samband við bygging av møguligum framtíðar stovni.*

At enda eru tvey byggisamtyktarmál, sum eru viðkomandi í samband við endurskoðan av byggisamytiktini fyri Kaldbak, men sum umsitingin ikki hevur móttikið sum beinleiðis viðmerking í hoyringartíðarskeiðnum.

1) Grótbrotið við Krossá (*mál nr. 21/00569*)

Við gamla grótbrotið við Krossá er áseting C-Vinnu- og havnaøki galdandi. Økið hevur innkoyring og verður í innanhýsis samskifti víst á, at økið møguliga í framtíðini kann nýtast sum sethúsaøki. Umsitingin mælir til at halda fast við verandi uppskot, har vinnu- og havnaøki verður økið broytt til 4. grundumráði. Mett verður, at hendan ásetingin er hóskandi fyri økið, ið hevur verið nýtt sum grótbrot, tyrving og til moldbreiðslu, og sum sambært nýggju ásetingini framyvir kann nytast sum landbúnaðarøki.

2) Møgulig víðkan av bústaðarøki í býlinginum Á Bø. (*mál nr. 25/05141)*

Eigari av matr. nr 89 hevur søkt Búnaðarstovuna um at keypa lendi frá matr. nr 49a, soleiðis at matr. nr 89 veksur úr 272 fermetrum uppí 400 fermetrar. Hetta er í sambandi við møguliga útbygging av húsunum. Mælt verður til at rætta byggisamtyktina eftir nýggjum møguligum marki, soleiðis at matr. nr 89 í framtíðini kann víðkast uppí 400 fermetrar, tí hetta er í samsvari við minst loyvdu grundstykkjavídd. Í nýggjum uppskoti verður mælt til at víðka bústaðarøki norðanfyri matr. nr 89, við umleið 130 $m^2$, soleiðis at viðkomandi grundøki kann víðkast samsvarandi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Byggimálsdeildin viðmerkti uppskotið, og vóru eftirfylgjandi gjørdar hesar broytingar:

1) Byggi- og nýtslustigini eru broytt frá einum til tveir desimalar.
2) Upplýsingar til møguliga heildarætlanir eru nágreinaðar og lagdar afturat í breddanum.
3) P-krøvini eru broytt, soleiðis at tey eru galdandi fyri bústaðarøkir burturav (Kap III §3).

At enda viðmælti byggimálsdeildin, at talmerking av greinum ikki byrjar umaftur undir hvørjum kapitli, men ístaðin er kronologisk fyri alla byggisamtyktina. Hetta er vanligur bygnaður í kunngerðum og lógum, og sambært byggimálsdeildini, eisini lættari at umsita.

Býarskipanardeildin vil tó fyribils ikki at broyta bygnaðin, av tí at verandi bygnaður er galdandi í øllum byggisamtyktunum í Tórshavnar kommunu, og er m.a. eitt av endamálunum í hesi endurskoðan at javnstilla byggisamtyktirnar í bygnaði. Hendan viðmerkingin verður tikin við til eina seinni dagføring av byggisamtyktini.

**Nýggj skjøl:**
- *J.nr. 25/01096-13- Upprunaligt uppskot, 11.01.2024*
- *J.nr. 25/01096-8 - Viðmerkingar og broytingaruppskot*
- *J.nr. 25/01096-12 - Kort - Kaldbak eftir broyting, dagf. nov. 2025*
- *J.nr. 25/01096-12 - Almenna byggisamtyktin – Kaldbak – Við markeraðum broytingum*
- *J.nr. 25/01096-12 – Uppskot – Almenn byggisamtykt fyri Kaldbak, nov. 2025*
- *J.nr. 25/01096-12 - Kaldbak - áðrenn og eftir broyting*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja nýggja uppskotið um byggisamtykt fyri Kaldbak sambært skjølunum *Uppskot – almenn byggisamtykt fyri Kaldbak, nov. 2025* og *Kort – Kaldbak eftir broyting, dagf. nov. 2025*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, tó so at tað eiga at vera fleiri økir afturat til bústaðarbygging.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur gjørt nýtt uppskot, og lagt fleiri økir afturat til bústaðarbygging. A1-sethúsaøkið er víðkað fram við vegunum Á Soylugørðum og Á Gørðum. Økið er tilsamans umleið 4500 m2 til víddar, og gevur væntandi pláss til umleið 8 sethús.

Umsitingin metir, at víðkanin av sethúsaøkinum framvið hesum vegunum stuðlar verandi býlingamynstur og gagnnýtur vegaskipanina. Tó er ein møgulig framtíðar útstykking treytað at vegirnir verða dagførdur.

Hendan broytingin gongur móti broytingaruppskotinum frá Búnaðarstovuni, sum í sínum hoyringsskrivi mælir til at varðveita matr. nr. 11a sum landbúnaðar- og matvøruframleiðslulendi.

Umsitingin metir, at um ynskið annaðhvørt er at avmarka ella økja byggilendi enn meiri, eigur hetta at grundast á eina dagførda bygdaætlan.

**Nýggj skjøl**

- *j.nr. 25/01096-18 - Kort - Kaldbak eftir broyting, dagf. feb. 2026, j.nr.*
- *j.nr. 25/01096-18 - Broyting markerað - feb 2026*

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja dagførda uppskotið um byggisamtykt fyri Kaldbak sambært skjølunum *Uppskot – almenn byggisamtykt fyri Kaldbak, nov. 2025* og *Kort - Kaldbak eftir broyting, dagf. feb. 2026*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mars 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Birgir Nielsen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Kári Johansen tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Atkvøtt varð um tilmæli frá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Eingin.

# 82/26 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.02.2025 | 30/25 | 25/01104-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 63/25 | 25/01104-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.03.2025 | 60/25 | 25/01104-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 111/25 | 25/01104-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.01.2026 | 4/26 | 25/01104-1 |
| 6 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 11/26 | 25/01104-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.03.2026 | 63/26 | 25/01104-1 |
| 8 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 82/26 | 25/01104-1 |

**Samanumtøka av málinum**
Hetta málið er eitt framhald av málinum Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað (21/03382), sí skjalið *Upprunaliga málið – Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað*.

Í 2020 varð samtykt at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi (20/04243). Upprunaliga var ætlanin at endurskoða tær galdandi serstøku byggisamtyktirnar, sum í fleiri førum ikki hava verið endurskoðaðar síðani kommunusamanlegging.

Endamálið er at broyta ásetingar, soleiðis at tær bæði samsvara betri millum bygdirnar í kommununi (javnseta bygdirnar) og við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu, harafturat verður í ávísum førum viðmælt at tillaga byggisamtyktarmørk. Á hendan hátt er tað bæði lættari at skilja og umsita byggisamtyktirnar fyri bygdirnar í kommununi.

Fyrsta uppskotið um at endurskoða serstøku byggisamtyktina fyri Velbastað varð samtykt 28. oktober 2021 og lá til almenna hoyring millum 1. nov. 2021 til 13. des. 2021. Kommunan móttók 3 mótmælir og mælti umsitingin frá at ganga teimum á møti.

Málið varð samtykt og síðani sent landsmyndugleika til góðkenningar. Í skrivi frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, dagfest 27. september 2022, verður heitt á kommununa, at bygdirnar í Tórshavnar kommunu framyvir vera reguleraðar í almennu byggisamtyktini, ella við hvør sínari almennari byggisamtykt. Umsitingin hevur síðani gjørt uppskot um almenna byggisamtykt fyri Velbastað, sí skjal *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað*.

**Lýsing av málinum**
Uppskotið varð samtykt í byggi- og býarskipanarvendini 12 februar í 2024, men varð av misgáum ikki lagt aftur fyri Velbastaðnevndini fyrr enn í desember 2024. Umsitingin sendi tilfarið umvegis teldupost og Velbastaðnevndin hevði hesar viðmerkingar:

**Viðmerkingar frá velbastaðarnevndini:**

*Málið hevur verið fyri hjá okkum fyrr, og kunnu vit vísa til tær viðmerkingar sum eru gjørdar tá. Eisini hava vit hesar viðmerkingar at leggja afturat:*

1) *Vit ynskja at hetta málið verður viðgjørt eins og málið í Kirkjubø. Málið á Velbastað er sent til staðbundnu nevndina, meðan í Kirkjubø er sent til almenna hoyring.*
2) *Rættast hevði verið við einari almennari kunning í báðum bygdunum.*
3) *Í nýggju byggisamtyktini hevur man broytt økið F (Almenn fríøki) til D2 (Almennir stovnar og mentan). At taka fríøki úr samtyktini ger, at tú hevur møguleika at byggja á hesum økjum, og sostatt eru ongi almenn fríøki á Velbastað. Hesum mótmæla vit.*
4) *Í fleiri av ásetingunum verður orðingin «og tílíkt» nýtt, og meta vit at hetta er óheppið, tá tað*

*hetta kann boyggjast og vendast, alt eftir hvørji áhugamálini eru.*

Umsitingin svaraði Velbastaðnevndini 16. desember 2024.

> *Til 1 og 2:*
> *Málið verður eftir ætlan lagt fyri býráðið í januar 2025, og fer síðani, eins og endurskoðanin av Kirkjubø, út til almenna hoyring í minst 6 vikur. Í hoyringstíðarskeiðnum er ætlanin at umsitingin leggur uppskotið fram, og borgarar fáa høvið at spyrja inn til og viðmerkja málið, á kunnandi borgarafundi í Velbastað.*
>
> *Til 3:*
> *Hesa viðmerking ynskja vit at fáa lýsta nærri, tí sambært viðmerkingini verður øki F í verandi byggisamtykt lagt til almenn fríøki, meðan verandi byggisamtykt lýsir F sum alment frítíðarøki (ítróttarvøllir, spælipláss útiverupláss o.t.).*
> *Sambært uppskotinum kemur D2 ístaðin fyri bæði E (almennir stovnar) og F (almenn frítíðarøki), og metir umsitingin at D2 (almennir stovnar og mentan) rúmar bæði endamál.*
>
> *Til 4:*
> *Orðingin "og tílíkt" er afturvendandi fyri allar almennu byggisamtyktirnar í Tórshavnar kommunu, umframt galdandi byggisamtykt fyri Velbstað og Kirkjubø. Endamálið er at avmarkað talið av økispørtum og at varðveita ein ávísan fleksibilitet í umsitingini, sum kann vera ein fyrimunur bæði í samband við byggimálsviðger og fyri menning av bygdini. Tað er tó lætt at ímynda sær at orðingin verður brúkt til at fevna um nýtslu, sum ikki hóskar, og verður viðmerkingin tikin til eftirtektar.*

Umsitingin mælir til at leggja uppskotið, sum lýst í hesum málinum fyri býráðið og síðani til almenna hoyring.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í málinum 25/00818, verður mælt til at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 50ø, Velbastaður, frá E (almennir stovnar) til B (sethús) sambært galdandi serstøku byggisamtykt. Hetta er í sambandi við at frískúlin niðurleggur virksemið, og ynskið er at selja ognina.

Sambært uppskotinum um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað, verður matr. 50ø broyttur frá E øki til D2 økið (almennir stovnar), og tískil kemur hetta ikki at samsvara við tilmælið í máli 25/00818, um broytingin til sethús verður góðkend.

Umsitingin mælir til, at atlit verður tikið til mál nr 25/00818, soleiðis at tilfarið sum verður sent til endaliga viðgerð, annaðhvørt lýsir matr. nr 50ø sum A bústaðarøki ella sum E almennir stovnar, treytað av endaligu viðgerðini av máli nr 25/00818.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað,* journal nr. 21/03382
- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar,* journal nr. 20/04243
- *Fyrispurningur um broyting av byggisamtykt, galdandi fyri matr. nr. 50ø, Velbastaður - 24/08611,* journal nr. 25/00818

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað,* journal nr. 25/01104-2.
- *Kort – áðrenn broyting,* journal nr. 25/01104-2
- *Kort – eftir broyting,* journal nr. 25/01104-2.
- *Velbastað – áðrenn og eftir– Tekstur,* journal nr. 25/01104-2.
- *Upprunaliga málið – Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað,* journal nr. 25/01104-4

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað sambært skjølunum *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað* og *Kort – eftir broyting*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Býráðsfundur 27. februar 2025: Atkvøtt varð um uppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

Uppskotið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

**Viðmerkingar frá Kirkjubøar/Velbastaðarnevndini:**

*<u>Viðmerkingar til mál 21/03382. Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað.</u>*

*Málið hevur verið fyri hjá okkum fyrr, og kunnu vit vísa til tær viðmerkingar sum eru gjørdar tá. Eisini hava vit hesar viðmerkingar at leggja afturat:*

*1) Vit ynskja at hetta málið verður viðgjørt eins og málið í Kirkjubø. Málið á Velbastað er sent til staðbundnu nevndina, meðan í Kirkjubø er sent til almenna hoyring.*

*2) Rættast hevði verið við einari almennari kunning í báðum bygdunum.*

*3) Í nýggju byggisamtyktini hevur man broytt økið F (Almenn fríøki) til D2 (Almennir stovnar og mentan). At taka fríøki úr samtyktini ger, at tú hevur møguleika at byggja á hesum økjum, og sostatt eru ongi almenn fríøki á Velbastað. Hesum mótmæla vit.*

*4) Í fleiri av ásetingunum verður orðingin «og tílíkt» nýtt, og meta vit at hetta er óheppið, tá tað hetta kann boyggjast og vendast, alt eftir hvørji áhugamálini eru.*

Á býráðsfundinum 27. februar 2025 gjørdu býráðslimir vart við viðmerkingarnar frá staðbundnu nevndini, og ivamál var, um byggi- og býarskipanarnevndin hevði tikið viðmerkingarnar til eftirtektar. Víst verður til viðmerkingarnar omanfyri.

Býráðslimir mettu, at av tí at talan er um ógreið viðurskiftir og stórar prinsipiellar broytingar, so var best, at uppskotið varð dagført samsvarandi viðmerkingunum frá staðbundnu nevndini, og at uppskotið harvið verður meira klárt, áðrenn uppskotið verður lagt til almenna hoyring.

Umsitingin ásannar, at broytingar av galdandi byggisamtykt krevja gjølla viðgerð, harímillum móttiknu viðmerkingarnar frá staðbundnu nevndini. Umsitingin viðmælir tó, at verandi uppskot, sum er lýst í hesum málinum, verður lagt fyri býráðið og síðani til almenna hoyring. Í hoyringstíðarskeiðnum verður almennur borgarafundur fyriskipaður á Velbastað, soleiðis at borgarar kunnu fáa neyðugt innlit í málið, og síðani viðmerkja. Á henda hátt verður møguleiki at samla so nógvar viðmerkingar og sjónarmið sum gjørligt, áðrenn endaliga viðgerðin av málinum verður gjørd og møguligar dagføringar av uppskotinum verða gjørdar.

Hetta er sami leistur, sum hevur verið nýttur í sambandi við endurskoðanina av byggisamtyktunum fyri Kirkjubø, Nólsoy, Hvítanes og Kaldbak.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað sambært skjølunum *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað* og *Kort – eftir broyting*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Uppskotið lá til almenna hoyring í tíðarskeiðnum 19. juni til 10. september 2025. Í hesum sambandi var kunnandi borgarafundur á Velbastað 3. september 2025. Tá ið freistin at viðmerkja var farin, hevði kommunan móttikið tvey hoyringarskriv (sí skjal *Viðmerkingar og broytingaruppskot*). Niðanfyri er ein samanumtøka av viðmerkingunum og svar frá umsitingini.

**Mótmæli frá Dánjal Paula í Búðini, Ólavi Brimnes og Sveini Zachariasen umboðandi part av staðbundnu nevndini:**

1. Frámælt at 5 F økir (alment frítíðarøki) verða broytt til D2 (almennar stovnar)

*Í galdandi byggisamtykt er munur á F-økið, (almenn frítíðarøkið) og E-økið (almennir stovnar). Í nýggja uppskotinum eru øll F-økini broytt til D2 (almennar stovnar, ítrótt, mentanarlig endamál v.m.). Hetta verður mett at vera óheppið og óhóskandi fyri fleiri av økjunum (ítøkiliga verður víst á 5 økir), og áttu hesi økini ístaðin fyri at verið broytt til D1 (frílendi), soleiðis at tey verða varðveitt sum frílendi. Sambært skrivinum eru økini í dag virðismikil náttúruøkið sum børn og onnur hava gleði av, og er ynskið at tey vera varðveitt til hetta endamálið.*

<u>Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:</u>
Ætlan er ikki at staðseta almennar stovnar í teimum 5 F-økjunum, sum víst verður til í hoyringsskrivinum. Umsitingin er tískil samd í, at D1 er hóskandi áseting fyri hesi økini, og verður uppskotið tillagað sambært tilmælinum.

2. K-økið (Landbúnaður) verður broytt til 4. grundumráði

*Mett verður, at tað ikki er rætt at broyta galdandi K-økið til 4. grundumráði. Orsøkin er at ásetingar fyri 4. grundumráði víðka um heimildirnar fyri hvat kann byggjast uttan fyri bøgarðarnar. Í nýggja uppskotinum verður 4. grundumráði lýst soleiðis:*

*"4. grundumráði verður lagt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.",*

*Orðið "tílikt" kann boyggjast í mun til hvør lesur tað, og funnist verður somuleiðis at hesi orðing:*

*"Onnur bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki, kann staðsetast í 4. grundumráði."*

*Mælt verður til, at halda seg til verandi áseting sum er galdandi fyri K, har tað er greitt at umráðisparturin er lagdur til landbúnað.*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Umsitingin er samd í, at heimildin fyri nýtslu í 4. grundumráði er sera breið og tískil ikki lýsir nágreiniliga, hvat kann og hvat ikki kann byggjast. Munur er eitt nú á landbúnaðarvirksemi, smærri bygging í sambandi við ferðavinnu og vindmyllur, sum er alt virksemið sum sambært byggisamtyktini kann rúmast í umráðispartinum.

Tó verður mælt frá at varðveita ásetingarnar fyri K-øki í haganum kring Velbastað. Orsøkin er, at nýtslan í galdandi áseting somuleiðis er breið, og ein varðveitan av økispartinum K stríðir ímóti endamálinum um, at ásetingar, sum í størri mun samsvara við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu og hinar bygdirnar í kommununi, skulu vera eins. Um hagin kring Velbastað hevur aðrar ásetingar enn hagin kring aðrar bygdir í kommununi, verður hetta í fyrstu atløgu umsitingarliga fløkjasligt at umsita og at dagføra í eini heild.

Mælt verður til, at umsitingin í nýggjum máli fer undir at lýsa og nágreina nýtsluna í 4. grundumráði í síni heild fyri alla kommununa, sambært eini lendisætlan. Í hesum málinum skulu viðmerkingarnar í sambandi við 4. grundumráði í hesum málinum, takast til eftirtektar.

3. Víðkan av D1 økinum við Mýandalsá

*Í galdandi byggisamtykt er økið við Mýandalsá H: Frílendi broytt til D1: Frílendi. Í broytingaruppskoti verður mælt til at víðka hetta økið norðureftir.*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Mett verður, at náttúruvakra økið fram við ánni hóskar sum D1 frílendi, og er nýtt uppskot gjørt, har D1 økið er víðkað norðureftir sambært broytingaruppskotinum.

**Í mótmæli við 78 undirskriftum:**

1. F-økini skulu broytast til D1 heldur enn D2.

*Eins og í viðmerking 1 verður víst á, at fleiri D2 økir sambært uppskotinum, høvdu hóskað betur sum D1 økir.*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Vísandi til viðmerking 1 hevur umsitingin gingið hesi viðmerking á møti.

2. Bústaðarøki sunnanfyri Mýandalsá

*Bústaðarøki sunnan fyri Mýandalsá (á matr 50a) er alt ov tætt við ánna og fossin, og eigur at verða minkað tilsvarandi, soleiðis at tað lýkur krøvini um frástøðu frá áum og fossum, og verður partur av D1 øki.*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Stóra óbygda byggiøkið hevur mark við ánna, og hevur umsitingin í uppskoti rættað markið, soleiðis at byggiøkið verður flutt frá ánni eftir marki, sum verður mett hóskandi. Harafturat hevur umsitingin broytt E øki (almennur stovnur) til A øki, av tí at ongin útstykkingarætlan er fyri økið, og harvið er ikki greitt, júst hvar ein møguligur stovnur hevði hóskað seg, um tað eina ferð í framtíðini verður ústykkjað.

3. Mint verður á orðing í samanleggingarsáttmálanum millum Kirkjubøar og Tórshavnar kommunu

*Orðingin er soljóðandi:*
*"Kirkjubøur og Velbastaður verða varðveittar sum bóndabygdir og koma at bera dám av hesum. Dyrkað jørð, bæði innan og uttangarðs, eigur í hesum sambandi, í mest møguligan mun, at verða varðveitt sum landbúnaðarjørð. Fyrilit skal vísast fyri dyrkbærum lendi, sum, í mest møguligan mun, eigur at verða arðveitt sum lendi, ið kann dyrkast."*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Henda orðing hevur týdning fyri byggisamtykt, í mun til hvørt langtíðarendamálsynski er um at røkka, og mælir umsitingin til, at orðingin, frá samanleggingarsáttmálanum verður varðveitt undir innleiðandi brotinum «Endamál» í uppskotinum um byggisamtykt fyri Velbastað.

4. K økið skal varðveitast

*At enda verður, eins og í viðmerking 2, staðiliga mælt til, at § 10, áseting fyri 4. grundumráði skal strikast.*

*Trupulleikin við ásetingum fyri 4. grundumráði er, at møguliga nýtslan í økispartinum er víðopin, Víst verður til málið um matstovu/gistingarhús við Fossdalsgjógv, tá ið Tk gjørdi uppskot um serstaka byggisamtykt fyri Fossdalsgjógv vísandi til, at allar bygdir í Tórshavnar kommunu vóru í 4. grundumráði. Hetta hevði TK, sambært mótmælinum ikki heimild til, tí at byggisamtyktin fyri Velbastað er galdandi og harvið øki K.*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Víst verður til viðmerkingarnar, sum umsitingin hevði til pkt. 2 í fyrra hoyringsskrivinum.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Byggimálsdeildin viðmerkti uppskotið um endurskoðan av Kaldbak og Kirkjubø, og hevur umsitingin í hesum sambandi gjørt fylgjandi broytingar í sambandi við endurskoðanina av Velbastað:
1) Byggi- og nýtslustigini eru broytt frá einum til tveir desimalar.
2) Upplýsingar til møguliga heildarætlan eru nágreinaðar og lagdar afturat í breddanum.
3) P-krøvini eru broytt, soleiðis at tey eru galdandi fyri bústaðarøkir burturav (Kap III § 3).

**Nýggj skjøl**
*j.nr. 25/01104-13 Kort – Velbastað eftir broyting, nov 2024*
*j.nr. 25/01104-11 Viðmerkingar og broytingaruppskot*
*j.nr. 25/01104-12 Kort - Velbastað eftir broyting, dagf. des. 2025*
*j.nr. 25/01104-12 Almenna byggisamtyktin fyri Velbastað, uppskot des 2025*
*j.nr. 25/01104-12 Almenna byggisamtyktin Velbastað uppskot des 2025 – við markeraðum broytingum*

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at broyta uppskotið sambært skjalinum *Kort - Velbastað eftir broyting, dagf. des. 2025* og *Almenna byggisamtyktin Velbastað dafg, des 2025* og beina málið í býráðið.

Mælt verður til, at umsitingin fær heimild at stovna mál, har farið verður undir at broyta ásetingar fyri 4. grundumráði fyri alla kommununa, har viðmerkingarnar í hesum málinum vera nærri viðgjørdar

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. januar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Annfinn Brekkstein legði fram broytingaruppskot um at beina málið aftur í nevnd.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein, Anja Weyhe og Bergur Robert Dam Jensen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Elin Heðinsdóttir Joensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Kristianna Winther Poulsen og Lilja Blaasvær.

**Ískoyti**
Býráðið samtykti at beina málið aftur í nevnd.
Viðgerðin í býráðnum vísti á, at møgulig broyting av galdandi K øki (landbúnaður) til 4. grundumráði, kann gerast óheppin, tá tað í verandi løtu ikki er greitt hvussu dagførdu ásetingarnar fyri 4. grundumráðið verða orðaðar, og tá tað í dag er møguligt við serstakari byggisamtykt at loyva øðrum virksemið í hesum økisparti.

Arbeiðið at dagføra byggisamtyktirnar fyri bygdirnar handlar um at gera eins ásetingar fyri allar bygdir. Býarskipanin fyri kommununa er soleiðis skipað, at ymiskar ásetingar eru galdandi fyri bygda økið, meðan hagin millum bygdir og bý er í økispartinum 4. grundumráðið.

Umsitingin metir at ásetingar fyri 4. grundumráði sambært uppskotinum eru hóskandi, tí hóast tær eru lutfalsliga víðfevnandi, so verður verandi landbúnaðarvirksemi kring bygdirnar varðveitt, umframt at møgulig umsókn um broytta nýtslu, í samb. við t.d. bygging av vindmyllum, grótbroti ella matstovu/gistingarhúsi, skal til politiska viðgerð, almenna hoyring og góðkennast av landsmyndugleikum, áðrenn tílík broyting verður galdandi.

Um umsitingin, í samband við endurskoðanina av Velbastað, skal fremja eina meira nágreinandi býarplan fyri nýtslu í haganum kring Velbastað nú og í framtíðini, er hetta arbeiðið at meta sum ein yvirskipaða lendisætlan, og hóast tað verður mett neyðugt at fremja, fer tað sannlíkt at seinka málið um endurskoðan munandi.

Umsitingin hevur tískil 3 møguleikar:
- At varðveita K økið (verandi áseting)
- At broyta til K til 4. grundumráði (sambært uppskotinum)
- At gera eina lendisætlan fyri hagan kring Velbastað.

Av hesum møguleikum mælir umsitingin til at halda fast í uppskotinum, har verandi K øki verður broytt til 4. grundumráði, grundað á áðurnevnda aðalmál, um at javnstilla byggisamtyktirnar fyri Tórshavnar kommunu, og tí at ásetingin fyri 4. grundumráði varðveitir verandi nýtslu, og krevur serstaka byggisamtykt, sum skal ígjøgnum drúgva tilgongd, um annað virksemið skal loyvast í hesum økispartinum.

**Aðrar viðmerkingar frá umsitingini**
Umsitingin hevur í málinum um byggisamtykt fyri Kirkjubø móttikið viðmerkingar frá Búnaðarstovuni og Bóndafelag Føroya, sum vísa á eina avmarkandi ávirkan, um H frílendi (frílendi) í bygdini, sum bæði í Kirkjubø og á Velbastað er galdandi fyri innangarðsjørð, verður broytt til D1-frílendi. Orsøkin er at D1 ásetingar ikki nevna at økið verður tilskilað landbúnðarvirksemi. Umsitingin mælir tí til at broyta býarplanin soleiðis at H økini í Velbastað (og Kirkjubø) vera broytt til 4. grundurmáði (sí *Kort - Velbastað eftir broyting, uppskot feb 2026*).

H1 økið, sum sambært galdandi byggisamtykt er lagt til friðað øki av mentunar- og søguligum grundum, verður sambært uppskotinum broytt til D1 øki, og á tann hátt lýsir byggisamtyktin meira nágreiniliga hvørji økir í bygdini hava serligt fornfrøðiligt ella varðveitingarvert virði.

**Nýggj skjøl**

*j. nr. 25/01104-16 Kort - Velbastað eftir broyting, uppskot feb 2026*

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at broyta uppskotið sambært skjalinum *Kort - Velbastað eftir broyting, uppskot feb 2026* og *Almenna byggisamtyktin Velbastað dafg, des 2025* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mars 2026:** Anja Weyhe og Annita á Fríðriksmørk taka undir við tilmælinum.

Bergur Robert Dam Jensen, Birgir Nielsen og Kári Johansen taka ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Atkvøtt varð um tilmæli frá umsitingini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen,Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

## 83/26 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri kampusøkið, matr. nr. 1017d

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 21.11.2025 | 163/25 | 25/05861-4 |
| 2 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 283/25 | 25/05861-4 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.03.2026 | 68/26 | 25/05861-4 |
| 4 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 83/26 | 25/05861-4 |

**Upprunin til málið**
Í 2018 varð Strategisk Kampusætlan gjørd fyri Fróðskaparsetur Føroya, sí journal nr. 25/05861-9, "*2018.12. Færøernes Universitets Strategiske Campusplan*". Ætlanin leggur upp til at savna allar deildir og alt virksemi hjá Fróðskaparsetrinum í økinum Nóatún, Debesartrøð, og á Frælsinum við parkering undir jørð á Frælsinum, soleiðis at lítil og ongin sjónlig parkering verður í økinum, og fólkaferðsla, uppihald, rørsla og trivnaður tí kann verða raðfest høgt. Ætlanin tók støði í, at Venjingarskúlin á Frælsinum 20 varð burturbeindur, og at lestrarbústaðir vórðu bygdir í økinum. Hetta er seinni broytt, soleiðis at Venjingarskúlin verður høvuðsumvældur og transformeraður til eitt modernað universitet.

Ætlaðu lestrarbústaðirnir, ið skuldu byggjast á Frælsinum 20, verða eftir ætlan bygdir uttan fyri Kampusøkið, ásannandi at økið helst ikki ber meir enn útbygging av sjálvum Fróðskaparsetrinum og teim verandi bygningunum.

Økið liggur í D3 øki í almennu byggisamtyktini, og skal øll bygging og útstykking í økinum gerast sambært serstakari byggisamtykt. Umframt økið, sum Kampus-ætlanin fevnir um, verður restin av sama D3 øki partur av serstøku byggisamtyktini, sí kort *Økið.* Soleiðis fevnir serstaka byggisamtyktin somuleiðis um t.d. Skúlan á Trøðni, Fólkaháskúlan og Ellisheimið.

**Lýsing av málinum**
Landsverk hevur sent kommununi tilfar, sum lýsir ætlanirnar hjá landinum í samb. við bygging av Fróðskaparsetrinum á Frælsinum, sí journal nr. 25/05861-3,*"Fylgiskjal 1 – Tilfar í samb. við Serstaka byggisamtykt",* sí somuleiðis *PROJEKTUPPSKOT A3 (2)_reduceret, journal nr. 25/05861-9.*

Á viðhefta áhugakorti sæst, hvørji býarskipanarlig áhugamál eru í økinum, sum atlit skulu takast til, tá økið verður skipað, sí journal nr. 25/05861-5, *"Áhugakort – Kampus"*. Her sæst m.a., at økið er partur av einum varðveitingarverdum grønum øki og býarumhvørvi, og at varðveitingarverdir bygningar eru í økinum. Harafturat er ein miðingarlinja, frá Vesturkirkjuni og út á Hamaran á Argjum, sum atlit skal takast til.

<u>Býarumhvørvi</u>
Økið er í Tórshavnar býaratlassið skrásett sum eitt varðveitingarvert býarumhvørvi.

Í atlassinum stendur um økið:
*Hóast teir [bygningarnir] eru ymiskir í skapi og settir á ymiskan hátt, summir uppi á høvdini og aðrir meira afturundir, og hóast so ymiskligir bygningar eru sum tey svørtu timburhúsini á Háskúlanum, gamla Lansbókasavnið úr føroyskum gróti og teir stoyptu bygningarnir hjá Sjómansskúlanum og nýggja Landsbókasavninum, so kennist økið kortini sum ein partur av einari heild við serliga opnum og grønum lendi í tí tættari bygda býnum uttanum. Ein komandi útbygging her, eigur at virða hesi grønu eyðkenni.*

Í serstøku byggisamtyktini verða byggifelt teknað á kortið, soleiðis at tað verður greitt, hvørji øki skulu varðveitast órørd, og grøni dámurin í økinum verður varðveittur.

<u>Bygningar</u>
Í økinum eru seks bygningar, sum eru skrásettir í Tórshavnar býaratlassi. Talan er um bygningarnar:
- J. C. Svabosgøta 14, gamla gróthúsið, sum upprunaliga var Landsbókasavn. Varðveitingarvirði 2.

- V.U. Hammershaimbs gøta 22, sum í dag húsar Føroyamálsdeildini. Varðveitingarvirði 5.
- V.U. Hammershaimbs gøta 9 og 11, sum í dag húsar Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Varðveitingarvirði 4.
- V.U. Hammershaimbs gøta 7, Ellisheimið. Varðveitingarvirði 4.
- Háskúlavegur 14, Háskúlin. Varðveitingarvirði 3.
- Háskúlavegur 18, Háskúlin. Varðveitingarvirði 4.

Í serstøku byggisamtyktini verður ásett, at bygningar, ið eru skrásettir við varðveitngarvirði 1-6 í Tórshavnar býaratlassi, skulu ikki broytast ella takast niður uttan serloyvi frá byggivaldinum.

Grønt øki – skógfriðað
Eystari partur av matr. nr. 1017d er skógfriðaður, og tískil skal bygging í økinum og 300 m frá hølinum fáa loyvi frá friðingarmyndugleikanum.

Miðingarlinja
Tað er ikki ætlanin, at bygningurin, sum liggur á miðingarlinjuni, skal hækkast, og tískil ávirkar hetta ikki miðingarlinjuna frá Vesturkirkjuni og út á Hamaran.

Parkering
RÁÐ gjørdi í 2023 eina lýsing av parkeringsviðurskiftunum við Kampusøkið, sí journal nr. 25/05861-3, *"Fylgiskjal 3 – Parkering ved Kampus 12.10.2023"*. Sambært rapportini eru uml. 311 parkeringspláss í Kampusøkinum, tá eru fyribils parkeringsøkini á vøllinum á Frælsinum tald við. Tørvurin á parkeringplássum økist, so hvørt meir bygging verður í økinum, og sambært rapportini verður tørvurin í 2033 800 pláss, um normurin í BK17 verður fylgdur.
Fleiri av verandi parkeringplássunum verða somuleiðis tikin burtur, av tí at byggjast skal á økinum, og soleiðis økist munurin millum tøk parkeringspláss og kravd parkeringspláss.

Ein partur av Kampusætlanini er ein parkeringskjallari, ið fer at rúma 3-400 parkeringsplássum. Ein leys meting av parkeringsplássunum við kampusøkið, tá økið er fult bygt, er, at tað verða 500 parkeringspláss í økinum. Hesi eru í parkeringskjallaranum, á Frælsinum og Handan Á. Í mun til krøvini í BK17 mangla so statt uml 300 parkeringspláss.

Rapportin vísir á, at normurin í BK17 er nógv tann hægsti, tá samanborið verður við líknandi øki í Norðurlondum. T.d. um samanborið verður við normin í Lund, sæst, at kravið er 140 parkeringspláss og 487,5 í Horsens, sum er tað økið, ið hevur næst hægst norm. Rapportin mælir so statt til, at normurin verður endurskoðaður, og at man so hvørt økið verður bygt, metir um hvør veruligu tørvurin er. Somuleiðis liggur økið sentralt, og góðir samferðslumøguleikar eru í økinum, og eigur hetta at minka um tørvin á parkeringsplássum.

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu mælir til, at ásett verður í serstøku byggisamtyktini, at parkeringspláss verða skipað sum partur av eini heildarloysn fyri økið. Heildarloysnin verður dagførd fyri hvørt byggimál sær, av tí at tað er ikki fyrr enn í sjálvum byggimálinum, at tað gerst greitt, hvør ítøkiligi tørvurin er.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri D3 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- Umráðisparturin verður lagdur til stórar almennar stovnar fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt.
- Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Byggimálsdeildin hevði nakrar formligar viðmerkingar til uppskotið til serstøku byggisamtyktina, sí skjal *Viðmerkingar frá byggimálsdeildini*. Hesar verða rættaðar í skjalinum, sum verður lagt fyr býráðnum 11. Desember 2025.

Økið er skógarfriðað og verður sent friðingarmyndugleikanum til góðkenningar.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
- *Áhugakort – Kampus,* journal nr. 25/05861-5
- *Fylgiskjal 1 – Tilfar í samband við Serstaka byggisamtykt,* journal nr. 25/05861-3
- *Fylgiskjal 3 – Parkering ved Kampus_12.10.2023,* journal nr. 25/05861-3
- *Áhugakort – Kampus,* journal nr. 25/05861-5
- *PROJEKTUPPSKOT A3 (2)_reduceret,* journal nr. 25/05861-9
- *2018.12. Færøernes Universitets Strategiske Campusplan,* journal nr. 25/05861-9
- *Serstøk byggisamtykt fyri Kampus*, journal nr. 25/05861-11
- *Yvirlit yvir bygningar,* journal nr. 25/05861-10
- *Viðmerkingar frá byggimálsdeildini*, journal nr. 25/05861-12

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Av tí at tað gerast fleiri brúkarar av økinum, kann væntast, at tað verða avleiddar verkætlanir í sambandi við meir bygging í økinum. Tað kann t.d. vísa seg at verða tørvur á at gera broytingar í undirstøðukervinum í økinum, og kann hetta fáa fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa. Á tí støðinum, sum skipanin av økinum er í verandi løtu, ber ikki til at áseta ítøkiliga upphædd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri Kampus, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Birgir Nielsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið bleiv samtykt við tíggju atkvøðum fyri, eini atkvøðu ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson

Blankt atkvøddu: Kári Johansen og Rúni Reginsson Hammer.

**Ískoyti:**
Í sambandi við almennu hoyringina, sum var 16. desember 2026 til 7. februar 2026, komu tríggjar viðmerkingar, sí skjøl *Viðmerking 1 – Heilsufrøðiliga starvsstovan, Viðmerking 2 – Almanna- og heilsumálaráðið* og *Viðmerking 3 – Skógfriðingarnevndin.*

Niðanfyri eru viðmerkingarnar bólkaðar í mun til evni.

1. <u>Loyvt virksemi í økinum</u>
   Viðmerking frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni um, at virksemi teirra í økinum má tryggjast. Fyrst og fremst snýr viðmerkingin seg um, at heiti “starvsstovuvirksemi” átti at verði nevnt undir loyvdum virksemi í økinum smb. § 2 í serstøku byggisamtyktini. Í hesum sambandi verður virskemi hjá starvsstovuni lýst, og tey meta ikki, at hetta kann sammetast við tað virksemi, sum í løtuni verður lýst í § 2.

   <u>Viðmerkingar frá umsitingini</u>
   Umsitingin tekur undir við, at “starvsstovuvirksemi” verður lagt afturat loyvdum virksemi smb. § 2 í serstøku byggisamtyktini.

2. <u>Byggi- og nýtslustig</u>
   Mælt verður til, at byggi- og nýtslustigið fyri økið verður hækkað munandi.

   <u>Viðmerkingar frá umsitingini</u>
   Mest loyvda byggi- og nýtslustig fyri D3 øki er 0,25 og 0,5, so um byggi- og nýtslustigini fyri økið skulu hækkast, krevur hetta, umframt eina serstaka byggisamtykt, eisini eina broyting av almennu byggisamtyktini.

   Ynskið fyri økið er, at grøni dámurin verður varðveittur, og tískil verður tað ikki mett vera skynsamt at hækka byggi- og nýtslustigið.

3. <u>Byggiøki og skógfriðað øki</u>
   Almanna- og heilsumálaráðið hevur viðmerkt, at byggiøki, sum er staðsett niðanfyri Vinnuháskúlan, eigur at verða víðka, soleiðis at lestrarbústaðir kunnu byggjast í økinum, sí skjal *1017d Tórshavn.*

   Skógfriðingarnevndin vísir hinvegin á, at økið er skógfriðað sambært løgtingslóg um viðarlundir. Ætlanir og ynski um at byggja felagsbygning til Fróðskaparsetur Føroya og lestraríbúðir í økinum millum Vinnuháskúlan og Landsbókasavnið kunnu føra til, at økið heilt missir grøna dámin. Skógfriðingarnevndin metir, at Tórshavnar kommuna skal krevja, at dámurin á verandi grønum økjum verður varðveittur, hóast bygt verður. Endamálið við at skógfriðað økið var soleiðis at ein “universitetspark” kundi gerast einaferð í framtíðini. Skógfriðingarnevndin skjýtur upp, at Tórshavnar kommuna krevur, at ein ætlan fyri seturslund skal gerast á matr. nr. 1017d og at hendan gerst eina partur av serstøku byggisamtyktini.

   <u>Viðmerkingar frá umsitingini</u>
   Umsitingin metir tað hava stóran týdning, at grøni dámurin í økinum verður varðveittur. Økið, ið Almanna- og heilsumálaráðið ynskir verður lagt afturat byggiøkinum er lutfalsliga stórt, og stórur hæddarmunur er í økinum. Soleiðis hevði ein møgulig bygging í økinum verið sera sjónlig í økinum og minka munandi um grøna partin av økinum. Í viðmerkingini frá Almanna- og heilsumálaráðnum eru somuleiðis viðheftar tekningar av eini møguligari bygging. Umsitingin metir ikki hesa hóska inn í økið. Almanna- og heilsumálaráðið hevur munnliga

boðað frá, at hetta einans var eitt dømi um bygging, og skal ikki metast sum ítøkiliga ynskið. Tó, so metir umsitingin tað hava stóran týdning, at ein møgulig bygging í økinum er væl skipað – bæði í mun til ynskið um at varðveita grøna dámin og í mun til at byggingin skal hóska til aðra bygging í økinum, t.d. nýggja ætlaða felagsbygningin hjá Fróðskaparsetrinum. Tískil mælir umsitingin í fyrsta umfari frá, at byggiøkið verður víðka. Um aðrar, betur hóskandi ætlanir koma, kann byggiøkið møguliga víðkast seinni.

Umsitingin metir tað ikki neyðugt at krevja, at ætlan fyri seturslund skal gerast, men orðið "seturslund" verður lagt afturat virksemi, ið kann loyvast uttan fyri byggiøkini í serstøku byggisamtyktini.

**Skjøl**
- *1017d Tórshavn*, journal nr. 25/05861-27.
- *Viðmerking 1 – Heilsurfrøðiliga starvsstovan,* journal nr. 25/05861-34.
- *Viðmerking 2 – Almanna- og heilsumálaráðið,* journal nr. 25/05861-34.
- *Viðmerking 3 – Skógfriðingarnevndin,* journal nr. 25/05861-34.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:
- ganga viðmerkingunum um, at økið somuleiðis kann nýtast til starvstovuvirksemi og sum seturslund, á møti.
- Ikki at ganga viðmerkingunum um at hækka byggi- og nýtslustigi og at víðka um byggiøkið á møti.
- Beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mars 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Einmælt samtykt.

# 84/26 Nýggj serstøk byggisamtykt undir Gráasteini, matr. nr. 1094c og 1094d, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.02.2026 | 35/26 | 25/10305-5 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.03.2026 | 61/26 | 25/10305-5 |
| 3 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 84/26 | 25/10305-5 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av ognunum 1094c og 1094d undir Gráasteini, Tórshavn, ynskir at skipa økið við íbúðarbygging.

**Lýsing av málinum**
Ynskið er at skipa økið við uml. 38-40 íbúðum, sum eru 70-75 $m^2$ og 120-140 $m^2$ til víddar. Byggingin er í trimum hæddum og verður skipað sum tríggjar lonir kring eitt opið felagsøki í miðjuni. Parkering er skipað í kantinum av ognini, og atkoman verður frá vegnum undir Gráasteini. Sí uppskot til støðumynd á viðhefta skjali *Tekning nr. 1 - Støðumynd.* Ein skitsa av hugsaða dáminum á byggingini sæst á skjalinum *Tekning nr. 4 - Íbúðarbygging við grannalag.* Hesar tekningar eru tó ikki endaligar, og kunnu tískil ikki metast sum bindandi fyri verkætlanina.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.
- Hús við vanligari mønureising skulu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna.
- Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt til útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 7,5 til hægsta punkt við útvegg.
- Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.
- Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at víkja frá ásetingunum í stk. 8 og 9. (Hæddarásetingar)

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin metir, at farast kann undir at gera uppskot til serstaka byggisamtykt í samsvari við umsókn umsøkjarans.

Tørvur er á fleiri bústøðum í høvuðsstaðnum, og tí er umráðandi at verandi byggilendi verður gagnýtt á mest skynsaman hátt. Økið er nær bústaðardeplinum í Marknagili, umframt at tað liggur nær vinarásini, og er hetta somuleiðis ein orsøk til, at tað verður mett skynsamt at innrætta økið við íbúðum.

Økið liggur við eitt stórt vegamót og liggur á markinum millum sethúsabygging, raðhúsabygging, íbúðarbygging, miðstaðarbygging og vinnubygging, og hevur økið sostatt ikki ein einstakan dám, ið byggingin skal fyrihalda seg til. Tó, so verður yvirskipað mett um íbúðarbygging, at hetta eigur at gerast soleiðis, at byggingin fær ein føroyskan dám, við t.d. innvikum í framsíðunum, mønutekju o.ø. Júst hvørji krøv verða sett í serstøku byggisamtyktina, verður mett um seinni í tilgongdini.

Byggingin verður í mun til byggi- og nýtslustig tað sama, sum fyri A1 øki annars, men til ber at gagnýta lendi meira skynsamt við at loyva bygging í 3 hæddum og, at økið verður skipað til íbúðir, ístaðin fyri at útstykkja til t.d. sethús, umframt at fleiri eindir verða, tá økið verður skipað við íbúðum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Um tikið verður undir við at uppskot til serstaka byggisamtykt verður gjørt, verður málið viðgjørt saman við øðrum viðkomandi deildum í teknisku fyrisiting.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
- *Tekning nr. 1 – Støðumynd,* journal nr. 25/10305-4.
- *Tekning nr. 4 – Íbúðarbygging við grannalag,* journal nr. 25/10305-4.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin umrøður málið og tekur støðu til, um uppskot til serstaka byggisamtyktið, ið m.a. loyvir íbúðarbygging á matr. 1094c og 1094d, verður gjørt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. februar 2026:** Nevndin tekur undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Við støði í meginleistunum lýstir omanfyri, er uppskot til serstaka byggisamtykt undir Gráasteini, matr. nr. 1094c og 1094d, gjørt, sí skjal *Serstøk byggisamtykt undir Gráasteini, matr. nr. 1094c og 1094d*.

Uppskotið er gjørt í samstarvi við Teknisku deild og Byggimálsdeildina.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Transformarastøð liggur við síðunar av matr. nr. 1094c og 1094d, og uppskotið til serstaka byggisamtykt verður sent SEV til viðmerkingar.

**Skjøl:**
- *Serstøk byggysamtykt undir Gráasteini, matr. nr. 1094c og 1094d,* journal nr. 25/10305-14.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt undir Gráasteini, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mars 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við tólv atkvøðum fyri, ein atkvøða ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Elin Heðinsdóttir Joensen, Guttormur í Skála, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein..

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson,

# 85/26 Útstykking til sethús við Stórutjørn - 22/02943

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.02.2025 | 32/25 | 25/00581-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 10.02.2025 | 6/25 | 25/00581-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 25/25 | 25/00581-2 |
| 4 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 57/25 | 25/00581-2 |
| 5 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 85/25 | 25/00581-2 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.02.2026 | 37/26 | 25/00581-2 |
| 7 Tekniska nevnd | 09.02.2026 | 21/26 | 25/00581-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 30/26 | 25/00581-2 |
| 9 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 44/26 | 25/00581-2 |
| 10 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 85/26 | 25/00581-2 |

**Upprunin til málið**
Málið er framhald av málinum 22/02943 Útstykking til sethús við Stórutjørn

**Lýsing av málinum**
Viðgerðin av málinum higartil er lýst í málslýsingini fyri mál nr. 22/02943.
Í stuttum snýr málið seg um, at politiskt var ynski at seta gongd á bústaðarbyggingina við Stórutjørn.

Meðan arbeitt varð við at gera klárt til at bjóða arbeiðið at gera útstykking á økinum út, gav P/F Articon kommununi eitt tilboð upp á at útstykkja býlingarnar 1 og 4 úr heildarætlanini. Tilboðið var skipað sum heildararbeiðstøka, har kommunan innan fyri rammurnar av tilboðnum kundi gera tillagingar. Sáttmáli varð gjørdur áljóðandi kr. 79.320.642,13, íroknað mvg við afturbering til kommununa.

<u>Spillvatnsoptión</u>
Henda útstykkingin er so statt sambært samtykt sett í verk sum heildarverkætlan við P/F Articon sum heildarveitara. Afturat tilboðnum hevur P/F Articon givið eina optión upp á at stoypa reinsiverk og leggja kloakkering millum útstykkingarnar við Stórutjørn til reinsiverkið og millum reinsiverkið og útlát út á sjógv eystan fyri Sandvíkar. Kostnaðurin fyri hesa optión er kr. 7.078.911,56 íroknað mvg við afturbering.

Henda optiónin kann síggjast sum verkætlan fyri seg, tí at reinsiverk og kloakkering skal eisini gerast og bindast í høllina við Tjarnir, vinnuútstykkingina á Ovara Hjalla, umframt framtíðar útstykkingar við Stórutjørn (býlingur 2, 3, 5 og 6), soleiðis at økið verður virkið við nøktandi leiðingum. Sáttmáli varð ikki gjørdur um hesa optión í fyrstu atløgu.

Nú høllin við Tjarnir er um at verða liðug og vinnuútstykkingin á Ovara Hjalla verður liðug í summar, gerst tað alt meiri átroðkandi at fáa eina spillvatnsloysn til hesar útbyggingarnar, og tað er somuleiðis av hesi grund, at neyðugt er at taka støðu til spillvatnsætlanina fyri samlaða økið. Somuleiðis er neyðugt at fáa eina spillvatnloysn til útstykkingina við Stórutjørn, sum ikki kann leiðast í verandi spillvatnsloysnir í økinum, vegna ov smáar dimensiónir á leiðingunum og longu staðfestar avbjóðingar við verandi nýtslu.

Mett verður, at Tórshavnar kommuna eigur at fara undir at aktivera optiónina fyri spillvatnsloysnina fyri at tryggja, at høllin við Tjarnir og vinnustykkini á Ovara Hjalla kunnu takast í nýtslu, beinanvegin, sum tey eru liðug.

<u>Byggiharraútreiðslur og óvæntað</u>

Í upprunamálinum er einans játtaður peningur fyri sáttmálan við P/F Articon um heildararbeiðstøku. Nú arbeiðið er farið í gongd er tørvur á, at peningur eisini verður játtaður til byggiharraútreiðslur í sambandi við verkætlanararbeiðið. Her er talan um viðurskifti, so sum verkætlanarleiðsla, uttanhýsis eftirlit, óvæntaðar útreiðslur o.l. Mett verður, at 5% av sáttmálaupphæddini eiga at verða játtaðar til óvæntaðar útreiðslur og 2,5% til verkætlanarleiðslu og uttanhýsis eftirlit. Tilsamans 7,5% ella kr. 6.480.000,-.

Keyp av lendi:
Tórshavnar kommuna hevur fingið tilsøgn frá Búnaðarstovuni at keypa lendi til víddar 74.000 m² til útstykkingina í býlingi 1 og 4, sí tilsøgn og kortskjal j.nr. 25/00581-3. Keypspeningurin áljóðandi kr. 8.424.500,00 skal játtast sum útlegg av verkætlanini.

Játtanaryvirlit
Í talvuni niðanfyri kann síggjast yvirlit yvir verandi játtan, og játtanirnar, sum biðið verður um afturat.

| Dato | Játtan | Upphædd |
|---|---|---|
| 20.06.2024 | Sáttmáli við P/F Articon um heildararbeiðstøku v. komm. mvg | 79.320.642,13 |
| - | Optión um spillvatnsleiðing v. komm. mvg. | 7.078.911,56 |
| - | Byggiharraútreiðslur og óvæntað 7% | 6.480.000,00 |
| - | Keyp av lendi | 8.424.500,00 |
| | **Tilsamans** | **101.304.053,69** |

Framhaldandi tilgongdin:
Fram til í dag hevur verið arbeitt við býlingi 1 og 4, sum í heildarætlanini verða nevnd oyggj 1 og oyggj 4.

Í málinum, Skipan av Stórutjørn (mál nr. 18/03468), varð samtykt á býráðsfundi 28.09.2023, at heildarætlanin fyri Stórutjørn skuldi nýtast sum vegleiðandi amboð fyri víðari menningina av økinum.

Arbeitt verður framhaldandi við at skipa býlingarnar niður í smálutir, soleiðis at tilgongdin verður gjørd rætt og gott.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu er galdandi fyri økið, og skal serstøk byggisamtykt gerast, tá prosjekteringin er liðug.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál nr. 18/03468 Skipan av Stórutjøn er yvirskipaða málið fyri økið. 28. apríl 2022 var málið seinast fyri býráðið, har tað varð endaliga samtykt, at:
- Játta fígging til keyp av lendinum til Innkomuvegin og komandi vinnuútstykkingina Ovari hjalli.
- at heimila umsitingini at gera avtalu við Búnaðarstovuna um at keypa lendi í stigum til framtíðar útstykkingar burtur av matr. nr. 1æf og 139ed. So hvørt, sum tørvur er á fígging, verður málið lagt fyri aftur avvarðandi nevndir til støðutakan.
- at heimila umsitingini at samráðast við og gera avtalu við festaran um avlopstilfar og um at framtíðartryggja møguleikarnar at reka landbúnaðarvirksemi á festinum. Avtalan verður at leggja fyri aftur og góðkenna av avvarðandi nevndum.

Mál nr. 22/02943 Útstykking til sethús við Stórutjørn (arkiverað upprunamál)

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

| | **Býráðsfundur**<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 295 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

**Skjøl**
J.nr. 22/02943-4 VS: Útstykking við stórutjørn – sjálvboðið tilboð

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| 6475 | L64021 | Útstykking við Stórutjørn, B1, B4 | |

| Upphædd |
|---|
| 21.983.411,56 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 101.304.053,69 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024/2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 500.000 |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitingini at:

- gera sáttmála við arbeiðstakara um loysn fyri spillvatn frá Stórutjørn við støði í optiónini áljóðandi kr. 7.079.000,-, sum verður fíggjað sum útlegg á verkætlan L64021 Útstykking við Stórutjørn, B1, B4, kt, 6475 Byggibúning bústaðir.
- at játtað verða 7,5% av arbeiðstøkusáttmálanum svarandi til kr. 6.480.000,- til byggiharraútreiðslur í sambandi við verkætlanarleiðslu, uttanhýsis eftirlit, óvæntaðar útreiðslur og líknandi í sambandi við heildararbeiðstøkuna,-, sum verður fíggjað sum útlegg á verkætlan L64021 Útstykking við Stórutjørn, B1, B4, kt, 6475 Byggibúning bústaðir.
- at játtaðar verða kr. 8.424.500,- til útreiðslur í sambandi við keyp av lendi til verkætlanina.
- at málið verður beint í býráðið til tvær viðgerðir umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at arbeiðið við at gera kloakkina frá reinsiverkinum og út á sjógv skal bjóðast út.

**Tekniska nevnd 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Við hesi umbøn um eykajáttan verður biðið um at hækka upprunaliga útleggið í jnr. 22/02943 á kr. 79.320.642,13 við kr. 21.983.411,56, soleiðis at samlaða útleggið til útstykkingina við Stórutjørn verður 101.304.053,69.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd við teirri broyting, at arbeiðið at gera kloakk og reinsiverk verður boðið út. Játtaðar verða kr. 6.480.000,00 til byggiharraútreiðslur og óvæntað 7% og kr. 8.424.500,00 til keyp av lendi sum eykajáttan, ið tørvar tvær viðgerðir í býráðnum.

Høgni Vilhelmsen og Tróndur Sigurðsson atkvøða blankt.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við fyrstu viðgerð við 11 atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímót og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen

Uppskotið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Atkvøtt varð við aðru viðgerð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Sunnvá Dahl Høgfeldt, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

**Ískoyti**
Umsitingin er biðin um at gera dagføringar í útstykkingararbeiðinum, soleiðis at fleiri íbúðareindir verða enn í upprunauppskotinum.

Væntaða útreiðslubýtið til dagføring av verkætlanina verða mettar til:

1) Keyp av manglandi lendi – kr. 3.500.000,-
   Í hesari verkætlanini eru longu goldnar 8,4 mió til Búnaðarstovuna fyri 74.000 m2 av íalt 104.000m2. Fyri teir írestandi 30.000 fermetrarnar skal sostatt rindast uml 3,5 mió íroknað kostað fyri lendi, frábýtingarútreiðslur, tinglýsingargjald og sakargjald.

2) Matrikulering - kr. 4.000.000,-
   Umhvørvsstovan tekur matrikuleringssgjald sambært galdandi ásetingum

3) Index av ca. 120.000.000 - kr. 3.600.000,-
   Kostnaðarstøðið fyri allari verkætlanini verður mettur til í minsta lagi kr. 120 mió og mett verður at prísvøksturin verður ca 3% p.a.

4) Øking av íbúðareindum - kr. 20.000.000,-
   Umsitingin hevur móttikið tilboð arbeiðstakaranum upp á kr.20 mió kr. um broyting av verkætlanini um øking av íbúðareindum frá 150 til 420.
   Víst verður til skjal nr. 25/00581-257

**Skjøl**
Víst verður til mál nr. 25/08816 "Skipan av býlingum við Stórutjørn", har býráðið her tann 23. oktober 2025 samtykti skipanina av býlingunum og umsitingin framhaldandi arbeiðir eftir tí leistinum.
25/08816-1 Skipan av býlingum við Stórutjørn
25/00581-27 Bústaðir Stóratjørn_dagførd arbeiðstekning 15 nov 2025_c.jpg

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Dagføringin av verkætlanini hevur við sær ein meirkostnað á umleið kr. 32 mió. Henda metta upphædd kann býtast upp í hesi viðurskifti (uttan fjarhita sí mál nr. 26/00599)

5) Keyp av manglandi lendi kr. 3.500.000
6) Matrikulering kr. 4.000.000
7) Index av ca. 120.000.000 kr. 3.600.000
8) Øking av íbúðareindum kr. 20.000.000

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| | | Útlegg | 6475 | L64021 | Ústykking við Stórutjørn, B1 og B4 | | 32.600.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 126.825.142 |
| Áður játtað | Upphædd: | 94.225.142 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | Ultimo 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 500.000 |

**Tilmæli**
Tekniski stjóri, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til, at

1. útleggið til verkætlan L64021 Útstykking við Stórutjørn, B1 og B4, verður hækkað við 32,6 mió kr., sum eykajáttan til kr. 126.825.142,-.
2. At málið verður beint umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina í býráðið til tvær viðgerðir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. februar 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Kári Johansen tekur støðu á seinni fundi.

**Tekniska nevnd 09. februar 2026:** Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Anja Weyhe, Guttormur í Skála, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot um at seta eina bygginevnd.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við átta atkvøðum ímóti, fimm atkvøðum fyri og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Blankt atkvøddi: eingin.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og ongum blankum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: eingin.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Atkvøtt varð við aðru viðgerð, og varð málið samtykt við tíggju atkvøðum fyri, trimum atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Annfinn Brekkstein.

# 86/26 Uppfylging av arbeiði á ógreiðu matrikulviðurskifti á matr. nr. 658, Tórshavn - matr. nr. 658d - 14/03110

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.02.2026 | 32/26 | 25/09598-16 |
| 2 Tekniska nevnd | 09.03.2026 | 41/26 | 25/09598-16 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2026 | 60/26 | 25/09598-16 |
| 4 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 86/26 | 25/09598-16 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til mál nr. 21/00586 Áheitan um yvirtøku av vegi matr. nr. 658d, yviri við Strond 53, Tórshavn og mál nr. 14/03110 Uppfylging av arbeiði á ógreiðu matrikulviðurskifti á matr. nr. 658, Tórshavn.

**Lýsing av málinum**
Í framhaldi av málinum um at fáa avgreitt matrikuleru viðurskiftini á matr. nr. 55-658 hevur Føroya Kærustovnur tann 12.02.2025 avgjørt at staðfesta avgerð hjá Tórshavnar kommunu dagf. 13.12.2023 viðv. ognartøku av parti av matr. nr.658a, Tórshavn. Sum grundgeving fyri staðfestingini av ognartøkuni vísir kærustovnurin á heimild í §1 í ‘ *Lov nr. 69 af 7. Maj 1881 om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt offentlige Skoler på Færøeerne, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 fra 17. Mars 2022’.* Ognartøkan av parti av matr. nr.658a, Tórshavn var fyri at tryggja vegaatkomu til matr. nr. 658d, 658a og 658c.
Samstundis verður víst á, at tá ið ein almennur myndugleiki ognartekur, kann hetta bert gerast, um rindað veðrur fult endurgjald fyri ognartikna lendið.

Sum partur at fáa eina loysn á hesum rættarmáli um vegaatkomu og í framhaldi av rættarúrskurðinum, skal kommunan gera ymisk uppfylgjandi arbeiði á økinum. Í hesum sambandi hevur umsitingin verið í samskifti við eigaran av matr. nr. 658, Tórshavn við matrikulloysnum, sum eigarin hevur tikið undir við.
Umsitingin hevur í framhaldi av hesum biðið um boð frá tveimum arbeiðstakarum, og hevur sp/f D.Nordendal einans givið tilboð dagf. 14.01.2026 álj. kr. 646.100 u/mvg.(skjal nr. 25/09598-12)

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**
25/09598-8 Ástaðarfundur og notat til arbeiðssetning hjá Mortan á Hamrabyrgi yviri við Strond nr. 53 týsdagin 11.11.2025 kl. 13.00.pdf
25/09598-10 SV: Mál nr. 25/09598 Ástaðarfundur og notat til arbeiðssetning hjá Mortan á Hamrabyrgi yviri við Strond nr. 53 týsdagin 11.11.2025 kl. 13.00.pdf
25/09598-6 Mál nr_ 25_09598 Ymisk arbeiði at gera á privatari ogn_.msg
25/09598-6 Mál nr_ 25_09598 Ymisk arbeiði at gera á privatari ogn_.msg

| | Blað nr.: 300 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. mars 2026 | Forkvinnunnar merki: |

25/09598-12 Tilboð frá David Nordendal

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

Eykajáttan ☐

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | Vegaarbeiði á matr. nr. 658 |

| Upphædd |
|---|
| 750.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 750.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli**:

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 750.000,- av 8175 vegir (íløgur) LK81999 Vegaverkætlanir til nýggja verkætlan ´Vegaarbeiði á matr. nr. 658, Tórshavn', og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 09. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, tó so at tillagingar verða gjørdar, so at kommunan ikki kemur at gjalda fyri arbeiði/asfaltering á privatum øki, og at leggja fyri teknisku nevnd aftur.

**Ískoyti**

Í framhaldi av niðurstøðuni úr teknisku nevnd hevur verið samskift við eigaran av matr. nr. 658, Tórshavn, sum hevur upplýst, at hann í 2016 hevur goldið kr. 95.637 fyri regulering av vegi í kommunalum øki og hevði tikið tað fyri givið, at útreiðslurnar fyri hetta var rindað honum aftur.

**Skjøl**

25/09598-23 Kostnaðarbýti millum kommunalt og privat øki.xlsx

25/09598-24 Mál nr. 25-09598 dagførd kostnaðarmeting.xlsx

**Tilmæli**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 545.000,- av 8175 vegir (íløgur) LK81999 Vegaverkætlanir til nýggja verkætlan ´Vegaarbeiði á matr. nr. 658, Tórshavn', og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 09. mars 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, tó við teirri broyting at kommunan einans átekur sær kostnaðin av kommunala ognartikna partinum áljóðandi kr. 225.000 og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Einmælt samtykt.

| | **Býráðsfundur**<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 302 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

# 87/26 Fjarhiti til útstykkingina Stórutjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.02.2026 | 38/26 | 26/00599-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 09.02.2026 | 25/26 | 26/00599-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 35/26 | 26/00599-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 45/26 | 26/00599-1 |
| 5 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 87/26 | 26/00599-1 |
| 6 Tekniska nevnd | | | 26/00599-1 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til mál nr. 25/00581

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við útstykkingararbeiðið á Stórutjørn, skal støða verða tikin til um farast skal undir arbeiði at leggja fjarhita ella ikki. Fjarhitafelagið hevur boðað frá, at fíggjarligt rúm er ikki til at bera kostnaðin at leggja fjarhitaleiðingar. Tískil er neyðugt at kommunan í samstarvi við Fjarhitafelagið rindar fyri arbeiðið eins og gjørt er í sambandi við veitan av fjarhitaleiðingum til vinnustykki á Ovara Hjalla. Víst verður til mál nr. 22/01377 og 25/01179

Vísandi til at útstykkingararbeiðið er longu sett í verk í 2024 og at støða enn ikki er tiknin um at fjarhitaleiðing, er neyðugt er at taka eina skjóta avgerð so arbeiðið ikki steðgar upp. Vanliga hevur Fjarhitafelagið ikið sær av at veita og leggja fjarhitaleiðingar, men orsaka av væntandi haldføri hjá felagnum er støða ikki tikin til hetta eftir at farið var undir ústykkingararbeiði.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
26/00599-2 Upplegg til sáttmála millum Tórshavnar kommunu og Fjarhitafelagið ver5.docx
25/08816-5 137/25 Samtykt Byggi- og býarskipanarnevndin, 29.09.2025 Skipan av býlingum við Stórutjørn
25/08816-2 Upprunalig málslýsing mál nr. 25_00581 Útstykking til sethús við Stórutjørn 22_02943
25/08816-1 Skipan av býlingum við Stórutjørn
25/00581-2 Útstykking til sethús við Stórutjørn - 22/02943
25/01179-1 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla - 22/01377

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Verkætlanin at leggja fjarhitarør í Stórutjørn verður mett at kosta uml. kr. 8 mió. Talan er um prosjektering, at veita og leggja fjarhitarør og eftirlit. Neyvari kostnaðarmeting fyriliggur, tá ið prosjekteringsarbeiðið er liðugt væntandi primo apríl 2026.

**Játtan:**

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 303<br><br>Forkvinnunnar merki: |

Vanlig játtan ☐

Eykajáttan ☒

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | Útlegg |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6475 | | | Fjarhiti til útstykking til Sethús Stórutjørn |

| **Upphædd** |
|---|
| 8.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 8.000.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | ultimo 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:

1) heimila umsitingini at gera avtalu við Fjarhitafelagið um planlegging, fremjan og avhandan av fjarhitaanleggi til býlingarnar B1 og B4 við Stórutjørn.
2) kr. 8 mió. verða játtaðar til at leggja fjarhita o.a. í sambandi við hetta útleggið til verkætlan L64021 Útstykking við Stórutjørn, B1 og B4, verður hækkað við 8 mió kr., sum eykajáttan til kr. 134.825.142.
3) beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. februar 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Heidi lava Elgeirsdóttir, Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Kári Johansen tekur støðu á seinni fundi.

**Tekniska nevnd 09. februar 2026:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, við tí nágreining at endalig avtala við Fjarhitafelagið verður løgd fyri býráðið aftur til góðkenningar, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Atkvøtt varð við aðru viðgerð, og varð málið samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála,

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Annfinn Brekkstein, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Eingin.

# 88/26 Skráseting av náttúrusløgum í TK

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 02.06.2025 | 43/25 | 25/05927-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.03.2026 | 25/26 | 25/05927-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2026 | 63/26 | 25/05927-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 88/26 | 25/05927-1 |

**Upprunin til málið**
TK arbeiðir fyri at náttúran og lívmargfeldið skal verjast og styrkjast, og at náttúrufyrilit takast, tá verkætlanir setast í verk.

Við støði í hesum hevur umhvørvisdeildin havt fundir við Tjóðsavnið, NIBIO í Norra, Umhvørvisstovuna o.o. fyri at fáa størri innlit í arbeiðið við uppbyggjan av leisti/mannagongdum til náttúruskrásetingar og árinsmetingar í TK.

Umhvørvisdeildin hevur í hesum sambandi umbiðið verkætlanaruppskot og kostnaðarmeting frá Tjóðsavninum fyri arbeiðið at menna leist í TK ísv. skráseting av náttúrusløgum í TK. Skrásetingin skal kunna nýtast, tá avgerðir skulu takast um, hvat tey ymisku lendini skulu brúkast til, soleiðis at náttúruatlit altíð verður tikið við í metingina.

**Lýsing av málinum**
Náttúruskráseting er eitt amboð, sum kann leggja lunnar undir burðardyggari fyrisiting av lendinum og verða partur av eini lendisætlan. T.d. kann ein byggiverkætlan fáa eina góða byrjan, um náttúran er væl skrásett frammanundan. Náttúruskrásetingin er fyrsta stigið til eina umhvørvisárinsmeting.

Skrásetingin av náttúrusløgum er ein systematisk uppbygging av náttúruvitan, sum gevur innlit í hvørjum standi náttúran er í, hvørji náttúrusløg eru vanlig, og hvørji eru meira sjáldsom og viðkvom og hvørji sløg hava tørv á vernd.

Lívmargfeldið og lendi er í stórari minking, tí økir verða tikin til bygging, avveitt, uppdyrkað og taðað. Hetta minkar um mótstøðuførið hjá náttúruni mótvegis broytingum uttanífrá, og náttúran er tískil meira viðbrekin fyri m.a. farsóttum og veðurlagsbroytingum.

Verður náttúruvitanin uppbygt og kortløgd í Tórshavnar kommunu, kann vegakervi og bygging tillagast í góðari tíð, og soleiðis ber til at minka um inntriv og avleiðingar á náttúruna og harvið tryggja eina skynsamari bygging og burðardyggari býarmenning.

Verkætlanin er býtt upp í 3 stig:

1. Stig (2025): Ráðlegging og menning av skrásetingarleisti.
   Heildarmeting verður gjørd, sum fevnir um undankanningar í økjum í Tórshavnar kommunu, og frágreiðing um úrslit av náttúrustandi og týdningin av lívmargfeldi verður skrivað við tí endamáli at verða løgd fyri býráðið.

2. Stig (2026): Skrásetingar halda fram, og skrásetingarleisturin verður eftirmettur.
   Fyrireikingar av feltarbeiðnum verður tikið uppaftur um várið, síðani fer feltarbeiðið í gongd aftur á sumri 2026. Tá verða fyrstu ítøkiligu skrásetingarnar gjørdar, og síðani verður mett um skrásetingarleistin. Heystið verður nýtt uppá at tillaga arbeiðshátt hareftir, og innsavnaðu dáturnar vera viðgjørdar. Frágreiðing verður skrivað.

3. Stig (2027): Skrásetingar halda fram.
   Skrásetingararbeiðið heldur fram, nú við eini meira endaligari mannagongd. Kanningararbeiðið kann tískil gerast uppá ein systematiskan hátt, sum tryggjar góða góðsku og fleiri økir kunnu tá skrásetast uppá eitt styttri tíðarskeið. Dátur verða viðgjørdar og frágreiðing verður skrivað.

Tjóðsavnið fremur verkætlanina í samstarvi við NIBIO í Norra. Verkætlanin gevur TK møguleika at menna eina náttúru skrásetingarskipan tillagað føroysk viðurskifti, sum kann liggja sum grundarlag undir politiskari ráðlegging.

Kostnaðurin fyri verkætlanina er mettur til 142.300 kr. í 2025, 350.000 kr. í 2026 og 352.300 kr. í 2027.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mælt verður til at seta 1. stig í verk í ár, sum er ráðlegging og menning av skrásetingarleisti. Kostnaðurin fyri stig 1 er kr. 142.300, harav kommunan skal gjalda kr. 122.300.

Viðmerkjast skal, at við at gera stig 1, fær kommunan ein leist fyri heildarmeting í sambandi við undankanning í økjum í Tórshavnar kommunu. Tá hetta arbeiði er gjørt, kann støða takast til, um farast skal víðari til stig 2 og 3.

**Skjøl**
25/05927-2 Tjóðsavnið, kortlegging av náttúrusløgum í Tórshavnar Kommunu

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Umhvørvisdeildini mæla til, at tikið verður av tilboðnum frá Tjóðsavninum stig 1, og at hetta verður fíggjað av rakstri, konto 6610, Umhvørvistiltøk v.m.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 02. juni 2025:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Anja Weyhe, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Birgir Nielsen, tekur ikki undir við tilmælinum, grundað á at kommunan ikki skal fíggja rakstrarstøð hjá landsins stovnum, og at avgerðarrætturin verður fluttur til Tjóðsavnið.

**Ískoyti:**
Náttúruskráseting í Tórshavnar Kommunu (stig 1):
Í 2025 hevur umsitingin saman við Tjóðsavninum arbeitt við stig 1 av verkætlanini Skráseting av náttúrusløgum í Tórshavnar kommunu. Hetta er eisini samsvarandi yvirlýsing frá 2007, har borgarstjórar og kommunur úr øllum heiminum undirskrivaðu eina altjóða yvirlýsing um lívfrøðiligt margfeldi í bygdum økjum, skipað av UNEP.

Í grannalondum okkara er náttúrukortlegging eitt grundleggjandi amboð, sum verður nýtt og altíð er ein partur av lendisætlanum. Um orka verður løgd í hetta arbeiðið, kann øll kommunan verða kortløgd innanfyri eitt ávíst áramál og við tí kunnu kommunalar avgerðir takast á einum góðum og tilvitaðum vitanarstøðið. NIBIO í Norra kortleggir sum dømi eitt økið á støðd við Føroyar á hvørjum árið.

Endamálið við stig 1 hevur verið at:

- leggja lunnar undir at menna ein fakligan og haldføran leist
- meta um mannagongdir fyri skráseting og kortlegging av náttúrusløgum
- fáa royndir, áðrenn verkætlanin verður víðkað. Hetta fyri, at tryggja at feltdagar og kanningararbeiðið verður so effektivt sum gjørligt framyvir.

Stig 1 er at meta sum undanverkætlan, har tvey útvald øki verða lýst og samanborin í frágreiðingini frá Tjóðsavninum, sum er hjáløgd í málinum (j.nr. 25/05927-10). Í frágreiðingini verður eisini týdningurin av náttúrukortlegging, sum eitt amboð hjá Tórshavnar kommunu, lýstur.

Náttúruskráseting í Tórshavnar Kommunu (stig 2):
Stig 2 í verkætlanini er at halda fram og víðka skrásetingina av náttúrusløgum í Tórshavnar Kommuna. Í mun til stig 1, har tað var Tjóðsavnið, sum stóð fyri skrásetingini, er fyri stig 2 ætlanin at brúka NIBIO (Norsk institutt for bioøkonomi), sum kemur at standa fyri skrásetingini í eini royndarverkætlan í samstarvi við Tórshavnar Kommunu og Tjóðsavnið.

NIBIO hevur 25 ára royndir frá líknandi verkætlanum í Norra og hevur tí serfrøði innan økið. Samstarvið við NIBIO skal tryggja eina skjóta og dygargóða skráseting og skal eisini verða við til at menna førleikar hjá Tórshavnar Kommunu og Tjóðsavninum innan náttúruskráseting. Ætlanin er, at 3 starvsfólk frá NIBIO skulu skráseta útvald øki í 2026. Víst verður til skriv frá NIBIO dagfest 24. februar 2026, j.nr. 25/05927-11. Umframt verkætlanarlýsingina frá Tjóðsavninum j.nr. 25/05927-2.

Kostnaður fyri stig 2 er mettur til uml. kr. 400.000,-

Samstundis sum stig 2 fer av bakkastokki, verður stig 3 av verkætlanini fyrireikað. Í stig 3 er ætlanin at halda fram og víðka náttúruskrásetingina. Í hesum verkætlanarstigi verður eisini arbeitt við at søkja stuðul úr grunnum og gera samstørv innan økið. Tað hevur stóran týdning at uppbyggja førleikar í Føroyum og tí verða lívfrøðilesandi tikin við í kanningararbeiðið, saman við umsitingini í Tórshavnar kommunu og Tjóðsavninum.

Endamálið er, at tá stig 3 er liðugt, hevur Tórshavnar Kommuna og samstarvsfelagar ment mannagongdir og førleikar innan náttúruskráseting í Føroyum. Nátturuskráseting skal koma í fasta legu í Tórshavnar Kommunu og skal gerast týðandi amboð innan burðardygga kommunala umsiting.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Skjøl**
25/05927-10 Frágreiðing, Kortlegging av náttúrusløgum stig 1 (2025)
25/05927-11 Tilbud Naturtypekartlegging Torshavn i DKK 2026.pdf

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eykajáttan | ☐ |
| Loka verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |

| |
|---|
| **Upphædd** |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 308<br><br>Forkvinnunnar merki: |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6675 | | Umhvørvistiltø k o.a. (íløgur) | 6675 | | | Skráseting av náttúrusløgum | 400.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

## Tilmæli

Tekniski stjórin og leiðarin á Umhvørvisdeildini mæla til:

- at seta "stig 2" í verk, av náttúruskráseting í Tórshavnar Kommunu, soleiðis at arbeiðið við at skráseta kann fara í gongd á sumri 2026
- at játtaðar verða kr. 400.000 til arbeiðið av løgukonto 6675 Umhvørvistiltøk o.a. (íløgur) á nýggja verkætlan – Skráseting av náttúrusløgum.

  at beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. mars 2026:** Í sambandi við fíggjarætlanararbeiði varð avtalað, at arbeiði viðvíkjandi skráseting av náttúrusløgum skuldi uppraðfestast við 1 mió. kr. Í fíggjarætlanini fyri 2026 er henda milliónin endað á íløgukonto 8175 Vegir. Neyðugt er tí at rætta hetta mistak og at flyta hesa milliónina á konto 6610 Umhvørvistiltøk o.a.

Tilmæli verður tí broytt til soljóðandi:

Tekniski stjórin og leiðarin á Umhvørvisdeildini mæla til:

- at seta "stig 2" í verk, av náttúruskráseting í Tórshavnar Kommunu, soleiðis at arbeiðið við at skráseta kann fara í gongd á sumri 2026.
- at játtaðar verða kr. 400.000 til arbeiðið av konto 6610 Umhvørvistiltøk o.a.
- at kr. 1 mió. verða fluttar av løgukarmi LK81999 Vegaverkætlanir undir konto 8175 Vegir, á konto 6610 Umhvørvistiltøk o.a.
- at beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Anja Weyhe, tekur undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir til avgerð sína 2. juni 2025.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen, tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við fyrstu viðgerð við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Elin Heðinsdóttir Joensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 309<br><br>Forkvinnunnar merki: |

# 89/26 Dagføring av burturkastgjøldum 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 10.03.2025 | 14/25 | 25/03368-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 44/25 | 25/03368-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 87/25 | 25/03368-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.02.2026 | 14/26 | 25/03368-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.03.2026 | 22/26 | 25/03368-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.03.2026 | 64/26 | 25/03368-1 |
| 7 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 89/26 | 25/03368-1 |

**Upprunin til málið**
Kommunala Brennistøðin stendur fyri umfatandi umvælingum og dagføringum, soleiðis at hon kann nøkta tann tørv, sum er í dag og komandi árini.

Alt burturkastøkið skal sum heild mennast við meira skiljing, soleiðis at vit koma at endurnýta og endurvinna meira og at brenna og tyrva minni.

Eisini skulu vit rokna við herdum krøvum frá myndugleikum.

Alt hetta kemur at gera, at kommunan framyvir skal seta væl meira pening av til rakstur av burturkastøkinum, og ein partur av fíggingini kann koma frá at dagføra burturkastgjøld og burturkastbólkar.

**Lýsing av málinum**
Burturkastgjøldini hjá Kommunalu Brennistøðini eru ikki dagførd síðani 2012, og tí er neyðugt at gjøldini vera regulerað soleiðis, at tey fylgja almenna prísstøðinum í restini av samfelagnum.

Prísstøðið í samfelagnum er, sambært Hagstovuni, hækkað 18,39 % frá 2012 til 2024, og harafturat er kostnaðarstøðið sum heild hækkað nógv seinastu árini – so sum lønir og onnur føst gjøld, og verður tískil ein samlað príshækkan uppá uml. 25 % av mestsum øllum gjøldum viðmælt, sí skjal 25/03368-2.

Gjøldini eru ásett soleiðis, at tey samsvara nøkulunda við gjøldini hjá IRF. Talan er um gjøld, sum vinnan skal rinda fyri at koma av við sítt burturkast.

Um vit taka útgangsstøði í nøgdunum frá 2024, og prísstøðið á burturkastgjøldunum verður hækkað við uml. 25 %, sum ætlanin er – so kemur tað at skapa eina árliga eykainntøku til Kommunalu Brennistøðina uppá uml. kr. 2,25 mió.:

| | |
|---|---|
| Hækkan av inntøku | 2.248.792 |
| | |
| Brennistøðin | 1.182.113 |
| Moldplássið | 315.405 |
| Endurnýtslan | 751.275 |

Broytingin í burturkastgjøldunum kemur at ávirka vinnuna, soleiðis at hesi koma at gjalda meira fyri at sleppa av við sítt burturkast.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Kunngerð 147 frá 18. okt 1995 um burturkast, har tað sambært § 16 sigur, at fyri handfaring av burturkasti kann Kommunustýrið áseta eitt gjald eftir góðkenning frá Føroya Landstýri.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
2012-0304 Reglugerð um skráseting og gjald fyri gjaldskyldugt burturkast
2012-0367 Ásetan av burturkastgjøldum
19/04775 Dagføring av burturkastgjøldum

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
25/03368-2 Uppskot til dagføring av burturkastgjøldum og -bólkum
25/03368-3 yvirlit yvir hvat dagføringin kemur at merkja fíggjarligt

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á Umhvørvisdeildini og leiðarin á Brennistøðini mæla til, at nevndin tekur undir við at dagføra burturkastgjøldini hjá Kommunalu Brennistøðini, sambært skjali 25/03368-2 og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 10. mars 2025:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Annita á Fríðriksmørk, tekur undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen, Høgni Vilhelmsen og Guttormur í Skála, tekur undir við meirilutanum í náttúru- og umhvørvisnevndini við teirri broyting, at prísirnir hækka við prístalsjavningini á 18 % nú, og at prísirnir fyri komandi ár verða viðgjørdir í sambandi við viðgerðina av fíggjarætlanini fyri 2026. Màlið beint í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við uppskotinum til dagføring av prísunum við teirri viðmerking, at prísirnir hækka alt ov nógv.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Sunnvá Dahl Høgfeldt, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen.

**Ískoyti:**
Burturkastgjøldini vóru seinast dagførd í mars 2025, tá varð samtykt at hækka gjøldini 18 %.

Mælt varð til at hækka gjøldini 25 %, harav 18,39 % vegna hækkandi prísstøðið í samfelagnum (sambært Hagstovu Føroya frá 2012 til 2024), umframt at kostnaðarstøðið sum heild var nógv hækkað seinastu árini.

Uppskotið til hækkan er skjal 25/03368-2.

Við útgangsstøði í burturkastnøgdunum í 2024, so kemur ein hækkan av burturkastgjøldunum, sambært uppskotinum j.nr. 25/03368-2, at skapa eina árliga eyka inntøku til Kommunalu Brennistøðina uppá kr. 77.335, fyri hvørt % sum gjøldini hækka.

Um gjøldini verða hækkaði 7%, so kemur hetta at geva eina eyka inntøku uppá íalt kr. 541.349 fyri eitt ár.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á Umhvørvisdeildini og leiðarin á KOB mæla til:
- at nevndin tekur undir við at dagføra burturkastgjøldini hjá Kommunalu Brennistøðini, sambært skjali 25/03368-2, sum gevur eina hækking uppá 7% í mun til hvat gjøldini eru í dag.
- at inntøkurnar, sum koma frá at dagføra burturkastgjøldini, verða nýttar til, at Endurnýtslan hevur ein tíma longri opið 2 dagar um vikuna og til útreiðslur í sambandi við at tøma skiljistøðir í grannaløgum.
- at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. februar 2026:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Tað eru settir fram spurningar um ymiskt á Brennistøðini, harundir um raksturin hjá brennistøðini, kostnaðin av at betra um upplatingartíðirnar, og hvat vinnulívið segði, tá gjøldini vórðu hækkað seinast. Hesir spurningar eru svaraðir í notati, skjal nr. 25/03368-9, sum er hjálagt.

**Tilmæli**
Víst verður til undanfarna tilmæli.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. mars 2026:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Anja Weyhe, tekur undir við, at gjøldini verða hækkað 3 %.

Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beinir málið í býráðið.

Høgni Vilhelmsen tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Elin Heðinsdóttir Joensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

# 90/26 Tórshavnar havn - broyting í reglugerð fyri bátapláss á landi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 10.03.2026 | 17/26 | 26/01955-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.03.2026 | 65/26 | 26/01955-3 |
| 3 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 90/26 | 26/01955-3 |

**Upprunin til málið**
Uppskot frá bátaumsjónarmanninum grundað á royndir frá rakstri av bátaplássunum í Álakeri.

**Lýsing av málinum**
Tað er vorðið ov trongt á bátaøkinum á landi, serliga í Álakeri. Summir báteigarar hava nú bíða 3 mánaðir at sleppa upp.

Nú eru 200 bátar komnir aftrat í Álakeri, og økini í Álakeri og á Argjum til bátar á landi, er stórt sæð tað sama í tali.

Fleiri bátar eru langt síðani lidnir, men menn tíma ikki at koyra bátin á sjógv fyrr enn veðrið verður betri.

Uppskotið er at broyta reglugerðina, so møguleikin at standa ókeypis á økinum í tíðarskeiðnum frá 1.desember til 30.mars, bert verður galdandi fyri føroyskar bátar úr timbri og aðrar bátar úr timbri.

Orsøkin kann man siga er, at tá ásetingin um, at bátar kunna standa ókeypis á økinum í tíðarskeiðnum frá 1.desember til 30.mars upprunaliga bleiv gjørd, varð serliga hugsa um føroyskar bátar, sum høvdu tørv á at kunna skifta seym og borð o.a, og hetta tók tíð. Hinvegin tekur tað ikki eins langa tíð at gera viðlíkahald á bátar úr plasti.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Reglugerð fyri bátapláss á landi frá 1. juli 2023.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
J.Nr. 26/01955-2 : Reglugerð fyri bátapláss 2026 – uppskot2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 314 |
| | Forkvinnunnar merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til at taka undir við uppskoti til broyting í reglugerðini fyri bátapláss á landi, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 10. mars 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2026:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Einmælt samtykt.

# 91/26 Koblingstøð til Eysturbýin og havnaøkið - 21/04720

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.03.2025 | 40/25 | 25/03083-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 10.03.2025 | 12/25 | 25/03083-1 |
| 3 Havnanevndin | 11.03.2025 | 16/25 | 25/03083-1 |
| 4 Havnanevndin | 04.11.2025 | 48/25 | 25/03083-1 |
| 5 Havnanevndin | 17.02.2026 | 4/26 | 25/03083-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.03.2026 | 78/26 | 25/03083-1 |
| 7 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 91/26 | 25/03083-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.03.2026 | 80/26 | 25/03083-1 |

**Upprunin til málið**
Hetta málið er framhald av málinum: j. Nr. 21/04720 - *Staðseting av trimum koblingarstøðum hjá SEV.*

SEV søkti um at fáa Tórshavnar kommunu at koma við staðsetingum til teirra at byggja nýggjar streymkoblingarstøðir (eisini kallað trafo-støð, ella sub-statión) í sambandi við ein vaksandi streymtørv í Tórshavnar býi. Ein av teimum trimum staðsetingunum er ikki funnin enn, og tað hevur verið nógv samskifti aftur og fram um, júst hvar hendan koblingarstøðin skal staðsetast.

Tað er økti streymtørvurin hjá virksemi og húsarhaldum í Eysturbýnum og á Eystara Havnarlagi, sum henda koblingarstøðin skal nøkta, og tískil er neyðugt, at Tórshavnar kommuna vísir á eina staðseting í hesum nærumhvørvinum, har SEV kann fara undir at byggja.

Síðani 2021 er málið um at finna hesa staðsetingina sent aftur og fram millum Teknisku nevnd, Havnanevndina og Byggi- og býarskipanarnevndina. Eingin loysn varð tá funnin, sum hesir báðir seinnu partarnir vóru nøgdir við.

Sum nevnt er omanfyri, so var hetta upprunaliga partur av einum størri máli um at staðseta tríggjar ymiskar koblingarstøðir í kommununi, og til tess at halda málið so greitt sum gjørligt, so kann ein úrvaldur samandráttur av tí, sum er farið fram í málinum um júst hesa koblingarstøðina lesast í viðhefta skjalinum: *Tilgongdin í málinum – samandráttur*, j.nr. 25/03083-5.

Upprunaliga málslýsingin við øllum trimum koblingarstøðunum kann lesast her: *Upprunalig málslýsing - Staðseting av trimum koblingarstøðum hjá SEV*, j.nr. 25/03083-6

**Lýsing av málinum**
Elektriskar koblingarstøðir eru ómannaðir innilokaðir bygningar, har streymlinjur við háspenningi verða leiddar inn, og har spenningurin síðani verður umlaðagur, og greinaður út aftur sum veikari streymlinjur.

Ein koblingarstøð hevur tørv á sløkum 360m² í grundvídd, og eini hædd á 5,5m, innanveggja.

Dømi um ein tílíkan bygning sæst á viðheftu myndini úr Ánunum í Norðoyggjum. (sí viðhefta skjalið: *Dømi um koblingarstøð í Ánunum,* j.nr. 25/03083-2

Talan er so statt um ein bygning, sum á leið hevur somu stødd sum Havnar kirkja (350m²), uttan mønureising og torn sjálvandi.

Tað er sera torført at flyta eina koblingarstøð í framtíðini, eftir at hon er bygd og tikin í nýtslu.

Sambært teknisku fyrisitingini hjá SEV er verandi streymveitingarkervið, sum veitir streym til Eysturbýin og Eystara havnarlagið ov gamalt, og megnar illa at nøkta verandi (og vaksandi) streymnýtslutørvin í býnum. At staðseta og byggja eina nýggja koblingarstøð er tískil alneyðugt.
Eitt nú kann nevnast, at um Tórshavnar Havn skal hava møguleika til at veita landstreym til skip, sum í verandi støðu liggja við bryggju og brúka dálkandi ljósmotorar, so má el-kervið útbyggjast og fyrireikast til tað við eini nýggjari koblingarstøð.

Tá partur av veitingarkervinum skal nýtast til eystara havnarøkið, vil SEV staðiliga mæla til, at staðsetingin liggur innan fyri eitt frástøðumark á 300m frá Skansanum.

Ymsar staðsetingar hava verið umrøddar, har SNA arkitektar, sum er ráðgevin hjá SEV, hava verið við í tilgongdini. Niðurstøðan frá teirri tilgongdini við SEV, SNA og Býarskipanardeildini var eitt uppskot um at gagnnýta kommunala parkeringsøkið yviri við Strond við Hotel Havgrím (á matr.nr. 651b) til endamálið.

Í staðin fyri at økið stendur sum eitt óskipað og óplanerað parkeringsøki, sum í verandi løtu, varð mælt til, at økið:

1. Framhaldandi verður greidligari skipað sum eitt alment parkeringsøki.

2. Og at ein almennur útsýnispallur eisini verður bygdur upp í syðra enda á økinum. Koblingarstøðin verður so innbygd undir útsýnispallinum.

SNA Arkitektar, hava teknað eitt uppskot av hesum, har tey m.a. vísa á fylgjandi møguleikar:

- At 58 almenn parkeringspláss kunnu fáast burtur úr økinum, við at skipa tað betri.
  Í verandi løtu kunnu bert 52 bilar standa her. (hetta er íroknað tey parkeringsplássini, sum eru á tí uppatliggjandi kommunala matriklinum, matr.nr. 651l, sum Hotel Havgrím nýtir til sítt hotellvirksemi.
  Orsøkin til at fleiri parkeringspláss fáast við hesum uppskotinum enn í verandi løtu er, at planeringin verður víðkað nakað oman ímóti fjørðugrótinum við eini brimverju.
  Um hendan víðkanin skal gerast sambært hesi ætlanini, verður farið í eina tilgongd saman við viðkomandi friðingarmyndugleikum.

- At tað fer framhaldandi at vera pláss til eina omankoyring til eina møguliga útbygging av havnarlagnum ígjøgnum hetta økið, um tað verður raðfest eina ferð í framtíðini.

Uppskotið kann síggjast í viðhefta skjalinum: *Uppskot koblingarstøð SNA_matr651b*, j.nr. 25/03083-3

Uppskot um hvussu ein atkomuvegur til eitt útbygt havnalag møguliga kann renna ígjøgnum hetta økið, kann somuleiðis síggjast í viðhefta skjalinum: *Atkomuvegur og brúgv útbygt havnalag*, j. nr. 25/03083-7

Uppskotið legði annars upp til, at verkætlanin verður uppbýtt soleiðis:
SEV skal gjalda fyri alla fyrireiking og bygging av sjálvari koblingarstøðini við neyðugum leiðingum.
SEV ábyrgist fyri, at tað, sum tey byggja, verður nóg væl tryggjað ímóti brimi og veðri annars, tí her kann vera uppgangur og veðurhart.
At SEV ábyrgist fyri, at tekjan á koblingarstøðini verður bygd, so at hon kann nýtast sum alment uppihaldsøki við góðum atkomumøguleikum og girðing, ið lýkur øll hugsandi trygdarkrøv. Avtala kann síðani gerast um viðlíkahald av innbúgvi osfr.
SEV góðtekur, at býararkitekturin setir ávís krøv til útsjónd og tilfarsval á bygninginum, sum SEV byggir.

At skipanin av parkeringsøkinum rundan um koblingarstøðina er ábyrgdin hjá Tórshavnar kommunu, og hon ynskir at fremja hendan partin.

Tá hetta varð umrøtt saman við verkætlanarleiðsluni hjá SEV, vóru tey jalig um hendan uppbýtingarleistin.

**Niðurstøða**

Býarskipanardeildin metir, at tað er alneyðugt at taka um endan á hesum staðsetingarmálinum, so at tær neyðugu ábøturnar kunnu gerast á streymveitingarkervið skjótast gjørligt.

Býarskipanardeildin metir tískil, at staðsetingin á kommunala parkeringsøkinum við Hotel Havgrím (á matr.nr. 651b) Yviri við Strond eigur at vera tikin upp aftur til umrøðu í Byggi- og býarskipanarnevndini.

Hesin møguleikin kundi tá verið viðgjørdur sum ein skilagóður møguleiki at gagnnýta ein slíkan bygning hjá SEV sum eitt alment uppihaldsøki við einum útsýnispalli, umframt at verið ein møguleiki til at menna og fríðka hetta óskipaða almenna parkeringsøkið í býnum.

Skoytast kann uppí, at um arbeitt verður víðari við hesi staðsetingini, ber sjálvsagt til at gera ymsar tillagingar í uppskotinum leypandi.

Ætlanin er t.d. at grannar verða partshoyrdir í málinum, har samskiftast eisini kann um møguligar tillagingar í byggiverkætlanini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri umráðispart B6 í 3. grundumráði eru galdandi fyri hetta økið.
Umráðisparturin verður lagdur til vinnuvirkir, verksmiðjur, goymslur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi. Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 5 til 7 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

Í hesum førinum er tó ikki talan um dálkandi virksemi.

Náttúruverndarmyndugleikar og friðingarmyndugleikar skulu hoyrast í sambandi við ætlaða bygging á staðnum, av tí at bygt verður nær sjóvarmálanum.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Í mun til viðmælda frástøðu frá eitt nú sethúsabygging ella øðrum býarvirksemi sigur SEV seg ikki seta nevniverd trygdarkrøv til staðsetingina av eini slíkari koblingarstøð hjá teimum. Nakað av óljóði verður av virkseminum (70Db), men hetta kann ljóðdoyvast í bygginginі, og tað eigur Tórshavnar kommuna eisini at seta krøv til í hesum sambandi.

Tveir transformarar koma ætlandi at standa inni í bygninginum, sum innihalda olju, (7.500 litrar pr. eind) men Byggimálsdeildin hjá Tórshavnar kommunu metir ikki, at serlig frástøðukrøv eiga at verða sett, út yvir vanligu 5m frástøðuna frá húsaveggi til húsavegg, tá hugsað verður um, at talan er um ein rættiliga lokaðan betongbygning.

Byggimálsdeildin viðmerkir eisini, at umframt at samskiftast skal við náttúruverndarmyndugleikar og friðingarmyndugleikar, eigur partshoyring hjá grannum eisini at verða gjørd í hesum málinum.

**Skjøl**
*Dømi um koblingarstøð í Ánunum,* j.nr. 25/03083-2
*Uppskot koblingarstøð SNA_matr651b*, j.nr. 25/03083-3
*Tilgongdin í málinum – samandráttur*, j.nr. 25/03083-5.
*Upprunalig málslýsing - Staðseting av trimum koblingarstøðum hjá SEV*, j.nr. 25/03083-6
*Atkomuvegur og brúgv útbygt havnalag*, j. nr. 25/03083-7
*Uppskot koblingarstøð SNA juli2023*, j. nr. 25/03083-8

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | **Býráðsfundur**<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 318 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | x | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at koblingarstøðin hjá SEV verður staðsett á matr.nr. 651b, við útgangsstøði í viðhefta skitsutilfari, og at umsitingini verður heimilað at arbeiða víðari við málinum, og at beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd og havnanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 10. mars 2025:** Nevndin samtykti, at heita á umsitingina um at kanna aðrar møguleikar fyri staðseting, vísandi til áður viðgjørda mál 21/04720, Umsókn um loyvi til staðseting av trimum koblingarstøðum hjá SEV og at koma aftur í teknisku nevnd við málinum viðvíkjandi staðsetingini.

**Havnanevndin 11. mars 2025:** Havnanevndin mælir til at kanna møguleikarnar fyri staðseting á matr.nr. 651i,og í øðrum lagi á matr.nr 651g.

**Ískoyti:**
Í stuttum snýr málið seg um at SEV hevur biðið Tórshavnar kommunu um at finna eina staðseting til eina nýggja koblingsstøð til Eysturbýin og Eystara havnarøkið. Ein koblingarstøð hevur tørv á umleið 360m² í grundvídd, og eini hædd á 5,5m, innanveggja.

Málið er frá 2021, og enn er eingin semja funnin um staðsetingina.

Tórhavnar havn hevur higartil ikki ynskt at koblingsstøðin verður staðsett á Eystara havnarøki, grundað á,
- at koblingsstøðin tekur av plássinum, sum harvið ikki kann brúkast til farmavirksemi.
- alt økið er skipað í samráð við skipafeløgini, sum brúka hvør sín part av økinum.
- at koblingsstøðin ikki kann flytast og harvið bindur økisinnrættingina í áratíggjur og kann tískil avmarka møguleikarnar fyri at gera broytingar av økinum.

Tó hevur ein nýggjur møguleiki nú stungið seg upp fyri eini staðseting úti á havnaøkinum, sum Tórshavnar havn kann viðmæla. Umboð fyri Faroe Ship hevur upplýst, at Faroe Ship hevur ynski um at flyta verandi vaskipláss út um komandi ISPS hegnið.
Um vaskiplássið verður flutt, og verandi øki harvið gerst tøkt, broytir tað støðuna og letur upp fyri einum møguleika fyri at staðseta eina koblingsstøð á økinum. Hetta tí at hetta økið liggur soleiðis fyri, at ein koblingsstøð har ikki fer at órógva flutning av bingjum v.m., og heldur ikki ávirkar ella avmarkar møguleikarnar fyri innrætting ella broytingum av økinum stórvegis.
Tórshavnar havn metir tí, at koblingsstøðin kann staðsetast har ið verandi vaskipláss nú er staðsett. Staðsetingin krevur tó samtykki frá SEV, umframt at samráðast má við Faroe Ship um treytir og møguligt endurgjald í sambandi við at flyta vaskiplássið.

Samanumtikið kann sigast, at
- onnur staðsetingaruppskot higartil ikki hava borið á mál
- málið hevur skund, serliga fyri SEV, men eisini fyri Tórshavnar havn og kommununa sum heild

- hetta uppskotið er væl betri fyri Tórshavnar havn enn onnur uppskot til staðsetingar á havnaøkinum, sum áður hava verið frammi
- mett verður ikki, at hendan staðsetingin avmarkar farmaflutningsvirksemi ella framtíðar menningarmøguleikar á økinum stórvegis.

**Skjøl**
J.Nr. 25/03083-25 : Koblingsstøð - Skansabryggjan

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi ískoyti, mælir stjórin í Tórshavnar havn til,

- at bjóða SEV at staðseta koblingsstøðina har ið verandi vaskipláss hjá Faroe Ship er í løtuni.
- at samráðast við Faroe Ship um treytir og møguligt endurgjald í sambandi við at byggja eitt nýtt vaskipláss.
  At beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina til kunningar.

**Havnanevndin 04. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina til kunningar.

**Ískoyti**
Tórshavnar havn hevur havt samskifti við SEV og Faroe Ship um staðseting úti á Skansabryggjuni, á økinum hjá Faroe Ship. Ymsar staðsetingar á hesum øki eru «trýstroyndar», men tað hevur tó víst seg av vera avbjóðandi at finna eina nøktandi loysn fyri allar partar í hesum økinum.

Tórshavnar havn hevur tí hugt aftur eftir økinum inni á eystaru bryggju, sum upprunaliga varð samtykt í 2022 (t.e. útnyrðingshornið á øki 4 sambært heildarætlan), og metir, at koblingsstøðin kann staðseting á økinum, har ið pakkhúsið hjá Smyril Line stendur í dag.

Økið 4 varð tó vrakað aftur í 2022, tí at farmavirksemi hjá Smyril Line skuldi halda áfram í hesum økinum, inntil klárt var at flyta út í nýggja farmahøll á molanum, sum tá skuldi standa liðug í 2024. Tørvurin á koblingsstøð var (og er!) átrokandi og sagt varð tá, at neyðugt var at fáa byggiloyvi til koblingsstøðina ultimo 2022, og tí var ikki pláss at staðseta koblingsstøðina í hesum øki tá, og økið var tí vrakað.

Men nú eru 3-4 ár farin, og verður nýggja farmahøllin hjá Smyril Line væntandi liðug í hesum árinum, t.e. á heysti 2026, soleiðis at Smyril Line kann flyta av økinum og úr pakkhúsinum á eystaru bryggju um ársskiftið 2026/2027.

Projektering og fyrireiking av eini koblingsstøð tekur í minsta lagi ½ ár uttan mun til hvør staðseting verður vald, so tí verður ikki stórvegis munur á tíðarætlanini fyri, nær koblingsstøðin kann verða liðug, um hon verður staðsett á eystaru bryggju heldur enn úti á Skansabryggjuni.

Tórshavnar havn metir, at staðsetingin á eystaru bryggju er til fyrimuns fyri allar partar í mun til staðsetingina úti á Skansabryggjuni.

Faroe Ship missir ikki nakað økið og logistikkur og trygd á økinum hjá Faroe Ship verður ikki ávirkað. Tórshavnar havn sleppur tí eisini undan at byggja nýtt vaskipláss til Faroe Ship ella rinda endurgjald fyri tað.

Fyri SEV er staðsetingin á eystaru bryggju eisini betri enn á Skansabryggju. Fyrimunurin fyri SEV er m.a., at tað ikki skulu dragast 60 kV kaðalar heilt út á Skansabryggjuna og 10 kV kaðalar innaftur, tí tað eru longu lagdt 10 kV kaðalnet á Skansabryggjuni. Ein annar fyrimunur er, at á eystaru bryggju vil støðin liggja púra vard móti brimi.

Fyri Tórshavnar havn merkir hendan staðsetingin, at pakkhúsið, ið Smyril Line leigar frá Tórshavnar havn, má takast niður, so skjótt sum Smyril Line er flutt í nýggju farmahøllina á molanum. Pakkhúsið er tó í so

ringum standi, at neyðugt vildi verið at høvuðsumvælt tað, um tað skuldi verið nýtt framyvir, og tí er hesin missurin ikki stórur.

Tá ið økið kring nýggja bygningin «Molan» verður liðugt skipað, missir SSL nakað av øki, sum tey brúka til farm, vognar og bingjur, ið kemur og fer við Smyrli. Ætlanin er, at SSL framyvir í staðin skal nýta eitt øki millum ætlaðu koblingsstøðina og eystaru bryggju til hetta endamál, og tí hóskar ætlaða staðsetingin eisini væl við hesi ætlan.

**Skjøl**
J.nr.: 25/03083-27 : Kortskjal koblingsstøð Eystara bryggja.

**Tilmæli**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til, at koblingsstøðin hjá SEV verður staðsett á eystaru bryggju, á økinum har ið pakkhúsið hjá Smyril Line er, og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina til kunningar.

Eisini verður mælt til, at Tórshavnar havn arbeiðir víðari við málinum, herundir at fyrireika niðurtøku av pakkhúsinum og at gera uppskot til leigusáttmála við SEV um økið.

**Havnanevndin 17. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina til kunningar. Nevndin mælir eisini til at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mars 2026:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mars 2026:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Einmælt samtykt.

# 92/26 Umsókn um leigu av øki til eina goymsluhøll á matr. nr. 230a hjá Tórshavnar havn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 17.02.2026 | 7/26 | 25/10660-2 |
| 2 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 92/26 | 25/10660-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá IR lastbilum.

**Lýsing av málinum**
IR Lastbilar søkir í telduposti dagfestur hin 2. desember 2025 um byggiloyvi til høll á havnarlagnum á Langasandi í Kollafirði, á økinum millum gamla Langasands Timburhandil og "grøna pakkhúsið". Upplýst verður í umsóknini, at høllin ætlandi verður umleið 16m x 40m til støddar, og at hæddin verður 6,5m.

Í umsóknini verður upplýst, at høllin skal brúkast sum goymsluhøll. IR lastbilar hevur í telefonsamrøðu upplýst, at talan er bæði um goymslu til verandi virksemi (lastbilavirksemi), og til goymslu av salti í sekkjum vegna GC.Rieber.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið, sum ætlanin er at byggja høllina á, er sambært galdandi byggisamtykt B2 Havnaøki, ið er ætlað til: *"Umráðisparturin verður lagdur til vinnuendamál, ið hava samband við skipaferðslu og fiskiskap og til virksemi, ið hava samband við hesi, t.e. skrivstovur, tænastuvirksemi, bilstøðlar og tílíkt."*

**Upplýsingar frá umsitingini**

Tórshavnar havn skal í hesum máli, sum eigari av økinum, taka støðu til, um umsøkjarin skal fáa tilsøgn um leigu av øki til ætlaðu bygginginа, meðan tað er kommunali byggimyndugleikin, ið skal viðgera og taka støðu til sjálvt byggiloyvið. Støðutakanin eigur m.a. at grundast á, hvørt ætlaða viksemi ella endamálið við høllini er í tráð við galdandi økisásetingar (byggisamtyktina); um virksemi verður mett at hóska til økið, herundir verandi virksemi og ætlanir fyri økið; og um virksemi annars kann verða eitt gott íkast til havnaraksturin.

IR lastbilar søkti eisini í 2021 um loyvi til at byggja eina høll á sama stað. Umsóknirnar eru nærum meinlíkar, tó er breiddin nú minkað úr 20 til 16 m, og nú er endamálið tilskilað at vera goymsluhøll (salt og lastbilavirksemi).
Í 2021 varð skrivað soleiðis í málslýsingini:

"IR Lastbilar er lastbilafyritøka, og væntast kann tískil, at høllin skal nýtast til umvælingar o.t., ið ikki er í samsvari við galdandi byggisamtykt.
Økið beint innanfyri økið, har ið IR Lastvognar vil sleppa at byggja høllina, er eitt "B3 Vinnuøki", ið sambært byggisamtyktini er ætlað *:"til smá vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt og tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi."*
Byggisamtyktin fyri hetta økið bleiv broytt í 2017 frá B2 Havnaøki til B3 Vinnuøki fyri júst at staðfesta, at virksemið, sum hoyrir til B3 ikki skal breiða seg longur út á havnaøkið.
Virksemið hjá IR lastbilum hevur tó eftirhondini breitt seg um ein stóran part av havnaøkinum á Langasandi. IR Lastvognar leigar góðar 5200 $m^2$ frá Tórshavnar havn til parkering av lastbilum v.m., umframt góðar 2500 $m^2$ til sandgoymslu.
Tórshavnar havn metir ikki at tað eigur at verða meiri lastbilavirksemi á havnaøkinum. Økið eigur heldur framvegis at verða avlagt (reserverað) til eitthvørt virksemi, ið hevur samband við skipaferðslu, fiskivinnu ella virksemi, ið hevur samband við hesi, soleiðis sum byggisamtyktin ásetur.

Verður bygging loyvd til virksemi, ið ikki er í samsvar við byggisamtyktina, so vendist ikki aftur, um tørvur einaferð verður á økinum til viðkomandi virksemi innan skipaferðslu ella fiskivinnu."

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
J.nr. 22/00101 : IR Lastbilar : Umsókn um byggiloyvi til høll á Langasandi í Kollafirði

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu
Kortskjal

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Stjórin í Tórshavnar havn mælir frá at geva IR Lastbilum tilsøgn um leigu av øki til ætlaðu høllina, vísandi til, at virksemið ikki verður mett at vera í samsvari við galdandi økisáseting.

**Havnanevndin 17. februar 2026:**

Heðin Mortensen og Anja Weyhe taka undir við tilmælinum.

Kári Johansen og Birgir Nielsen taka ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Atkvøtt varð um at beina málið aftur í havnanevndina, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, fýra atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Elin Heðinsdóttir Joensen, Guttormur í Skála og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

# 93/26 Makaskifti av lendi millum matr.nr. 1354a og 1354b,

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.03.2026 | 59/26 | 26/00420-6 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.03.2026 | 67/26 | 26/00420-6 |
| 3 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 93/26 | 26/00420-6 |

**Upprunin til málið**
P/F Byggiveitan hevur í eina tíð verið í samskifti við Tórshavnar kommunu um eina íbúðarverkætlan á matr.nr. 1354a, Tórshavn, Villingadalsvegur 67. Verkætlanin er fevnd av serstøku byggisamtyktini við Villingardalsvegin, sum fevnir um matr. nr. 1357b, 1356 og 1355, 1354a og 1354b, Tórshavn. Sí *skjal nr. 26/00420-9, Serstøk byggisamtykt fyri Villingardalsvegin*.

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við byggiverkætlanina søkir P/F Byggiveitan kommununa um eina umskipan av matrikkulmarkinum (makaskifti) millum matr.nr. 1354a og 1354b.

Makaskiftið fevnir um, at:

- Kommunan letur uml. 250 m² av matr.nr. 1354b, sum verða lagdir afturat matr.nr. 1354a, og
- eigararnir av matr. nr. 1354a lata uml. 250 m² av matr.nr. 1354a, sum verða lagdir afturat matr.nr. 1354b.

*Sí skjal nr. 26/00420-8, Makaskifti matr.nr. 1354a og 1354b, RÆTTAÐ*

Makaskiftið hevur til endamáls at rætta matrikkulmarkið, soleiðis at bygging kann fremjast á matr. nr. 1354a í samsvari við galdandi serstøku byggisamtykt, og ætlaðu byggiverkætlanir í økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

- Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022
    - § 26 ásetir, at smámunaligar flytingar kunnu loyvast uttan sundurbýti, tá virðið ikki fer upp um 50.000 kr.
- Serstøku byggisamtyktini við Villingardalsvegin fyri øki A, ið eru øki ætlaði til hús við í mesta lagi tveimum hæddum, umframt nýttum lofti.
- Kommunustýrislógin § 44, saman við Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn, har § 2, stk. 3 ásetir, at fastogn undir 300 m², sum ikki kann byggjast sjálvstøðugt á, kann seljast uttan alment útboð.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Makaskiftið fevnir um javnstór økir (250 m² hvør), sum liggja í sama øki og eru fevnd av somu serstøku byggisamtykt, men hvør sínum umráðisparti sambært Almennu byggismatyktini – ávikavist A2 og A3.

Vísandi til, at:

- hvør partur er minni enn 300 m², og
- lendið ikki kann byggjast sjálvstøðugt á,

fellur keyp/søla undir undantakið í kunngerð nr. 122. § 2, stk. 3, ið ásetir, at fastogn undir 300 m², sum ikki kann byggjast sjálvstøðugt á, kann seljast uttan alment útboð.

Kommunan hevur ikki biðið um virðismeting av lendinum, tí mett verður, at virðið av lendinum, sum verður latið og móttikið, er javnstórt.

Í næsta stig í tilgongdini av málinum setur kommunan seg í samband við Umhvørvisstovuna um ta praktisku avgreiðsluna, herundir:

- um málið kann avgreiðast sum eitt marknaumskipanarmál, ella
- um tað krevur sundurbýti, skeyti og tinglýsing, áðrenn samanlegging kann fremjast.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *25/02294, Nýggj serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1357b, 1356 og 1355, 1354a og 1354b, Tórshavn*

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

- Málið er viðgjørt í samstarvi millum Stjórnarskrivstovuna, Býarskipanardeildina og Byggimálsdeildini.

Viðmerkingar frá Byggimálsdeildini: Av tí at ætlaðu økini til makaskiftið liggja í hvør sínum umráðisparti sambært Almennu byggisamtyktini – ávikavist A2 og A3 grundumráði – fer makaskiftið at broyta grundarlagið fyri útroknan av byggi- og nýtslustigi á teimum báðum matriklunum, sum verða broyttir. Hetta er orskakað av, at sambært BK17 1A.1.2 verða økir á grundstykkinum, sum liggja í einum øðrum umráði enn tí, har bygt verður, ikki íroknað grundøkjavíddina. Verður makaskiftið framt missa matriklarnir 250 fermetrar hvør í útrokning av byggi- og nýtslustigi: Teir missa teir 250 fermetrarnar, sum teir hvør sær lata til grannastykkið; og teir sleppa ikki at rokna teir 250 fermetrarnar, sum teir hvør sær fáa frá grannatykkinum, uppí sína grundstykkjavídd, tí at heisr fermetrarnir liggja í einum øðrum umráðisparti sambært Almennu byggisamtyktini. Matriklarnir báðir eru tó nóg stórir til at rúma hendan miss, og tí er hendan ásetingin í sjálvum sær ikki til hindurs fyri makaskiftinum.

Tá umsókn verður send Umhvørvisstovuni, sendir Umhvørvisstovan málið til avvarðandi kommunu til ummælis. Tað er sostatt kommunan sjálv, sum skal ummæla málið seinni í tilgongdini. Fyri ikki at skula leggja málið fyri politiska nevnd í fleiri umførum, verður tilmælt, at um Býráðið góðkennir makaskiftið, og at umsitingin verður heimilað at lata Umhvørvisstovuni játtandi ummæli seinni í tilgongdini.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl.**

*Skjal nr. 26/00420-9, Serstøk byggisamtykt fyri Villingardalsvegin*
*Skjal nr. 26/00420-8, Makaskifti matr.nr. 1354a og 1354b, RÆTTAÐ*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:

Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Byggimálsdeildini og býararkitekturin mæla til:

- at umsóknin um sundurbýti í sambandi við makaskifti millum matr.nr. 1354a og 1354b verður gingin á møti, og at umsitingin fer undir at fyrireika málið víðari, og at taka neyðug stig í sambandi við sundurbýti og samanlegging av matriklunum.

- at almenna byggisamtyktin verður broytt samsvarandi makaskifti, soleiðis at “Lendið, sum verður latið,” verður broytt til A2, og “Lendið, sum verður lagt afturat,” verður broytt til A3,
- at umsitingin verður heimilað seinni í tilgongdini at lata Umhvørvisstovuni játtandi ummæli til matrikkulbroytingina
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mars 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 326 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 94/26 Matr.nr. 676g, Tórshavn. Umsókn um loyvi til víðarisølu.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.03.2026 | 70/26 | 26/01686-3 |
| 2 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 94/26 | 26/01686-3 |

**Upprunin til málið.** Eigari av stykkinum hevur sent kommununi umsókn um loyvi til víðarisølu.

**Lýsing av málinum.**

Matr.nr. 676g, Tórshavn. Grundstykkið er óplanerað.

Talan er um eitt grundstykki sum núverandi eigari hevur keypt í fríðari sølu.
Tinglýst skeyti 07.07.2016. Keypsprísur kr. 900.000,00

Upprunaliga er talan um eitt makaskiftisstykki sum Tórshavnar kommuna hevði selt táverandi eigarum við fyribilsskeyti frá 1988 og endaligum skeyti frá 1990.

Ognin er upprunaliga makaskift við aðra ogn, sum er latin Tórshavnar kommunu av útstykkjaranum, og sambært avtalu við útstykkjaran, skuldi Tórshavnar kommuna í sambandi við makaskiftið lata 4 ymiskum eigarum hvør sítt grundstykki afturfyri makaskiftu ognina.
Hóast talan hevur verið um privata útstykking, hevur kommunan tinglýst byrðar á ognina um m.a. víðarisølu og byggifreist.

Býráðið samtykti hin 16. juni 2016, at loyva víðarisølu av grundstykkinum, sum tá varð lýst alment til sølu hjá ognarmeklara.

**Lógir, ásetingar o.a.** Tinglýstir kommunalir servituttir, um millum annað 2 ára byggifreist og at keypari hevur ikki loyvi til at selja stykkið víðari, fyrr enn hús eru bygd á stykkinum.
Sí tinglýstar servituttir 02.01.1991. ( Journal. Nr. 26/01686-5 )

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl:**
26/01686-5 Tinglýstir servituttir.
26/01686-4 Kortskjal.
16/02060. Býráðssamtykt 16.06.2016. Táverandi eigari fekk loyvi til víðarsølu.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. mars 2026 | | Blað nr.: 327 |
| | | Forkvinnunnar merki: |

| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Vísandi til at talan upprunaliga er um eina privata útstykking, og til at kommunan hevur selt ognina í sambandi við makaskifti, og at verandi eigari hevur keypt ognina í fríðari sølu, mælir kommunustjórin býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at loyva víðarisølu av matr.nr. 676g, Tórshavn.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 328 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 95/26 Framflytingar fyri roknskaparárið 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.03.2026 | 72/26 | 26/02479-1 |
| 2 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 95/26 | 26/02479-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært játtanarreglunum hjá Tórshavnar kommunu verða meir- og minninýtslur fluttar fram til komandi ár. Framflytingar skulu játtast sum eykajáttan í býráðnum, tvs. skulu hava tvær viðgerðir.

Meirnýtsla, sum í mesta lagi kann vera 5% av nettojáttanini, verður flutt til næsta ár. Meirnýtsla skal vera burtur innan trý ár.

Minninýtsla, sum í mesta lagi kann vera 10% av nettojáttanini, verður flutt til næsta ár. Um serlig viðurskifti gera seg galdandi, og ynski er at flyta meira enn 10% til árið eftir, kann ein umbøn um hetta sendast avvarðandi fyrisitingarstjóra.

**Lýsing av málinum**
Ársroknskapurin fyri 2025 er gjørdur upp, og gjørt er eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta fram til 2026.

Samlaða framflytingin íroknað Tórshavnar Havn er í alt kr. 112,0 mió. Fyri rakstur er upphæddin kr. 24,3 mió. netto og fyri íløgur kr. 87,7 mió.

Tórshavnar havn hevur harumfamt staðfestar meirinntøkur í 2025 á kr. 11,3 mió. Biðið verður um at fáa hesa upphædd framflutta á íløgukarmin P00.

| | Rakstur | Íløgur | Meirinntøkur |
|---|---|---|---|
| TK | 18,1 mió | 5,9 mió | |
| TH | 6,2 mió | 81,8 mió | 11,3 mió |
| **Íalt** | **24,3 mió** | **87,7 mió** | **11,3 mió** |

Samlaða minninýtslan á rakstrarsíðuni fyri Tórshavnar kommunu frároknað Tórshavnar havn er kr. 6,2 mió. kr. Á § 1,2,5,6 og 7 er talan um minninýtslu, í meðan tað á § 3 og 4 er talan um meirnýtslu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
**Upplýsingar frá umsitingini**
**Onnur mál**
**Lógir, ásetingar o.a.**
**Upplýsingar frá umsitingini**
**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| **Býráðsfundur**<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 329 |
|---|---|
| | Forkvinnunnar merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| Ymiskar | | Framflutt 2025 | Ymiskar | | Játtan 2026 | | 112,0 mió |
| 7410 | TH | Meirinntøkur | 7475 | TH | Íløgukarmur P00 2026 | | 11,3 mió |

**Tilmæli**:
Stjórnin mælir til at játtað framflyting á 24,3 mió. kr. til rakstur og 87,7 mió. kr. til íløgur. Eisini verður mælt til at staðfestar meirinntøkur hjá Tórshavnar havn á kr. 11,3 mió verða fluttar á íløgukarmin P00.

Møguligar broytingar í framflytingum koma við til aðru viðgerð.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

# 96/26 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 48/26 | 26/00100-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 67/26 | 26/00100-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2026 | 73/26 | 26/00100-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 96/26 | 26/00100-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd** Ja ☐ Nei ☐

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Framlagt og góðkent.

# 97/26 Innskriving í forskúla og 1. flokk og grundupptøkuøkir / skúlaumdømir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 04.09.2025 | 49/25 | 25/08236-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 02.10.2025 | 60/25 | 25/08236-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 06.11.2025 | 64/25 | 25/08236-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 186/25 | 25/08236-1 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 27.11.2025 | 74/25 | 25/08236-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 26.11.2025 | 139/25 | 25/08236-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 218/25 | 25/08236-1 |
| 8 Trivnaðarnevndin | 15.01.2026 | 1/26 | 25/08236-1 |
| 9 Trivnaðarnevndin | 12.02.2026 | 13/26 | 25/08236-1 |
| 10 Trivnaðarnevndin | 12.03.2026 | 20/26 | 25/08236-1 |
| 11 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 97/26 | 25/08236-1 |

**Upprunin til málið**
Avbjóðingar við skúlainnskriving skúlaárið 2025/26 og komandi skúlaár.

**Lýsing av málinum**

Innskriving til skúlaárið 2025/26

Innskriving í fyrsta flokk, forskúla og frítíðarskúla í Tórshavnar kommunu er opin frá hálvum desember til hálvan januar, tað árið børnini skulu byrja í skúla. Tá innskrivingin er liðug, verða plássini tillutað eftir galdandi leiðreglum fyri upptøku av børnum í kommunalu fólkaskúlarnar í Tórshavnar kommunu. Undirvísingarskyldan byrjar í august tað árið barnið fyllir 7 ár, og sambært fólkaskúlalógini § 44 fer innskriving í fólkaskúlan fram við ársbyrjan.

Viðvíkjandi næmingatali er lógarbroytingin um 22 næmingar í hvørjum flokki galdandi frá skúlaárinum 2025/26, talið er galdandi fyri fyrsta flokk i ár og verður síðani sett í gildi eftir níggju árum.

Í miðstaðarøkinum í Tórshavnar kommunu var ikki pláss fyri øllum børnunum í teimum skúlum, tey vóru skrivað inn í, og ti var neyðugt at stovna ein flokk aftrat í Tórshavnar kommunu, og tann flokkurin er stovnaður í Sankta Frans skúla. So tey børn, sum upprunaliga ikki fingu pláss í Skúlanum á Argjahamri, í Skúlanum á Fløtum og í Sankta Frans skúla, fingu pláss í Sankta Frans skúla.

Seinni fekk Tórshavnar kommuna frávik frá næmingatalinum, so børnini á Argjum fingu pláss í skúlanum har, og børnini í vesturbýnum fingu pláss í Skúlanum á Fløtum. Neyðugt var kortini at halda fast við eykaflokkin í Sankta Frans skúla, og øll børnini, sum vóru innskrivað í fyrsta flokk í Sankta Frans skúla umframt nøkur aftrat, fingu pláss í skúlanum.

Endaliga næmingatalið er tøkt fyrst í september, so talvan niðanfyri vísir fyribils tøl í fyrstu – og forskúlaflokkunum

| | 1. flokkur | forskúli |
|---|---|---|
| Eysturskúlin | 42 | |
| Hoyvíkar sk. | 40 | |
| Kaldbaks skúli | 6 | 2 |
| Kollafjarðar skúli | 20 | 0 |
| Nólsoyar sk./forsk. líkn. | 1 | 3 |
| Sankta Frans skúli | 54 | 47 |
| Skúlin á Argjahamri | 48 | 44 |
| Skúlin á Fløtum | 70 | 64 |
| Skúlin við Løgmannabre | 47 | |
| Velbastaðar skúli | 10 | |
| Lítliskúli | 10 | 8 |
| tils. | 348 | 168 |

Grundupptøkuøki

Innskriving í forskúla og 1. flokk er skipað út frá einum uppbýti av kommununi í skúlagrundupptøkuøkir. Í leiðreglunum fyri innskriving verður stremba eftir, at børn fáa pláss í skúlanum í teirra grundupptøkuøki, og har tað ikki letur seg gera í einum av grannaskúlunum. Umsitingin kann broyta markið millum grundupptøkuøkini, tá tað ikki er nóg mikið av plássum í einum grundupptøkuøki. Umsitingin hevur tilvitað nýtt heitið grundupptøkuøki og ikki skúlaumdømi, sum verður nýtt í fólkaskúlalógini, og sum hevur strangari áseting um flyting av næmingum og stovnan av eyka flokkum.

Høvuðsendamálið við fólkaskúlalógini og leiðreglunum um innskriving er at tryggja øllum børnum skúlapláss og síðani í øðrum lagi, at børn í einum býarparti so vítt gjørligt fáa skúlatilboð í tilhoyrandi skúla. T.d. fáa børn úr eysturbýnum so vítt gjørligt skúlapláss í Eysturskúlanum.

Skúlaumdømi

Barna og útbúgvingarmálaráðið og Undirvísingarstýrið meta tey størru grundupptøkuøkini ómiðstaðarøkinum sum eitt skúlaumdømi, tvs at kommunan skal veita skúlapláss til øll børn í skúlaumdøminum og útvega eyka skúlastovur um tað er neyðugt.

Tvs at Argir, vesturbýurin, miðbýurin, eysturbýurin og Hoyvík eru eitt skúlaumdømi meðan bygdirnar við bygdaskúlum, Kollafjørður, Kaldbak og Nólsoy eru sjálvstøðug skúlaumdømi.

Í skúlainnskrivingini 2025/26 var støðan tann í miðstaðarskúlaumdøminum, at tað við einum eyka flokki í Sankta Frans skúla var gjørligt at veita øllum næmingum í 1. flokki skúlapláss, við einum hóskandi tali av tøkum plássum. Men, tað var ikki gjørligt at veita øllum børnum á Argjum og í vesturbýnum pláss í teirra heimaskúla.

Avbjóðingar í innskriving og tillaging av grundupptøkuøkjum

Viðgerðin av skúlainnskriving í 1. flokk og møguleikin at gera broytingar millum grundupptøkuøkið er tengd at innskriving í teir forskúlar, ið eru settir á stovn. Í ár var tað í Skúlanum á Argjahamri, Skúlunum á Fløtum og í Sankta Frans skúla. Av tí at børnini sum longu vóru innskrivað í forskúla halda áfram í viðkomandi skúla, vóru bert nøkur fá pláss eftir í 1. flokki á Skúlanum á Fløtum og í Sankta Frans skúla, sum børn í grundupptøkuøkinum høvdu fyrsta rætt til. Tí var ikki gjørligt at broyta markið millum grundupptøkuøkini, soleiðis at møguleiki var at útvega pláss til børn av Argjum í Skúlanum av Fløtum og pláss til børn úr vesturbýnum í Sankta Frans skúla. Við fyritreytini at ein eyka flokkur var settur á stovn í Sankta Frans skúla gjørdist úrslitið, at næmingar av Argjum skuldu innskrivast í Sankta Frans skúla.

Fleiri partar gjørdu var við seg leypi av viðgerðini hjá Mentamáldeidini av innskrivingini. Einstøk foreldur og tveir foreldrabólkar gjørdu vart við, at tað als ikki er nøktandi at foreldur í innskrivingini verða sett í eina tvístøðu har tey kunnu velja 6 ára tilboð frá, fyri at innskriva í forskúla fyri at trygga barninum pláss í 1. flokki, í skúlanum í teirra grundupptøkuøkið.

Skúlastýrið fyri Skúlan á Argjahamri gjørdi saman við skúlastjóranum eisini vart við týdningin av at Argjabørn fáa skúlpláss í nærumhvørvinum og at skúlin vildi viðvirka til ein loysn. Skúlastjórarnir og skúlarnir vóru sum heild sinnaðir at víkja frá næminghámarkinum fyri at loysa avbjóðingina.

Málið av leiðsluni og borgarstjóranum tikið upp við Barna og útbúgvingarmálaráðið ,við tí úrsliti at undantak er veitt frá næminghámarkinum skúlárini 2025/26 og 2026/27. Við hesi broyting var akkurát rásarúm at veita skúlapláss til allar næmingar høvdu innskrivað í forskúla og frítíðarskúla í teirra heimaskúlum.

<u>Barngrundarlag í miðstaðarøkinum og tørvur á eyka 1. flokkum komandi árini</u>

Næsta skúlaár 2026/27 er næmingatalið til 1. flokk á sama støði sum í ár og við undantakinum frá næminghámarkinum,verður aftur tørvur á einum eyka flokki. Í mun til barnatalið í grundupptøkuøkjunum er tørvurin størstur á Argjum og í miðbýnum.

Skúlaárið 2027/28 er næmingatlið til 1. flokk eitt vet hægri enn í ár, men nú verður undantakið frá næminghámarkinum ikki longur galdandi. Tá verður tørvur á tveimum eyka flokkum, einum á Argjum og einum í miðbýnum.

Skúlaárið 2028/29 minkar núverandi næmingatal til 1. flokk við einum flokki. Við tilflyting kann tó gerast tørvur á einum eyka flokki, har tørvurin helst verður størstur í Hoyvík.

Skúlaárið 2029/30 Minkar núverandi næmingatal til 1. flokk aftur. Tilflyting kann tó viðføra tørv á einum eyka flokki, sannlíkt á Argjum

Skúlaárið 2030/31 minkar næmingatalið til 1. flokk munandi og hóast eina javna tilflyting verður møguliga tørvur á einum flokki færri, møguliga í Skúlanum á Fløtum.

Skúlaárið 2031/32 Næmingatalið er framvegis lágt og hóast ein javna tilflyting verður møguliga tørvur á einum flokki færri, møguliga í Sankta Frans skúla.

Samanumtikið er tørvur á einum eyka skúlaspori í miðstaðarøkinum fram til skúlaárið 2029/30, orsaka av lækkingini av næmingahámarkinum. Undantakið frá næmingahámarkinum gevur kommununi eitt neyðugt skotbráð at loysa avbjóðingina.

Minkandi næmingatalið, ið fær ávirkan skúlaárið 2030/31 viðførir tøk skúlapláss, men tað er ein positiv avbjóðing.

<u>Møguligar loysnir</u>

a) Í verandi skipan og eftir leiðreglunum ber til at laga grundupptøkuøkini og gera smærri broytingar í teimum, so mørkini verða lagað eftir mettum tali á børnum í ymsu økjunum, sum hava aldur at fara í forskúla og fyrsta flokk. Hetta eigur at verða gjørt í so mikið góðari tíð, at grundupptøkuøkini verða løgd á heimasíðuna um heystið áðrenn innskriving.

Umsitingin metir ikki, at hetta amboð er nøktandi til at loysa avbjóðingarnar við, at børn búsitandi í einum øki fáa pláss í skúlanum, sum hoyrir til økið. Haraftrat kann tað skapa órógv millum foreldur, sum búgva nærindis marki millum tvey grundupptøkuøki, tí tey okkurt ár hoyra til eitt øki og so árið eftir til eitt annað. Tað kann vera torført hjá teimum at velja, hvønn skúla teirra barn/børn skulu skrivast inn í.

b) Tórshavnar kommuna kann velja at býta plássini út, so foreldrini fáa ávíst eitt pláss í skúla til teirra barn. Plássini verða so ávíst eftir verandi leiðreglum.

Flestu foreldur velja at skriva barnið/børnini inn í skúlan í grannalagnum, hetta so børnini ganga í skúla saman við teimum børnum, sum tey kenna, spæla við og fylgjast til ítrótt og onnur frítíðavirksemi saman við børnum í grannalagnum.

Við tílíkari skipan, hevði umsitingin kunnað roynt at stýrt soleiðis, at børn í sama grannalag fingu pláss í sama skúla, um ikki øll í einum og sama skúla, so at fleiri børn í tínum grannalag gingu í sama skúla sum tú.

Avbjóðingin við hesi skipan er so tann, at atlit verður ikki tikið at ynskjum hjá foreldrum, og at okkurt grannalag verður býtt sundur.

c) Leiðreglurnar fyri upptøku kunnu broytast, so plássini í einum forskúla bert eru til børn, sum búgva í grunduppptøkuøkinum hjá skúlanum.

Eitt barn, sum er skrivað inn í forskúla, er skrivað inn í skúlan og skal ikki skrivast inn av nýggjum. Forskúlar eru ikki í øllum skúlum í Tórshavnar kommunu, og tað ger so tað, at foreldur, sum búgva í grunduppptøkuøkjum, har forskúli ikki er, skriva barnið upp í forskúla í øðrum øki. Eru ikki nóg nógv børn, sum hava systkin í skúlanum ella búgva í økinum skriva inn í forskúla, kunnu børn uttan fyri økið fáa avlopsplássini, og tey verða so skrivað inn í skúlan og halda fram í skúlanum, til tey eru liðug við 9. flokk.

Meira enn helmingurin av børnunum í miðstaðarøkinum verða í dag innskriva í forskúla i Sankta frans skúla, Skúlanum á Fløtum og Skúlanum á Argjahamri.

Ein loysn er, at forskúlar verða skipaðir í øllum fólkaskúlunum í Tórshavnar kommunu, og at fyribils hølisloysnir verða, til allir skúlarnir eru útbygdir til at hýsa forskúla eisini.

Sum støðan er nú, hava øll foreldur í kommununi ikki sama møguleika at fáa pláss í forskúla.

d) møguleiki kundi eisini verið at flutt innskrivingina í 1. flokk eitt ár fram, soleiðis at innskrivingin í forskúla verður løgd tilrættis eftir hvør ið eftir leiðreglunum eigur at hava rætt til 1. flokk. Tað kann gev eina avbjóðing at øll plássini í forskúlanum ikki verða brúkt, tí tey skulu standa tøk til børn ið eru innskrivað til 1. flokk í viðkomandi skúla.

e) Miðstaðarøkið kann verða býtt upp í trý skúlaumdømi, eitt fyri Argir og vesturbýin, eitt fyri miðbýin og eysturbýin og eitt fyri Hoyvik. Soleiðis at Skúlin á Argjahamri og Skúlin á Fløtum hava felags upptøkuøki, Sankta Frans skúli og Eysturskúlin hava felagsupptøkutøki og Hoyvíkar skúli og Skúlin við Løgmannabreyt hava felags upptøkuøki.

Hesi trý øki áttu so at havt ta skipan, at tá ov nógvir næmingar eru til flokkatalið økinum, so verður játtað tímatal til ein flokk aftrat. Tað krevur tó, at Barna- og útbúgvingamálaráðið góðtekur hetta og ikki heldur fast við, at so leingi pláss er í onkrum av skúlunum í miðstaðarøkinum verður ikki játtað til flokkar aftrat.

Krøvini til kommununa verða eisini størri, tí kommunan skal útvega fleiri undirvísingarhølir og raksturin av teimum.

f) Tað kundi verið so mikið rúmsátt í skúlunum, at um ein árgangur í økinum var ov stórur til plássini í skúlanum í økinum, so var møguleiki at stovna ein flokk aftrat til árgangin. T.d. kundu tríggjar skúlastovur verið eyka í hvørjum skúla, so tey árini neyðugt var við einum flokki aftrat í økinum, var pláss í skúlanum.

Her er tó eisini neyðugt, at landsmyndugleikin góðtekur hetta og ikki heldur fast við, at so leingi pláss er í onkrum av skúlunum í miðstaðarøkinum verður ikki játtað til flokkar aftrat.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 336 |
| | Forkvinnunnar merki: |

Fundur við umboð fyri Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Undirvísingarstýrið

Mentamáladeildin hevði ein stuttan fund við umboð fyri BUMR og umboð fyri UVS í juni. Har kunnað varð um avbjóðingar við innskriving sum heild, og avbjóðingarnar sum eru, tí tvær skipanir eru til tey 6 ára gomlu børnini. Forskúli er í nøkrum av skúlunum og 6 ára tilboð í nøkrum av dagstovnunum. Trupulleikin er, at í skúlum har forskúlar eru, velja summi foreldur forskúla fyri at tryggja, at barnið fær pláss í tí skúlanum, sum er í upptøkuøkinum, sum tey búgva í. Í summum førum førdi hetta so til, at ov fá børn vóru til 6 ára tilboð í dagstovni/dagstovnum í økinum, og tilboðið har tí datt niður fyri.

Greitt var eisini frá, at Tórshavnar kommuna ætlar ikki at koma í somu støðu, sum til skúlaárið 2025/26, og ynskir at samskifta við Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Undirvísingarstýrið um loysnir.

Kunnað var eisini um barnatalið í kommununi býtt á upptøkuøkini, og við støði í teimum, var greitt frá, hvussu innskriving væntandi fór at verða komandi árini.

Avtalað varð, at mentamáladeildin kallar inn til ein fund aftur nú eftir summarferiuna.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini mæla til at kanna verður um heimild er í fólkaskúlalógini og um góðkenning fæst frá BUMR at skipa miðstaðarøkið í Tórshavnar kommunu í fleiri skúlaumdømi, fyri at styrkja rættin hjá  børnum til skúlatiboð í nærumhvørvinum.

Somuleiðis verður mælt til at kanna um heimild er at skipa fyri innskrivingin í 1. flokk eitt ár fyrr enn í dag, soleiðis at størri møguleiki er at fáa pláss í 1. fl. hóast barnið ikki gongur í forskúla.

**Trivnaðarnevndin 04. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at leggja málið aftur til trivnaðarnevndin skjótast viðvíkjandi niðurstøðu frá BUMR.

Ein meiriluti: Heidi Lava Elgeirsdóttir, Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen, mælir harumframt til, at Skúlin á Argjahamri verður egið skúlaumdømi.

**Ískoyti:**

**Fundur við Undirvísingarstýrið og Barna- og útbúgvingarmálaráðið**
Umboð fyri mentamáladeildina høvdu fund við umboð fyri Undirvísingarstýrið og umboð fyri Barna- og útbúgvingarmálanráðið um møguleikarnar at skipa økini í miðstaðarøkinum í færri skúlaumdømi og møguleikan at skriva børn inn í fyrsta flokk eitt ár fyrr enn í dag.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið ger vart við, at gundupptøkuøki eru tað sama sum skúlaumdømi, og tað er tað heitið, sum verður brúkt í lógini.

Sambært § 44 stk. 1 fer innskriving í skúlan fram við ársbyrjan. Bæði løgfrøðingur á stjórnarskrivstovuni og landsmyndugleikarnir eru samdir um, at skal hetta broytast, so børn verða skrivað inn eitt ár fyrr, er neyðugt at broyta fólkaskúlalógina. Ynskir Tórshavnar kommuna at skriva børn inn í skúla fyrr, kann hon senda inn ynski um broyting í fólkaskúlalógini.

Viðvíkjandi færri skúlaumdømum og játtan til hvørt umdømi sær, vísti Undirvísingarstýrið á, at ynskti Tórshavnar kommuna fleiri flokkar í ymsu skúlunum, so skal kommunan søkja um ein broyttan skúlabygnað við fleiri sporum, og veðrur umsóknin játtað, so skal kommunan byggja ávísu skúlarnar út til at kunna taka eitt spor aftrat.

Skipanin við færri skúlaumdømum og játtan til hvørt øki sær, krevur sostatt eina stóra íløgu til útbygging til eitt spor aftrat í t.d. Hoyvík, eitt vesturbýnum og eitt á Argjum. Haraftrat varð víst á, at Undirvísingarstýrið og Barna- og útbúgvingarmálaráðið vænta ikki eina hægri játtan til fólkaskúlan nógvu komandi árini, so verða fleiri spor í Tórshavnar kommunu, verður neyðugt at fíggja tey av verandi játtan og taka tað av onkra aðrastaðni á fólkaskúlaøkinum.

**Møgulig broyting í innskriving í forskúla**
Mentamáladeildin, Barna og útbúgvingarmálaráðið og Undirvísingarstýrið eru samd um, at tað eftir fólkaskúlalógini ikki er heimild at framskunda innskriving í 1. flokk.

Kommunan hevur tó møguleika at broyta reglurnar um innskriving í forskúla, so at hon ikki bindur innskriving í 1. flokk meira enn neyðugt og í minni mun birtir undir, at foreldur kenna seg noydd at velja forskúla fyri at fáa pláss í 1. flokki.

Tað kann gerast við at broyta leiðreglurnar fyri innskriving, so tað bert eru børn sum búgva í skúlaumdøminum, ið hava rætt til pláss í forskúlanum í skúlanum í økinum.

Fyri forskúlar verður ein møgulig avleiðing, at tað verða færri børn innskrivað í forskúlan, og tað verða fleiri tøk pláss í 1. flokki árið eftir, sum næmingar við systkjum í skúlanum og aðrir næmingar í skúlaumdøminum hava rætt til, meðan børn úr øðrum skúlaumdømum ikki fáa pláss.

Her skal tryggjast í hvønn mun heimild er at taka burtur møguleikan hjá børnum í ávísum økjum at sleppa í forskúla.

Í longdini fer hetta at minka um talið av børnum úr øðrum skúlumdømum sum hava systkin í skúlanum og harvið rætt til pláss í skúlanum,

Tað kann gerast neyðugt at tryggja forskúlunum eina minimums-normering í sambandi við sveiggj í barnatali og lægri barnatal.

**Færri skúlaumdømi**
**§ 29.** Skúlamyndugleikin á staðnum býtir vanliga sítt øki upp í skúlaumdømi, ið kunnu vera størri fyri skúlans eldru floksstig enn fyri tey yngru, smb. tó § 31, 1. stk. Landsstýrismaðurin kann góðkenna, at eitt skúlaumdømi er felags fyri fleiri skúlar.

**§ 32.** 9) Ein skúlabygnaður skal verða gjørdur fyri fólkaskúlan í kommununi, sbrt. § 47, stk. 6:
1) Navnið á tí einstaka skúlanum. Um so er, at kommunan hevur býtt sítt øki upp í skúlaumdømi, smb. § 29, so skulu nøvnini á umdømunum verða tilskilað. Her kann eisini vera ásett, at smærri umleggingar av umdømunum kunnu verða gjørdar í sambandi við ta árligu innskrivingina.
2) Vavið á tí einstaka skúlanum við atliti at undirvísing í grundskúla, 10. flokki o.ø. eftir § 4.

Í núverandi skúlabygnað er í eitt skúlaumdømi (grundupptøkuøki) fyri hvønn skúla, við undantaki av skúlunum í Hoyvík, sum eru eitt skúlaumdømi, og markið millum skúlarnar er meira flótandi og lagað eftir bústaði hjá teimum børnum, sum er skrivað inn í skúlarnar í Hoyvík júst tað árið.

Skúlaumdømini  eru væl lýst  á heimasíðuni hjá kommununi: Finn skúla - Tórshavnar kommuna

Sambært fólkaskúlalógini § 32 stk 1 ber til at gera smærri umleggingar av umdømunum í sambandi við ta árligu innskrivingina. Í grundini er tað tað, sum Tórshavnar kommuna sambært leiðreglunum ger, tá pláss ikki er fyri øllum børnunum í einum grundupptøkuøki, kann verða neyðugt at flyta barn í annan skúla enn tann, sum er næstur heiminum.

Kommunan stendur fyri tveimum avbjóðingum, og tær eru, so vítt gjørligt at veita pláss til allar næmingar í skúlaumdøminum í tilhoyrandi skúla, og  at tryggja øllum næmingum pláss í skúlabygnaðinum í kommununi.

Lækking av næmingahámarkinum í flokkunum, broytingar í samlaða næmingatalinum og forskjótingar í næmingatalinum millum skúlumdømini seta skúlabygnaðin og umsitingina av skúlainnskriving undir trýst.

Núverandi skúlaumdømir býta miðstaðarøkið upp í økini Argir, vesturbýin, miðbýin,  eysturbýin og Hoyvík. Hóast tað kann verða avbjóðandi, so ber til at umsita økið eftir verandi leiðreglum, har tillagingar kunnu verða gjørdar millum umdømini, um so er, at umsitingin fær frið at arbeið eftir samtyktu leiðreglum.

Færri skúlaumdømir loysa í sjálvum sær ikki hesar avbjóðingarnar, men tað er ein avgerð um eitt leysari mark millum økini og skúlarnar. Um vit taka skúlaumdømini  á Argjum og í vesturbýnum sum dømi, vil tað viðføra, at foreldur á Argjum kunnu ynskja at skriva síni børn inn í Skúlan á Fløtum og foreldur í vesturbýnum kunnu ynskja at skriva síni børn inn í Skúlan á Argjahamri.

Við hesum eru tað foreldrini, ið kunnu ynskja, hvar tey helst vilja hava skúlapláss í tí størra skúladøminum, og umsitingin skal framhaldandi avgreiða innskrivingina eftir galdandi leiðreglum.

Tann grundleggjandi fortreytin fyri at veita pláss í skúlaumdømunum og í einstøku skúlunum er, at tað eru nógv pláss og nóg nógvir flokkar.

**Broyting av skúlabygnaði**
Við stórum ágangum á veg tey komandi árini kann staðfestast, at tørvur er á einum flokki eyka í 1. flokki komandi árini, og einstøk ár verður helst tørvur á tveimum eyka flokkum.

Fyri at loysa hesa avbjóðing er neyðugt at taka støðu til, hvar pláss skulu vera til eyka flokkar, og tað eigur ikki bara at vera gjørt við at útvega pláss til eyka flokkar, men eisini spor. Loysnir, ið ikki bara eru fyri eitt og eitt ár í senn, men eru varandi loysnir, sum so kunnu føra til eyka spor og sostatt broyting í skúlabygnaðinum,

Í mun til teir komandi seks árgangirnar, sum vit kenna og væntaðan fólkavøkstur í ávísum økjum, har núverandi útstykkingar eru, og framtíðar útstykkingar verða, er skynsamt at útvega eitt spor afturat á Argjum og eitt í Hoyvík.

Við undantakinum frá nýggja næmingahámarkinum á 22 næmingar fer væntandi at bera til at veita øllum børnum í 1. flokki komandi skúlaár pláss innanfyri karmarnar á verandi skúlabygnaði. Tó kann tað gerast ein avbjóðing, at tað verða ov fá tøk pláss til komandi tilflyting.

**Greinir í fólkaskúlalógini viðvíkjandi broyting í skúlabygnaði**
**§ 46.** Skúlamyndugleikin á staðnum er kommunustýrið og skúlastýrið smb. § 50, 1. stk.

**§ 47** *Stk. 6.* 2) Kommunustýrið ger uppskot um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum, sbr. §§ 32, stk.1 og 57, stk. 5.

**§ 52.** *Stk. 4.* Skúlastýrið viðger saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum, sbr. § 32, stk. 1. Í teimum kommunum, ið hava tvey ella fleiri skúlastýri, velur kommunustýrið ein arbeiðsbólk, umboðandi øll skúlastýrini, at viðgera uppskot um skúlabygnað, sbr. § 47, stk. 6.

**§ 57** *Stk. 5.* 9) Landsstýrismaðurin góðkennir skúlabygnað kommununnar og tær ítøkiligu undirvísingarætlanirnar fyri teir einstøku skúlarnar og møguligar broytingar í teimum. Landstýrismaðurin kann loyva, at fleiri skúlar í einum øki verða roknaðir sum ein skúli, sjálvt um ikki øll undirvísingarhølini eru savnað á sama staði í økinum.

**Skúlabygnaður í Tórshavnar kommunu**
Ein skúlabygnaður er í Tórshavnar kommunu, hann er tó ikki settur saman í eina heild, men er ein bygnaður fyri einstøku skúlarnar, og er góðkendur so hvørt broytingar hava verið, tað er t.d., tá nýggir skúlar eru bygdir, tá skúlar eru lagdir saman, tá nýggj hádeild er stovnað og tá 7. flokkur er tikin av í tveimum at smáu skúlunum.

Sambært galdandi skúlabygnað er bygnaðurin fyri skúlarnar í miðstaðarøkinum hesin:

| | |
|---|---|
| Skúlin á Argjahamri | Forskúli – 9. árgangur, 2 spor<br>1 sertilboð, Ljósástova, 15 næmingar |
| Skúlin á Fløtum | Forskúli – 6. árgangur , 3 spor<br>7.- 9. árgangur, 4 spor.<br>2 sertilboð, Guliskúli 67 næmingar og Lopfjølin 11 næmingar |
| Sankta Frans skúli | Forskúli – 9. árgangur, 2 spor |
| Eysturskúlin | 1.- 6. árgangur, 2 spor |

| | |
|---|---|
| | 7.- 9. árgangur, 3 spor<br>10. árgangur (Nám X) 207 næmingar<br>Nám X er ikki býtt í flokkar<br>1 sertilboð – Lonin, 16 næmingar |
| Hoyvíkar skúli | Forskúli – 9. árgangur, 2 spor<br>1 sertilboð – Víkin, 17 næmingar |
| Skúlin við Løgmannabreyt | 1.- 9. árgangur<br>Hvør árgangur er ein flokkur (næmingatal upp til 2 spor). |

*Næmingatølini í talvuni omanfyri eru fyri skúlaárið 2025-2026.*

Skúlaumdømi og skúlabygnaður hanga saman, so um Tórshavnar kommuna ynskir, at hava fleiri spor í onkrum av skúlunum er neyðugt at broyta bygnaðin.

**Mannagongd í sambandi við broyting í skúlabygnaði**
Er ætlanin at broyta skúlabygnaðin í Tórshavnar kommunu skal ein arbeiðsbólkur saman við kommunastýrinum gera uppskot um broytingar í honum, og har fleiri skúlastýri eru, velur kommunustýrið ein arbeiðsbólk umboðandi øll skúlastýrini. Í Tórshavnar kommunu eru 10 skúlastýri, og tey skulu so øll hava umboð í arbeiðsbólkinum.

Arbeiðsbólkurin viðgerð uppskot um broytingar, og niðurstøða og tilmæli frá arbeiðsbólkinum verða so løgd fyri trivnaðarnevndina við tilmæli frá umsitingini til støðutakan. Er niðurstøðan, at broytingar verða gjørdar i bygnaðinum, fer málið í býráðið, og verður tað samtykt har, verður umsókn send landstýrismanninum um at góðkenna, at skúlabygnaðurin verður broyttur.

**Niðurstøða**
Einstakir eyka flokkar í skúlum passa ikki inn í bygnaðin fyri skúlan og órógva heildarskipanin í skúlanum øll árini til skúlin aftur hevur eitt flokkatal samsvarandi skúlabygnaðinum fyri skúlan.

Framtíðar næmingatal og útstykkingar geva greiðar ábendingar um at tørvur er á einum og kanska tveimum sporum afturat í miðstaðarøkinum í Tórshavnar kommunu. Við tí sum grundarlag verður mett neyðugt at fara undir eina tilgongd at broyta skúlabygnaðin við einum ella tveimum sporum afturat fyri at sleppa undan órógvandi fyribilsloysnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini mæla til:
a) at arbeiðbólkur umboðandi øll skúlastýrini og umsiting verður settur at gera tilmæli um framtíðar skúlabygnað í miðstaðarøkinum.
b) at umsitingin ger uppskot um arbeiðssetning, sum verður lagdur fyri trivnaðarnevndina á fundinum í novembur
c) at umsitingin kannar fyrimunir og vansar við at broyta leiðreglurnar fyri innskriving í forskúla, soleiðis at bert børn ið búgva í grunduppt økuøkinum hava møguleika at verða innskrivað í forskúlan í økinum, og leggur málið fyri trivnaðarnevndina á fundinum í novembur.

**Trivnaðarnevndin 02. oktober 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Samstundis heitir trivnaðarnevndin á umsitingina, um at arbeiða víðari við møguligum fyribils hølisloysnum.

**Ískoyti:**
Komandi trý skúlaárini verður eins og hetta skúlaárið tørvur á einum eyka 1. flokki í miðstaðarøkinum í Tórshavnar kommunu.

**Fyribilsloysnir**
Trý tey komandi skúlaárini er tørvur á meir enn 13 sporum miðstaðarøkinum.

2026-2027 14 spor, heimild til undantak til 24 næmingar í hvørjum flokki
2027-2028 15 spor, á markinum til 15 spor
2028-2029 14 spor
Síðani lækkar næmingatalið aftur, og sum tað sær út beint nú, eru 13 spor tá nóg mikið. Men vakstrarøkini eru Argir, Hoyvík og vesturbýurin, so tørvurin á eyka spori/sporum verður væntandi í teimum pørtunum av býnum.

Í sambandi við tørvin á eyka fyrsta flokki/flokkum komandi árini hevur umsitingin havt fund við skúlastjórarnar í skúlunum í miðstaðarøkinum. Skúlastjórarnir greiddu frá umstøðunum í teirra skúlum til eyka flokkar, og hvørjir møguleikar vóru at hava eyka flokkar.

Umsitingin vísti á hesar møguleikar:
1. Loysa trupulleikan so hvørt og søkja um eyka flokk, har tørvurin á plássum er størstur. Talan verður tá um bráðfeingisloysnir, og foreldur vita ikki fyrrenn innskrivingin er liðug, í hvørjum skúla eyka flokkur verður.
2. Taka støðu til, at eyka flokkar verða í einum skúla, og hølisloysnin verður góð, so til ber at leggja ætlan nú fyri tey trý komandi skúlaárini, og foreldur fáa at vita, hvar eyka flokkur verður. Haraftrat verða upptøkuøkini lagað til, so tey passa betur til plássini í skúlanum.
3. Bygt verður til eitt spor aftrat, og miðstaðarøkið verður møguliga býtt upp i trý upptøkuøki.

Umsitingin mælir til loysn 2, so foreldur vita, hvar eyka flokkur er, og skúlin veit, at hann hevur eyka flokkar inni hetta tíðarskeiðið og fær skipað seg eftir tí.

Viðmerkingar hjá skúlastjórunum
Skúlin á Fløtum - tað er ikki pláss í Skúlanum á Fløtum til eitt eyka spor, men um góð hølisloysn verður funnin, ber væl til at taka ein eyka fyrsta flokk inn í trý ár á rað, tí tað passar inn í bygnaðin í skúlanum. Tá flokkarnir koma til hádeildina, er eingin trupulleiki, at ein flokkur er aftrat heldur ikki viðvíkjandi hølum. Um ein loysn skal fremjast í Skúlanum á Fløtum, ynskir skúlin eisini ein eyka forskúlaflokk. Skúlin hevur tó ikki eitt brennandi ynski um at fáa eyka flokkar.
Fyri skipanina í skúlanum er tað ólagaligt bert at fáa ein eyka flokk. Tí ynskir skúlin ikki eyka flokk, um tað bara er tað eina árið, at ein eyka fyrsti flokkur verður tikin inn í skúlan.

Sankta Frans skúli - kann eisini taka eyka flokkarnar, men tað er ikki pláss í skúlanum til meir enn ein eyka flokk aftrat. So neyðugt verður at finna góðar hølisloysnir til í hvussu er tveir eyka flokkar. Tó verður neyðugt at finna eina loysn, tá næmingarnir koma í hádeild, tí í bygninginum til hádeildina er bert pláss til tveir flokkar í hvørjum árgangi.

Skúlin á Argjahamri - tað er ikki pláss í skúlanum, men skúlin er sinnaðar at taka eyka flokkarnar, um góð hølisloysn verður funnin. Tað er ábært á Hamrinum, so um fyribilshøli verða sett upp, skal atlit takast at veðrinum, og útiøkið/spæliøkið hjá børnunum er ikki so stórt, so ansast skal eftir ikki at minka um tað.

Eysturskúlin - í Eysturskúlanum er pláss at taka ein eyka flokk inn hvørt ár næstu trý árini, og tað er pláss allan vegin upp av tí, at næmingatalið í eysturbýnum hevur sveiggjað, so í summum av yngru árgangunum er bert ein flokkur og í onkrum árgangi í hádeildini bert tveir.

Hoyvíkar skúli - tað er ikki pláss í skúlanum, men skúlaleiðslan er sinnað at taka eyka flokkar, um høli verða útvegað, so pláss er fyri flokkunum.

Skúlin við Løgmannabreyt var ikki umboðaður á fundinum, men skipanin við stórflokkum ger, at tað er serliga trupult at vaksa skúlan við einum flokki í ávísum árgangum Við nóg stórum eyka hølum hevði tó borið til at býtt 3 flokkar í tveir stórflokkar.

Samanumtikið ber til at taka eyka flokkar inn í skúlarnar í miðstaðarøkinum. Hetta krevur tó eyka hølisloysnir í øllum skúlum uttan Sankta Frans skúla tað eina árið og í Eysturskúlanum í trý ár. Í hinum skúlunum er neyðugt at útvega eyka hølir og harafturat er neyðugt við eyka hølum til frítíðarskúlan, har eyka flokkar verða.

At býta miðstaðarøkið upp í trý skúlaumdømi og byggja út til eitt spor aftrat í hvørjum øki, er neyvan ein realistisk loysn. Ivasamt er, um landsmyndugleikarnir høvdu góðkent eina loysn, sum í grundini kann bera í sær, at tað okkurt árið verða tríggir eyka flokkar í miðstaðarøkinum í Tórshavnar kommunu, hóast næmingatalið tilsamans í øllum økinum ikki er grundarlag fyri hesum flokkum. Haraftrat hevði kommunan skula útbygt skúlar í øllum trimum økjunum, so pláss var til eitt eyka spor í hvørjum øki.

Ein avleiðing av hesum kann eisini verða, at næmingtalið í flokkunum blívur lágt, og tað ávirkar tímajáttanina og møguleikarnar fyri fleiri valmøguleikum t.d. fleiri tilboðum í hádeildini. Tað kann eisini vera ein fyrimunur fyri samspælið í flokkinum, at næmingatlið ikki er ov lágt.

Um miðstaðarøkið verður býtt upp í trý skúlaumdømi, sum nevnt omanfyri, og trý spor verða aftrat í hvørjum árgangi, soleiðis at farið verður úr 13 sporum upp í 16, hevði hetta verið talið á flokkum í hvørjum øki og miðaltalið í flokkunum í ymsu økjunum í miðstaðarøkinum komandi árini:

Vesturbýur/Argir, 1. flokkur

| Skúlin á Fløtum og Skúlin á Argjahamri | næmingar | flokkar | næm pr. flokk |
|---|---|---|---|
| 2026/27 | 112 | 6 | 18,7 |
| 2027/28 | 111 | 6 | 18,5 |
| 2028/29 | 104 | 5 | 20,8 |
| 2029/30 | 113 | 6 | 18,8 |
| 2030/31 | 75 | 4 | 18,8 |
| 2031/32 | 90 | 5 | 18 |

Miðbýur /eysturbýur, 1.flokkur

| Sankta Frans skúli og Eysturskúlin | næmingar | flokkar | næm pr. flokk |
|---|---|---|---|
| 2026/27 | 102 | 5 | 20,4 |
| 2027/28 | 108 | 5 | 21,6 |
| 2028/29 | 89 | 5 | 17,8 |
| 2029/30 | 87 | 4 | 21,8 |
| 2030/31 | 74 | 4 | 18,5 |
| 2031/32 | 65 | 3 | 21,7 |

Hoyvík, 1. flokkur

| Hoyvíkar skúli og Sk. við Løgmannabreyt | næmingar | flokkar | næm pr. flokk |
|---|---|---|---|
| 2026/27 | 89 | 5 | 17,8 |
| 2027/28 | 92 | 5 | 18,4 |
| 2028/29 | 94 | 5 | 18,8 |
| 2029/30 | 72 | 4 | 18 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 2030/31 | 76 | 4 | 19 |
| 2031/32 | 67 | 4 | 16,8 |

Útrokningarnar í talvuni omanfyri eru grundaðar á núverandi barnatal í miðstaðarøkinum, fólkavøkstur er ikki roknaður uppí, og tað er ikki tikið við, at nøkur børn fara í Lítlaskúla og einstøk í Skúlan á Trøðni. Talvan gevur tó eina ábending um, at verður miðstaðarøkið trý skúlaumdømi, so verður neyðugt at byggja út í øllum økjunum.

**Færri skúlaumdømi/grunduppptøkuøki**
Um so er, at tað høvdu verið trý skúlaumdømi í miðstaðarøkinum, so er ikki vist, at øll sum búgva í einum økja fáa pláss í øðrum av skúlunum í økinum, tí sambært § 32 í fólkaskúlalógini, so kunnu smærri umleggingar av umdømunum verða gjørdar í sambandi við ta árligu innskrivingina.

**Metingar hjá Mentamáladeildini**
Skúli og frítíðarskúli hoyra saman, soleiðis at skilja, at børn í einum skúla ganga í ein ávísan frítíðarskúla. Um eyka flokkar verða tiknir inn í skúla er eisini neyðugt, at hølir eru tøk í frítíðarskúla.

Tann bíligasta loysnin er, at eyka flokkar verða tiknir inn í Eysturskúlan, tí har eru høli tøk til skúlapartin, so neyðugt verður bert at útvega hølir til frítíðaskúlan. Spurningurin er so, um tað er skynsamt, at eyka flokkarnir verða í Eysturskúlanum, tí tað er ikki í eysturbýnum, at tørvurin er størstur. Býurin er tó ikki so stórur, og royndin hjá skúlanum er, at tá børnini hava gingið eina tíð í skúla, so kenna teg seg sum part av bólkinum, og bústaðurin hevur sum so ikki ávirkan á, at tey trívast.

Tað ber eisini til at taka ein flokk aftrat inn í Sankta Frans skúla, tí høli eru tøk til tað, men um skúlin skal taka eyka flokk inn trý ár á rað, er neyðugt at útvega hølir til tveir flokkar eyka. Tað er ikki so gott pláss at seta eyka høli upp við Sankta Frans skúla. Tað ber kanska til í skúlagarðinum, men tá fer stórur partur burtur av spæliøkinum hjá næmingunum. Fyribilshølini í skúlagarðinum hjá Hoyvíkar skúla eru til tveir flokkar, og tey eru uml. 180 $m^2$ ella 18x10.
Ein fyrimunur, at eykaflokkarnir eru í miðbýnum, er bussleiðin, ti flestu bussar steðga í Steinatúni, og haðani er stutt at ganga niðan í Sankta Frans skúla.

Tað er ikki so eyðsýnt at hava eyka flokkarnar í Hoyvík, tí Skúlin við Løgmannabreyt er bygdur til ávísa námsfrøði við stórum flokkum, og tað ber ikki so væl til at býta tríggjar flokkar í tveir, tí næmingatalið passar ikki so væl.
Nýggjur bygningur skal byggjast til Hoyvíkar skúla. Í verandi hølum er ikki pláss fyri fleiri flokkum. Fyri nøkrum árum síðani vóru fyribilshøli við tveimum flokshølum sett upp í skúlagarðinum fyri at kunna hýsa øllum virkskeminum í skúlanum.
Tey árini pláss ikki er fyri øllum næmingunum, sum búgva í upptøkutøkinum í skúlunum í Hoyvík ber til at minka um upptøkuøkið,, so partur av økinum fer í skúla niðri í býnum.

Skúlin á Fløtum hevur ikki pláss fyri eykaflokkum, men til ber at seta fyribilshøli upp við skúlan, tætt við grunddeildina. Treytað av at skúli og frítíðarskúli partvís kunnu brúka somu høli, er tørvur á 4 fyribilshølum. Fyrsti flokkur hevur so sínar heimastovur har, og hølini kunnu eisini virka sum høli hjá frítíðarskúlanum. Seks ár eftir, at fyrsti eyka flokkurin er tikin inn, eru nóg mikið av hølum til, at fyrsti flokkur flytur inn aftur í skúlan.
Skúlin á Fløtum er størsti skúli í kommununi við 784 næmingum. Koma tríggir flokkar aftrat hækkar næmingatalið við 66 næmingum, men hóast skúlin er stórur, er hann bygdur soleiðis, at hvør deild er ein eind fyri seg, so skúlin virkar ikki so stórur.
Fyrimunur við at hava eyka flokkarnar í Skúlanum á Fløtum er, at bæði Argir og vesturbýur hava høgt barnatal, og tað er ikki so langt av Argjum í Skúlan á Fløtum, tó passar busssambandið ikki so væl millum allar býlingarnar á Argjum og Skúlan á Fløtum. Tað er heldur ikki langt úr miðbýnum og í Skúlan á Fløtum, so tað hevði borið til at víðkað upptøkusøkið hjá Skúlanum á Fløtum bæði inn í økið hjá Sankta Frans skúla og inn í økið hjá Skúlanum á Argjahamri.

Tað er ikki pláss í Skúlanum á Argjahamri fyri eyka flokki/flokkum, so um flokkarnir verða har, er neyðugt at seta fyribilshøli upp. Útiøkið hjá skúlanum er ikki so væl egnað til fyrbilshøli. Býarskipanardeildin vísir á møguleikan, at nøkur grundstykki omanfyri skúlan verða hildin aftur í nøkur ár, so fyribilshøli kunnu setast upp har. Nógv verður bygt á Argjum, so lítið er at ivast í, at næmingatalið verður nakað hægri enn talið, sum tekur støði í núverandi tali á børnum undir skúlaaldur. Fyrimunur við at hava eyka flokkar á Argjum er, at tað ber til at flyta upptøkuøkið hjá skúlanum inn í økið hjá Skúlanum á Fløtum og at laga upptøkuøkini hjá Skúlanum á Fløtum og hjá Sankta Frans skúla eftir tí.

**Arbeiðsbólkur umboðandi skúlastýrini**
Umsitingin hevur ikki uppskot til arbeiðsbólk enn, tí mett verður skilabest at bíða við at seta arbeiðið í gongd, til betri grundarlag er tøkt at taka støðu út frá.

Býarskipanardeildin setir júst nú í samstarvi við Bygningdeildina, Barna og Ungdómsdeildina og Mentamáladeildina eitt arbeiði í gongd at gera heildarætlan fyri kjarnutænastur fyri børn og ung í Tórshavn. Hetta arbeiðið fer m.a. at byggja á lýsingar og metingar av núverandi hølis- og útbyggingarmøguleikum, fólkfrøðisligar metingar av fólkasamanseting og vøkstri. Heildarætlanin kemur at fyrihalda seg til framtíðar tørv á plássum og útbygging innan skúla, forskúla og frítíðarskúla. Heildarætlani skal verða liðug í januar/februar 2026.

Í mun til komandi avbjóðingar við skúlainnskrivingini fyri skúlárið 2026/27, sum byrjar hálvan desembur 2025, er ikki gjørligt at gera skjótar yvirskipaðar broytingar í skúlabygnaðinum. Men vit kunnu arbeiða fram ímóti at verða klár til at seta eina formliga viðgerð av skúlabygnaðinum í verk, tá heildarætlan fyri kjarnutænastur fyri børn og ung í Tórshavnar kommunu fyriliggur.

Í mun til skúlainnskrivingina til skúlaárið 2026/27 er neyðugt, at Mentamaldeildin hevur eina ætlan fyri, hvussu hon verður handfarin, og at ætlanin verður staðfest í nevndarumfarinum í novembur 2025.

**Arbeiðssetningur**
Ávegis uppskot til arbeiðssetning er hjálagt

**Forskúli og leiðreglur**
Umsitingin hevur spurt seg fyri hjá løgfrøðingi viðvíkjandi heimild at broyta leiðreglurnar, soleiðis at bert børn, ið búgva í grundupptøkuøkinum hjá einum skúla hava møguleika at skriva seg inn í forskúla har. Við tílíkari skipan, høvdu børn í upptøkuøkinum hjá Eysturskúlanum og børn í upptøkuøkinum hjá Hoyvíkar skúla og Skúlanum við Løgmannabreyt ikki havt møguleika at fingið pláss í forskúla.

Í miðstaðarøkinum, høvdu so bert børn í grundupptøkuøkjunum hjá Sankta Frans skúla, hjá Skúlanum á Fløtum og hjá Skúlanum á Argjahamri havt møguleika at fáa pláss í forskúla.

Svarið frá løgfrøðingi á Stjórnanskrivstovuni er, at ein kommuna ikki kann áseta eina innanhýsis treyt, sum alment útilokar øll, ið ikki lúka ávísa treyt.

Innan fyrisitingarrættin er bann fyri at seta *meting undir reglu*. Grundreglan merkir, at tað er ikki loyvt at velja eina ávísa treyt burturúr og lata hana vera avgerandi fyri metingina.

Í hesum ítøkiliga málinum hevði broytingin ført við sær, at børn í økjum uttan forskúla fáa verri atgongd til forskúlatilboð, og avmarkingin er í stríð við fyrisitingarligu aðalregluna *líkaregluna*. Ein slík skipan hevði elvt til, at børn í upptøkuøkjum hjá skúlum uttan forskúla, høvdu verið útilokað frá møguleikanum at fáa forskúlapláss, hóast tøk pláss eru. Broytingin hevði ført við sær, at ein partur av umsøkjarum høvdu verið útilokaðir frammanundan uttan at fáa eina ítøkiliga meting frá myndugleikans síðu.

Tað er tó einki, ið forðar fyri, at børn, ið búgva í upptøkuøkinum hjá skúlanum, hava *framíhjárætt* at fáa pláss í forskúlanum har – so leingi framíhjárætturin er grundaður á saklig atlit, og ikki á eina reglu, sum útilokar onnur uttan ítøkiliga meting.

Niðurstøðan er sostatt, at tað ikki er heimild at avmarka rættin til forskúlapláss, soleiðis at bert børn í upptøkuøkinum hjá einum skúla kunnu fáa pláss í forskúlanum.
Sí hjálagt teldpostsamskifti við løgfrøðing á Stjórnarskrivstovuni
Ítøkiliga merkir niðurstøðan, at Mentamáladeildin viðgerð tær innskrivingar, ið eru komnar innan umsóknarfreistina. Fyrst verða tey innskrivað, ið hava systkin í skúlanum og síðani tey, ið búgva í grundupptøkuøkinum. Um tað tá eru tøk pláss, verða móttiknar innskrivingar úr øðrum grundupptøkuøkjum viðgjørdar, og børnini innskrivað. Tá viðgerðin er liðug, verða innskrivingar, sum eru móttiknar eftir freistina, viðgjørdar.

Niðurstøða hjá umsitingini
Tað er torført at finna eina loysn, sum er tann besta ella frægasta, men raðfest uppskot hjá mentamáladeildini er niðanfyri her:

1. Eysturskúlin tekur ein flokk eyka í trý ár á rað. Fyrimunir við hesi loysn er, at tað er pláss í skúlanum, so neyðugt verður ikki at gera íløgu í høli. Tó verður neyðugt at útvega høli til frítíðarskúlan Smílibýlið. Hølini hjá frítíðarskúlanum eru ikki nøktandi, so ein partur av frítíðarskúlanum brúkar fyribilshølini, sum eru sett upp í skúlagarðinum í Eysturskúlanum.
Tað kann vera ein vansi, at summi børn í einum fyrsta flokki hava gingið i forskúla í skúlanum í eitt ár og onnur ikki. Eingin forskúli er í Eysturskúlanum, so skúlabørnini byrja øll í skúlanum í fyrsta flokki, so ti viðvíkjandi eru tey øll í somu støðu.
Hádeildin í Eysturskúlanum er trý spor, og tað er ikki trupulleiki at hava ein flokk eyka, tá hesir flokkar koma í hádeildina.
Um eyka flokkarnir verða í Eysturskúlanum, verður upptøkuøkið víðkað inn í økið hjá Sankta Frans skúla, partur av økinum hjá Skúlanum á Fløtum verður so flutt til økið hjá Sankta Frans skúla, og partur av økinum hjá Skúlanum á Argjahamri verður flutt í økið hjá Skúlanum á Fløtum. Ein avbjóðing við hesi loysn er, at neyðugt verður at flyta fleiri mørk, og at barnatalið í eysturbýnum er ikki høgt.

2. Skúlin á Fløtum tekur ein flokk eyka í trý ár á rað. Fyrimunur við hesi loysn er, at skúlin er í einum øki við høgum barnatali og við ávísum bústaðarvøkstri, haraftrat er barnatalið í upptøkuøkjunum hjá grannaskúlunum eisini høgt, so til ber at víðka økið hjá Skúlanum á Fløtum bæði inn í økið hjá Skúlanum á Argjahamri og økið hjá Sankta Frans skúla.
Høl eru ikki tøk í skúlanum, men til ber at seta fyribilshølir upp tætt við grunddeildina í útiøkinum hjá skúlanum. Skúlin metir, at hesi høli kunnu innrættast til bæði skúla og frítíðarskúla.
Ein vansi við at taka eykaflokkar inn í Skúlan á Fløtum er, at hann hevur tríggjar forskúlaflokkar, og at tað so verða nøkur børn, sum hava gingið í forskúla í skúlanum og onnur ikki, og at tað kanska verður neyðugt at skipa forskúlaflokkarnar av nýggjum, tá teir fara í fyrsta flokk, so forskúlanæmingarnir ikki halda fram í somu flokkum, men verða býttir út á teir fýra fyrstu flokkarnar.
Hádeildin í Skúlanum á Fløtum er fimm spor, og so hvørt eykaflokkarnir koma í hádeild, verður ikki neyðugt við eyka hølum. Men tey árini eyka flokkar eru í skipanini, verður ikki møguligt hjá næmingum úr øðrum skúlum at fáa pláss á ítróttarás í Skúlanum á Fløtum.

3. Sankta Frans skúli tekur ein eyka flokk í eitt ár aftrat, og tað verður komandi skúlaár. Skúlin á Argjahamri tekur so eyka flokkar í tvey ár á rað.
Í Sankta Frans skúla er pláss fyri einum flokki aftrat, men um eyka flokkar verða trý á aftrat, verður neyðugt at útvega høli til tveir flokkar. Um eyka flokkur ella eyka flokkar verða tiknir inn í Sankta Frans skúla, verður neyðugt at útvega hølir til frítíðarskúlan.
Hádeildin í Sankta Frans skúla er tvey spor, og í bygninginum til hádeildina er ikki pláss fyri fleiri flokkum, so tá núverandi eyka flokkur í Sankta Frans fer í 7. Flokk, og so hvørt hinir møguligu eyka flokkarnir fara í hádeild, er neyðugt at finna eina hølisloysn, so til ber at hava hádeildina í eini eind.
Ein vansi við at taka eyka flokkar inn í Sankta Frans skúla er, at hann hevur tveir forskúlaflokkar, og at tað so verða nøkur børn, sum hava gingið í forskúla í skúlanum og onnur ikki, og at tað kanska verður neyðugt at skipa forskúlaflokkarnar av nýggjum, tá teir fara í fyrsta flokk, so forskúlanæmingarnir ikki halda fram í somu flokkum, men verða býttir út á teir tríggjar fyrstu flokkarnar.
Ein fyrimunur við loysn í Sankta Frans skúla er, at skúlin er í miðbýnum, og tað ber væl til at laga upptøkuøkini eftir tí. Umframt at upptøkuøkið hjá Sankta frans skúla verður víðkað út í økið hjá

Skúlanum á Fløtum, kann tað eisini víðkast inn í ein part av upptøkuøkinum, sum hoyrir til skúlarnar í Hoyvík.

Skúlin á Argjahamri tekur eyka fyrsta flokk inn tvey ár á rað, tann fyrra skúlaárið 2027/28. Tað er ikki pláss i skúlanum, so neyðugt verður at útvega hølir til bæði skúla og frítíðarskúla.
Fyribilshøli kundu kanska verið sett upp í einum økið tætt við høvuðsdyrnar, men tað er ikki tætt við grunddeildina, so skilabest er, at aðrir flokkar verða har, kanska elsti árgangurin í miðdeild. Tað kann eisini verða kannað um tað ber til at halda nøkrum at grundstykkjunum omanfyri skúlan aftur, og so seta møgulig fyribilshøli til skúla og frítíðarskúla upp har.
Ein vansi við at taka eyka flokkar inn í Skúlan á Argjahamri er, at hann hevur tveir forskúlaflokkar, og at tað so verða nøkur børn, sum hava gingið í forskúla í skúlanum og onnur ikki, og at tað kanska verður neyðugt at skipa forskúlaflokkarnar av nýggjum, tá teir fara í fyrsta flokk, so forskúlanæmingarnir ikki halda fram í somu flokkum, men verða býttir út á teir tríggjar fyrstu flokkarnar
Ein fyrimunur við hesi loysn er, at tað verður betri tíð til at fyrireika hølisloysnina til skúla og frítíðarskúla.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja, at møguligir eyka fyrstu flokkar komandi trý skúlaárini verða tiknir inn í Eysturskúlan.

**Trivnaðarnevndin 06. november 2025**: Ein meiriluti, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein, mæla til at keypa mondulir til Skúlan á Fløtum og Skúlan á Argjahamri, at taka i nýtslu skúlaárið 2026/2027.

Ein minniluti, Annita á Fríðriksmørk og Kristianna Winther Poulsen, taka undir við loysn 2.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Heðin Mortensen, samtykkir at heita á umsitingina:

1) at kanna keyp av lonum og fara undir fyrireikingina at skipa eitt eyka spor á skúlanum á Fløtum skúlaárið 2026/2027,

2) at kanna møguleikan fyri, at børn á Argjum kunnu rúmast í verandi hølum í skúlanum á Argjahamri skúlaárið 2026/2027, og í øðrum lagi at kanna keyp av lonum til skúlan á Argjahamri,

3) og at koma aftur í trivnaðarnevndina og fíggjarnevndina í desember 2025.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen og Tróndur Sigurðsson, mælir til at keypa lonir til Skúlan á Fløtum og Skúlan á Argjahamri, at taka i nýtslu skúlaárið 2026/2027.

**Ískoyti:**
Sambært næmingagrundarlagnum í grundupptøkuøkjunum í miðstaðarøkinum verður tørvur á at brúka loyvi til undantak frá næmingahámarkinum í Sankta Frans skúla og á Skúlanum á Argjahamri. Harumframt er tørvur á eyka skúlastovum komandi 3 árini í Skúlanum á Fløtum. Komandi ár er útlit fyri at Skúlin á Argjahamri klárar tørvin við undantakinum frá næmingahámarkinum, men skúlaárið 2027/28 verður tørvur á eyka flokki, og tað verður tað helst eisini skúlaárið 2029/30.

Vænta næmingatal í 1. flokkunum á Skúlanum á Argjahamri og Skúlanum á Fløtum komandi árini út frá núverandi barnatali og bústaði:

| | 2026/27 | | | 2027/28 | | | 2028/29 | | | 2028/29 | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | fl. | næm. | innskr | fl. | næm. | innsk | fl. | næm. | innskr | fl. | næm. | innskr. |
| Skúlin á Argjahamri | 2 | 48 | 46 | 3 | 66 | 55 | 2 | 44 | 34 | 3 | 46 | 48 |
| Skúlin á Fløtum | 4 | 88 | 75 | 4 | 88 | 80 | 4 | 88 | 75 | 3 | 68 | 66 |
| Uttan nakrar broytingar í næmingagrundarlagnum | | | | | | | | | | | | |

**Fundur við Undirvísingarstýrið**
Umsitingin hevur havt fund við Undirvísingarstýrið um innskriving í fyrsta flokk, undantak frá næmingahámarkinum og møguligar eyka flokkar í Tórshavnar kommunu. Við støði í mettu innskirivnngartølunum og fíggjarkarminum hjá Undirvísingarstýrinum, fer stýrið væntandi at mæla frá, at Tórshavnar kommuna fær eyka flokka/flokkar skúlaárið 2026/2027. Undantakið er galdandi í eitt skúlaár aftrat, at sambært verandi tølum er tað nóg mikið. Tá innskrivingin er liðug sæst um broytingar eru, og tá kann henda, at støðan verður ein onnur.
**Fundur við Barna- og útbúgvingarmálaráðið**
Umsitingin hevur eisini havt fund við Barna- og útbúgvingarmálaráðið um innskriving í fyrsta flokk, pláss í nærumhvørvinum og systkina fyrimun. Dentur eigur at vera lagdur á, at systkin fáa pláss í sama skúla. tí eigur kommunan at leggja seg eftir, at systkin sleppa inn, um ikki so skulu foreldrini spyrjast um tað.

Í meginreglunum um upptøku av næmingum í kommunalu fólkaskúlarnar í Tórshavnar kommunu er viðmerkt um upptøkuøkini, at mørkini á økjunum kunnu flyta frá einum ári til tað næsta, tí tey verða lagað eftir mettum tali á børnum í ymsu økjunum, ið skulu í forskúla og 1. flokk.

§ 29 í fólkaskúlalógini snýr seg um skúlaumdømi og mannagongd at leggja skúla niður. Skipan av skúlaumdømum er ásett í stk. 1 og ásetingin um systkin í stk. 4.

Raðfylgjan er ikki avgerandi, men at kommunan heldur seg til ásetingarnar í fólkaskúlalógini í sambandi við innskriving. Punkt 3 í leiðreglunum "Barnið hevur systkin í skúlanum" skal verða hildið óansæð, hvar í røðini tað stendur. Tað hevur eins stóran týdning, eisini um talan er um møguligar umleggingar av umdømismarkinum.

"Smærri umlegging" er grannaskúlin, men kann eisini vera í lagi, um talan er um høgliga skúlaleið, t.d. gott busssamband til skúlan.

**Fundur á leiðslustigi við Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Undirvísingarstýrið**
Tórshavnar kommuna greiddi frá støðuni og samtyktini í fíggjarnevndini, og at farið er undir fyrireikingar til eyka spor í Skúlanum á Argjahamri og í Skúlanum á Fløtum. Politiski viljin í Tórshavnar kommunu er, at øll børn fáa pláss í skúlanum í nærumhvørvinum, og kommunan fer at senda Barna- og útbúgvingarmálaráðnum skriv við umsókn um eyka flokkar komandi skúlaárini.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið vísti á, at Tórshavnar kommuna hevur ein góðkendan skúlabygnað at halda seg til.

Undirvísingarstýrið hevði væntað, at við loysnini við undantakinum upp til 24 næmingar í tvey skúlaár og eyka flokki núverandi skúlaár, fór at verða friður í tvey ár, men stýrið veit, at avbjóðing verður í 2027/2028.

**Fundir við Skúlan á Argjahamri og Skúlan á Fløtum**
Leiðslan á Skúlanum á Argjahamri er sinnað at nýta undantakið fyri næmingahámarkinum komandi skúlaárð, um tað tryggjar argjabørnum pláss í nærumhvørvinum og vísir á, at tørvur er á eyka flokkshølum næsta skúlaár. Tað er sera trongligt í grunddeildini og hjá forskúlanum, so tað er ikki møguligt at loysa hølistørvin uttan eyka skúlastovur. Møguleiki at leggja grundstykki til síðis í eitt tíðarskeið til eyka skúlastovur er umrøddur millum skúlaleiðsluna og avvarandi deildir.

Leiðslan í Skúlanum á Fløtum vísir á, at tað hóskar væl við bygnaðin á skúlanum at taka tríggjar eyka flokkar inn, tey komandi trý skúlaárini, men at tað krevur eyka skúlastovur. Skúlastjórin vísir á møguligar staðsetingar, har besta staðið liggur millum grunddeildin og Glasir, beint omanfyri spæliplássi.

**Kostnaðarmeting og tíðarætlan frá Bygningsdeildini**
Mentamáladeildin hevur síðani , við støðið í fyribils skúlstovunum hjá Hoyvíkar skúla, lýst málið fyri Bygningdeildini og biðið um kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri byggibúning, útvegan og uppseting av fyribils skúlastovum.

Bygningsdeildin metir at ein loysn við tveimum skúlastovum liggur um 5.850 tkr. og ein loysn við trimum skúlastovum liggur um 8.650 tkr. Tá eru lonir við Hoyvíkar skúla brúktar sum referansa til stødd og fermetrar á skúlastovum og duri og vesum. Fyrivarni verður tikið fyri óvæntaður forðingum í samband við lendisarbeiðið. Tað verður mett møguligt at fáa annað ella bæði bygt og reist til skúlaárið 2026/27 um tað verður heimilað umsitingini at byrja skjótast og fara í samráðingar við veitarar til lendisarbeiði, veitan av modulum ella elementum og montering av hesum. Umframt fyrireiking og myndugleikaviðgerð.

Møguligar broytingar við eyka 1. flokkum og fleiri næmingum ávirka frítíðarskúla í økinum. Mentamáladeildin hevur tí biðið Barna- og ungdómsdeildina um viðmerkingar til málið.

**Viðmerkingar frá Barna- og Ungdómsdeildini: Samandráttur**
Barna- og ungdómsdeildin hevur ongar viðmerkingar til talið av 1. flokkum í skúlanum.

Deildin vil kortini gera vart við, at í løtuni er ikki umstøður til ein eyka flokk við 22 børnum afturat í frítíðarskúlanum.

Ein loysn kundi verið at bygt frítíðarskúlan út, ella at skúli og frítíðarskúli aftur fara í holt við deildu nýtslu av viðkomandi hølum.

Ein alternativ loysn, sum kann geva frítíðarskúlanum meira rúmligar umstøður, er at frítíðartilboðið til 3. flokk flytur úr Frítíðarskúlanum á Argjahamri til eina aðra staðseting. Hetta er kortini ikki nokk av plássi til at rúm verður fyri einum eyka flokki í frítíðarskúla.

Barna- og ungdómsdeildin hevur ongar viðmerkingar til talið av 1. flokkum í skúlanum.

Deildin vil kortini gera vart við, at í løtuni eru ikki umstøður til 2 flokkar við 22 børnum afturat í frítíðarskúlanum.

Barna- og ungdómsdeildin tekur undir við at byggja ein frítíðarskúla í nærumhvørvinum hjá Skúlanum á Fløtum. Tað er kortini treytað av, at kommunan samlar annaðhvørt øll frítíðarskúlabørnini ella 1.-2. flokk undir einum taki.

Sum eina neyðloysn, inntil nýggjur frítíðarskúli er bygdur, so mælir Barna- og ungdómsdeildin til, at forskúli flytur í hølini hjá 1. flokki, 1. flokkur flytur í hølini hjá 2. flokki og 2. flokkur flytur í fyribilshølini.

Harvið yvirtekur frítíðarskúlin hølini, sum í dag vera brúkt til forskúlan, og hevur einsamallan ræðisrætt av hølunum. Har við fær frítíðarskúlin egin hølir at ráða yvir. Talan er um økið, sum eru markerað við gulum í myndini niðanfyri.

Skjalið: “Viðmerkingar frá Barna og Ungdómsdeildini” er hjálagt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 349 |
| | Forkvinnunnar merki: |




**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini at umrøða málið.

**Mentamálanevndin 26. november 2025:** Umrøtt.

**Trivnaðarnevndin 27. november 2025:** Umrøtt.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið. Tilfar verður lagt fram á fundinum.

**Trivnaðarnevndin 15. januar 2026:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Kunning um innskriving skúlaárið 2026/2027

Innskriving í 1. flokk 2026/27

| | Mótt. innskr. | Pláss | Tøk pláss | Innskr. | Flutt | Tøk pláss |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Eysturskúlin - í skúla | 49 | 46 | -3 | 46 | -3 | 0 |
| Kaldbaks skúli -í skúla | 2 | | | 2 | | |
| Hoyvíkar skúli - í skúla | 34 | 44 | 10 | 38 | 4 | 6 |
| Kollafjarðar skúli - í skúla | 14 | | | 14 | | |
| Nólsoyar skúli - í skúla | 3 | | | 3 | | |
| Sankta Frans skúli - í skúla | 57 | 48 | -9 | 48 | -9 | 0 |
| Skúlin á Argjahamri - í skúla | 45 | 48 | 3 | 45 | | 3 |
| Skúlin á Fløtum - í skúla | 70 | 88 | 18 | 82 | 12 | 6 |
| Skúlin á Løgmannabreyt - í skúla | 48 | 44 | -4 | 44 | -4 | 0 |
| Velbastaðar skúli - í skúla | 2 | | | 2 | | |
| Kommunuskúlar íalt | 324 | | 15 | 324 | | 15 |

Viðmerking: Innskrivingarnar eru viðgjørdar og avgerð tikin um hvør fær pláss í 1. flokki og hvør skal flyta í annan skúla eftir galdandi leiðreglum.

Íalt 16 næmingar fáa ikki pláss har teir hava innskrivað, 3 í Eysturskúlanum, 4 í Skúlanum við Løgmannbreyt og 9 í Sankta Frans skúla.
Av hesum búgva 7 í skúlaøkinum, 5 flyta til økið, 3 búgva ikki í økinum og 1 hevur skrivað inn eftir freistina

Tey ið ikki fáa pláss har tey hava innskriva, hava fingið boð frá Mentamáladeildini um innskriving í annan skúla, og høvi at skriva seg á bíðilista til pláss í skúlanum tey hava innskriva í.

Skúlarnir senda út boð til næmingarnar ið verða innskrivaðir í 1. flokk í teirra skúla.

Innskriving í forskúla 2026/27

| | Mótt. innskr. | Pláss | Tøk pláss | Innskr. | Í viðgerð |
|---|---|---|---|---|---|
| Kollafjarðar skúli - í forskúla | 0 | 16 | 16 | 0 | |
| Sankta Frans skúli - í forskúla | 64 | 44 | -20 | 44 | 20 |
| Skúlin á Argjahamri - í forskúla | 22 | 44 | 22 | 22 | |
| Skúlin á Fløtum - í forskúla | 54 | 66 | 12 | 54 | 12 |
| Kaldbaks skúli - í forskúla | 3 | 9 | 6 | | |
| | 143 | 179 | 36 | 120 | |

Viðmerking: Innskrivingarnar eru viðgjørdar og avgerð tikin um hvør fær pláss í forskúla eftir galdandi leiðreglum.

Tað eru 64 innnskrivingar móttiknar til 44 pláss í Forskúla í Sankta Frans skúla, so pláss er ikki fyri 20 næmingunum .
Av 20 næmingum ið ikki fáa pláss, búgva 4 í øki upp at skúlamarkinum til Skúlan á Fløtum, 2 flyta til økið, 13 búgva í øðrum økið og 1 hevur søkt eftir freistina.

Tey, ið ikki fáa pláss í Sankta frans skúla, hava fingið boð frá Mentamáladeildini og høvi at skriva seg á bíðilista, til pláss í forskúlanum. Upplýst er eisini at tøk pláss eru í forskúlanum í Skúlanum á Fløtum, við tilboð at skriva seg upp til pláss, Freistin er 12. februar og tá verða hesi pláss viðgjørd.

Viðkomandi skúlar senda boð til foreldrini ið hava fingið pláss í forskúla.

**Trivnaðarnevndin 12. februar 2026:** Kunnað varð um málið.

Kristianna Winther Poulsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

### Ískoyti

Av tí  at næmingatalið í skúlaflokkunum er lækka niður í 22 næmingar í flokkinum, samstundis sum barnárgangirnir í miðstaðarøkinum eru stórir í 1. flokki skúlaárini 2025/26 til 2029/30, er neyðugt at útvega fleiri skúlapláss.

Skúlaárini 2025/26 og 2026/27 er tað gjørt við undantakið frá næmingahámarkinum, og við eyka 1. flokki, í Sankta Frans skúla í fjør og á Skúlanum á Fløtum í ár.

Skúlaárið 2027/28 er ikki heimildin til undantak frá næminghámarkinum longur og er tí samtykt at útvega eyka skúlastovur fyri at nøkta tørvin á skúlaplássum til og við skúlaárinum 2029/30, tá næmingatalið minkar.

Avgerð er tikin um:

- eyka 1. flokk skúlaárini 2026/27, 2027/28 og 2028/29 á Skúlanum á Fløtum
- eyka 1. flokk skúlaárini 2027/28 og 2029/30 á Skúlanum á Argjahamri

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur eftir áheitan frá Torshavnar kommunu, um loyvi til tveir eyka 1. flokkar skúlaárið 2026/27,  játta ein eyka 1. flokk afturat áður játtaða undantakinum frá næmingahámarkinum og ráðið hevur valt at bíða við at taka støðu til skúlaárini 2027-2029, til ein greið lagtíðarætlan fyri innskriving í forskúla og 1. flokk fyriliggur fyri komandi árini.

Ráðið hevur skrivliga boða frá, at tað er sinna at samskifta um hvussu innskriving í forskúla kann skipast skynsamt í mun til innskriving í 1.flokk, har tryggja verður, at innskriving í forskúla av barni sum býr uttanfyri grundupptøkuøkið, ikki forðar barnið í upptøkuøkinum rættin til at sleppa í 1. flokk.

Tað tykist sum Barna- og útbúgvingarmálaráðið nú letur upp fyri heimild at broyta verðandi praksis fyri innskriving, har systkin í skúlanum gevur fyrimun framum bústað í skúlaumdøminum.

Nú kommunal avgerð er tikin um útvegan av eyka skúlaplássum á Skúlanum á Argjahamri og Skúlanum á Fløtum næstu árini og Barna og útbúgvingarmálaráðið letur upp fyri broytingum av innskrivingini, er grundarlag fyri at gera eitt uppskot um tillagingar av grundupptøkuøkjunum og av leiðreglunum fyri innskriving í forskúla og 1. flokk, við tí endamálið at so nógvir næmingar sum gjørligt fáa skúlapláss i skúlanum í teirra skúlaumdømi.

Mentamáladeildin tekur tí stig til eitt nærri samskifti við løgfrøðingarnar hjá kommununi og Barna og Undirvísingarstýrið um broytingar av leiðreglunum fyri innskriving, við tí endamálið at seta bústaðin í skúlaumdøminum  framum systkin í skúlanum.

Mentamáladeildin teku somuleiðis, við hjálp frá teknisku deild, stig til at meta um hvussu skúlaumdømini kunnu tillagast verðandi skúlabygnaði, við eyka 1. flokkum komandi árini

Hóast talan ikki er um varðandi broytingar av skúlabygnaðinum í kommununi, so metir mentamáladeildin at broytingaranar verða so umfatandi at tær eiga verða lagdar fyri skúlastýrini eftir galdandi reglum og verða góðkendar av  Barna- og útbúgvingarmálaráðnum.

**Greinir í fólkaskúlalógini viðvíkjandi broyting í skúlabygnaði**
**§ 46.** Skúlamyndugleikin á staðnum er kommunustýrið og skúlastýrið smb. § 50, 1. stk.
**§ 47** *Stk. 6.* 2) Kommunustýrið ger uppskot um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum, sbr. §§ 32, stk.1 og 57, stk. 5.
**§ 52.** *Stk. 4.* Skúlastýrið viðger saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum, sbr. § 32, stk. 1. Í teimum kommunum, ið hava tvey ella fleiri skúlastýri, velur kommunustýrið ein arbeiðsbólk, umboðandi øll skúlastýrini, at viðgera uppskot um skúlabygnað, sbr. § 47, stk. 6.
**§ 57** *Stk. 5.* 9) Landsstýrismaðurin góðkennir skúlabygnað kommununnar og tær ítøkiligu undirvísingarætlanirnar fyri teir einstøku skúlarnar og møguligar broytingar í teimum. Landstýrismaðurin kann loyva, at fleiri skúlar í einum øki verða roknaðir sum ein skúli, sjálvt um ikki øll undirvísingarhølini eru savnað á sama staði í økinum.

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Trivnaðarnevndin 12. mars 2026:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Kommunulistin krevur málið fyri býráðið á komandi fundi.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Felags broytingaruppskot - býráðið heitir á landsstýrið um ein eyka 1. flokk til Sankta Frans skúla aftaná summarferiuna 2026 og at skúlabygnaðurin verður endurskoðaður í síni heild til næstu innskriving.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð einmælt samtykt.

| | Byráðsfundur<br>19. mars 2026 | Blað nr.: 353 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

# 98/26 Áheitan um at broyta hámarksferðina á havnarvegnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 98/26 | 26/01565-2 |

**Upprunin til málið**
Tróndur Sigurðsson biður um at fáa hámarksferðina til Havnarvegin fyri býráði.

Vìsandi til at vit tá á sinni skeltaðu vegin til 60 kmt hetta haldi eg eigur at verða broytt.

Tí fari at biða um at fáa orðaskilti og málið til atkvøðugreiðslu um at broyta hámarksferðina.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd    Ja ☐    Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**:

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Fyrst varð atkvøtt um atkvøðast skal um uppskot hjá Tróndi Sigurðsson, ið fall við fimm atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Elin Heðinsdóttir Joensen og Guttormur í Skála.

Síðani varð atkvøtt um at beina málið í teknisku nevnd, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri og fimm í móti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Elin Heðinsdóttir Joensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

# 99/26 Staðseting til lestrarheim í Havn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.03.2025 | 56/25 | 25/01670-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.04.2025 | 66/25 | 25/01670-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 100/25 | 25/01670-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.03.2026 | 86/26 | 25/01670-1 |
| 5 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 99/26 | 25/01670-1 |

**Upprunin til málið**
Fróðskaparsetur Føroya veksur støðugt, og eru fleiri út- og umbyggingar í gongd fyri at betra um karmarnar kring Setrið.

Hagstovan hevur staðfest, at búfestið í Føroyum er so veikt, at fimti hvør føroyingur ikki longur býr í Føroyum. Hetta er til stóran skaða fyri sosialu, búskaparligu og demografisku burðardygdina í landinum. Ein trupulleiki er, at føroyingar flyta av landinum fyri at fara undir lesnað. Tískil er eitt av aðalmálunum hjá Setrinum at fáa fleiri næmingar at støðast longri í Føroyum og harvið bjóða enn fleiri útbúgvingar í Føroyum.

Trupulleikin er samstundis, at Føroyar og Tórshavnar kommuna mangla bústaðir til tey lesandi – vit hava fá lestrarheim, og um ætlanin er at vaksa um næmingatal og útboðið av útbúgvingum, so mugu tað somuleiðis lestrarbústaðir til.

**Lýsing av málinum**
Fróðskaparsetur Føroya hevur sett niður arbeiðsbólk, sum hevur til endamáls at kanna møguleikan fyri at byggja eitt lestrarheim í havn. Í bólkinum er eitt umboð fyri tey lesandi, Ulla Joensen, stjóri í Elektron og Árni Ellefsen, ráðgevi og fyrrverandi stjóri í Føroya Banka.

Hesin arbeiðsbólkurin hevur vent sær til Tórshavnar kommunu fyri at kanna, hvørjir møguleikar eru í mun til staðsetingar av tílíkum lestrarheimi. Í fyrsta umfari er ynskiligt at fara undir eina verkætlan við á leið 3-400 lestrarbústøðum, og er ætlanin við tíðini at kunna byggja tilsamans umleið 900 lestrarbústaðir í Havn.

Fleiri staðsetingar hava verið umrøddar, tó er eingin endalig staðseting funnin enn. Hugt hevur verið eftir økinum kring Frælsið og har umleiðir, soleiðis at eitt komandi lestrarheim kemur at verða bygt tætt upp at Kampus.

Tórshavnar kommuna eigur tó ikki nógv lendi í hesum økinum, men mett verður, at onkrir møguleikar eru. Somuleiðis eigur landið nakað av lendi í hesum økinum, umframt at nakað av óbygdum lendi er privat. Mett verður, at alt økið kring komandi Kampus verkætlanina eigur at verða eftirhugt við tí fyri eyga, at troyta allar møguleikar, soleiðis at eitt veruligt lestrarheim kann verða bygt í økinum, so skjótt fígging er fingin til vega.

Yvirskipaða visjónin fyri Tórshavnar kommunu er, at høvuðsstaðurin verður ein **vakstrardepil í Norðuratlantshavi**. Og er eitt av undirpunktunum til visjónina, at vit vilja, at høvuðsstaðurin er virkin við nýggjum og mennandi útbúgvingartilboðum og dygdargóðum altjóða granskingarumhvørvi.

Mett verður, at Tórshavnar kommuna eigur at vera ein virkin viðspælari á frontinum at finna eina nøktandi staðseting til eitt komandi lestrarheim í Havn – og tískil verður mælt til, at umsitingin fer undir arbeiðið at finna eina nøktandi staðseting til bygging av einum lestrarheimi til 3-400 lesandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin hevur verið í samband við Landsverk, sum somuleiðis hevur vent sær til kommununa viðv. fyrispurninginum um at koma í ein dialog um møguleikarnar við evt. at umbyggja verandi Ellisheim til lestrarbústaðir, tá Røktarheimið í Hoyvík verður liðugt bygt, umframt at umrøða staðsetingar, sum kommunan sær sum upplagdar.

Landsverk hevur hugt upp á ymiskar staðsetingar í og við økið, sí skjal nr*. 25/01670-5, Møguleikar fyri lestrarbústøðum í Kampusøkinum_Landsverk*.

Enn hevur eingin ítøkiligur fundur verið um ætlanina hjá Landsverki, og helst eiga báðar ætlanirnar at verða umrøddar í felag, soleiðis at partarnir vita av hvørjum øðrum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Enn hevur málið ikki verið til umrøðu aðrastaðni í kommununi, men tá ítøkiligu staðsetingarnar fara at verða umrøddar, verða avvarðandi partar tiknir við í umrøðuna og niðurstøðurnar.

**Skjøl**
Skjal nr. *25/01670-5, Møguleikar fyri lestrarbústøðum í Kampusøkinum_Landsverk*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei
Enn eru ongar fíggjarligar avleiðingar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at umsitingini verður heimilað at finna eina nøktandi staðseting til bygging av einum lestrarheimi, og at politiska skipanin kann játta, at kommunan er sinnað at finna eina hóskandi staðseting til bygging av einum lestrarheimi til uml. 3-400 lesandi, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. apríl 2025:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Umsitingin hevur arbeitt við at finna hóskandi staðseting til lestrarbústaðir, sí skjal nr. *25/01670-10, 2025.05.28_Staðseting lestrarheim í Havn.*

Fyrimunir og vansar eru við øllum staðsetingum, og á samgongdufundi varð mett, at besta staðseting og harvið hægsta raðfesting til nýtt lestrarheim í Havn er partur av matr. nr. 1000a, við Heygsvegin.

Matr. nr. 1000a er upprunaliga lagt av til útbyggingar av Landsjúkrahúsinum, og í 2012 varð ein heildarætlan fyri alt økið góðkend millum Almannamálaráðið og Heilsumálaráðið. Sí skjal nr. *25/01670-27, Góðkend heildarætlan frá 2012, matr. nr. 1000a og 1000e, Tórshavn.*

Matr. nr. 1000a liggur í gongufrástøðu frá Kampus, og lendið er vallað, so tørvur er tískil ikki á stórvegis lendisarbeiði. Økið er uml. 9000 $m^2$ til víddar, og liggur tað í D2 øki í almennu byggisamtyktini, sum er lagt av til stórar almennar stovnar fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt, og er mest loyvda byggistig 0,25 og mest loyvda nýtslustig 0,5, sum er lutfalsliga lágt.

Serstøk byggisamtykt er gjørd fyri part av økinum, sum loyvir lestrarbústøðum. Í sambandi við ætlan um lestrarbústaðir á part av matr. nr. 1000a verður serstaka byggisamtyktin fyri Eiragarð, sum enn ikki er endaliga góðkend, víðkað til somuleiðis at fevna um ítøkiliga økið, sum verður lagt av til lestrarbústaðir.

Talan er, sum víst omanfyri, um øki hjá landinum, og hevur Tórshavnar kommuna tí verið í samráðingum við Almanna- og heilsumálaráðið (AHR) um hesa staðsetingina.

Landsstýriskvinnan í Almanna- og heilsumálum vísti á fundi fyrst og fremst á, at tað somuleiðis er av stórum áhuga hjá landinum at byggja fleiri lestrarbústaðir.

Størsta avbjóðingin hjá AHR er tó, at Landssjúkrahúsið brúkar allan matr. nr. 1000a til at nøkta krøvini viðv. byggi- og nýtslustigi til virksemið hjá Landssjúkrahúsinum. AHR vísti tó á, at Landssjúkrahúsið allarhelst ongantíð fer at byggja á tí partinum av matr. nr. 1000a, sum liggur uppi við Heygsvegin, av tí at tað ikki er skynsamt logistiskt í mun til virksemið á Lendssjúkrahúsinum.

Tórshavnar kommuna ásannar, at virksemið hjá Landssjúkrahúsinum er av størsta samfelagssliga týdningi, og at virksemið er so gróðursett í hasum økinum, at Landssjúkrahúsið til allar tíðir má hava møguleika at gera neyðugar útbyggingar í økinum, har tað virkar í dag.

Ásannandi hesi viðurskiftir vil umsitingin mæla til, at serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið hjá Landssjúkrahúsinum, ið loyvir hægri byggi- og nýtslustigi, enn galdandi ásetingar í almennu byggisamtyktini loyva. Í sambandi við at áseta hægri byggi- og nýtslustig er tørvur á, at AHR lýsir langtíðarætlan fyri víðkan av Landssjúkrahúsinum – fyrst og fremst, hvussu nógvir fermetrar væntast, at tørvur verður á komandi nógvu árini. AHR arbeiðir við at gera eina heildarætlan fyri Landssjúkrahúsið, og er ætlanin at tilfarið er klárt til í apríl 2026. Útfrá hesi heildarætlan kann eitt nøktandi byggi- og nýtslustig fyri økið ásetast.

Í eini samlaðari serstakari byggisamtykt fyri økið er ætlanin somuleiðis at staðfesta, hvørji øki skulu liggja óbygd, m.a. fyri at varðveita serstøk lendis- og náttúrufyribrygdi.

Samráðingarnar millum Almanna- og heilsumálaráðið og Tórshavnar kommunu endaðu við, nú val er útskrivað, at partarnir fara undir at gera eina treytaða avtalu millum sín, har AHR letur part av matr. nr. 1000a við Heygsvegin til bygging av lestrarbústøðum, treytað av at Tórshavnar kommuna hækkar byggi- og nýtslustigið fyri økið hjá Landssjúkrahúsinum fyri at virksemið kann halda áfram at virka í økinum í framtíðini, eisini hóast virksemið kemur at vaksa.

Almanna- og heilsumálaráðið skuldi gera uppskot til treytaða avtalu, men av tí at løgtingsval er útskrivað, verða ongar tílíkar avtalur gjørdar júst nú, fyrr enn nýtt landsstýrisfólk er sett.

Arbeiðsbólkurin, sum hevur til endamáls at kanna møguleikan fyri at byggja eitt lestrarheim í havn, hevur sent kommununi eina framløgu, sum lýsir viðurskiftini kring arbeiðsbólkin. Sí skjal nr. *25/01670-24, Framløga frá arbeiðsbólkinum um Lestrarheim í Havn*. Sum framløgan somuleiðis vísir á, so hevur Betri játtað fígging á kr. 2,5 mió. til fasu 1, sum fevnir um at gera byggiskrá og arkitektakapping. Tá bólkurin fær eina ítøkiliga staðseting, kann bólkurin arbeiða víðari við fasu 1, og kann tá eisini fara undir at skaffa íleggjarar til írestandi íløguna. Tað verður somuleiðis upplýst í tilfarinum, at Betri hevur víst áhuga í at luttaka í fíggingini av fasu 2, saman við øðrum íleggjarum.

Arbeiðsbólkurin hevur á fundi víst á, at tað hevur alstóran týdning fyri framdráttin í verkætlanini, at tey fáa víst á eina ítøkiliga staðseting skjótast gjørligt.

Fyri at arbeiðið ikki skal steðga heilt upp, og inntil nýtt landsstýrisfólk er sett, metir umsitingin tað vera ráðiligt at mæla til staðseting og geva útsøgn um, at byggisamtyktin verður broytt sambært tørvinum hjá Landssjúkrahúsinum. Soleiðis fær arbeiðsbólkurin byrjað arbeiðið at gera eina byggiskrá, og Landssjúkrahúsið fær eina samtykt um, at Tórshavnar kommuna fer undir arbeiðið at broyta byggisamtyktina fyri økið, tá neyðugu kanningarnar og vitan er fingin til vega.

**Skjøl:**
*25/01670-10, 2025.05.28_Staðseting lestrarheim í Havn.*
*25/01670-27, Góðkend heildarætlan frá 2012, matr. nr. 1000a og 1000e, Tórshavn.*
*25/01670-24, Framløga frá arbeiðsbólkinum um Lestrarheim í Havn*

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til,:
- at partur av matr. nr. 1000a, uppi við Heygsvegin, verður lagdur til lestrarbústaðir.
- at byggisamtyktin fyri økið hjá Landssjúkrahúsinum verður broytt, soleiðis at framtíðar virksemið rúmast í økinum.
- at samráðingarnar við komandi landstýrisfólk halda fram, og at endaliga avtalan verður løgd fyri nevndina, tá partarnir eru samdir um endaligu treytirnar.
- at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mars 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Heidi Lava Elgeirsdóttir og Bergur Robert Dam Jensen hava tikið undir við tilmælinum við telduposti.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Atkvøtt varð um tilmæli frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við10 atkvøðum fyri, ongari atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Elin Heðinsdóttir Joensen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Eingin

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen vildu hava ført í gerðabókina, at málið er komið ov seint á fundarskránna til vanligan býráðsfund, at tíðarfreistirnar sambært fundarskipanini hjá Tórshavnar býráð í hesum sambandi ikki eru hildnar, at embætisførslan hjá borgarstjóranum er skeiv og at hesi viðurskifti verða kærd til Kommunala Eftirlitið.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:50**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Elsa Berg | Heðin Mortensen | Gunnar Djurhuus |
| Annita á Fríðriksmørk | Anja Weyhe | Bergur Robert Dam Jensen |
| Guttormur í Skála | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Høgni Vilhelmsen | Birgir Nielsen |
| | Elin Heðinsdóttir Joensen | |